KOMMUNUPOLITIKKUR

*Stuðlað hava:*
*Kommunusamskipan Føroya*
*Løgmálaráðið*
*Mentanargrunnur Landsins*
*Eik Vísindagrunnurin*

*Beinta í Jákupsstovu, ritstjóri: Kommunupolitikkur*
© Høvundarnir og Fróðskapur
Perma: Ingi Joensen – Kommunur 2005-08;
samanlagdar kommunur bláar
Umbróting, prent og innbinding: Føroyaprent
Útgevari: Fróðskapur – Faroe University Press, Tórshavn 2008

ISBN 978-99918-65-21-8

# *Kommunupolitikkur*

*Beinta í Jákupsstovu, ritstjóri*

*Ingibjørg Berg*

*Bjørg Jacobsen*

*Bárður Larsen*

Fróðskapur
Tórshavn 2008

# Inngangur

Ætlanin við hesi bók er at styrkja medvit um og áhuga fyri lokala fólkaræðinum í Føroyum. Tær avgerðir, ið nú verða tiknar um at broyta galdandi kommunuskipan, eru størstu yvirskipaðu átøkini síðan 1872 at mynda kommunupolitikkin. Reyði tráðurin í hesi bók er, um hesar broytingar fara at bera við sær eina víðkan ella eina skerjan av politiska valdinum og fólkaræðinum í lokalsamfeløgunum.

Vit fara í hesi bók at viðgera ymiskar spurningar í sambandi við kommunupolitiska umboðan í Føroyum. Í *fyrsta kapitli* fer Beinta í Jákupsstovu at vísa á ymiskar myndlar fyri, hvussu hetta fólkaræðið kann skipast, og føroyskur kommunupolitikkur verður lýstur í mun til ástøði og skipanir í øðrum londum. Kommunur eru bæði stovnar sum umboða lokala fólkaræði, og fyrisitingarligar eindir sum eru undirlagdar eitt sentralt vald (statsvald, tjóðstatin, landið). Hetta er evnið fyri *øðrum kapitli*, sum vísir á ymisk søgulig og ástøðilig rák um hvat ið hevur verið hildið at vera rætta støðd á kommunum.

Í *triðja kapitli* fer Ingibjørg Berg at skriva um kommunala sjálvræði í eini broytingartíð. Hon fera at lýsa gongdina í føroyskum kommunupolitikki við støði í almennu umrøðuni, sum hevur verið um nýtt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur og nýggjan kommunubygnað. Við grundarlagi í ástøði á økinum, sum eru sprottin úr líknandi tilgongdum í grannalondum okkara, kanningum av viðurskiftunum har, og úr ástøði um fólkaræði yvir høvur, fer hon at lýsa virðis- og hugsjónargrundarlagið aftanfyri almennu viðgerðina. Serliga fer hon at lýsa, hvørja ávirkan neyv reglu-seting av málsøkjum áðrenn útlegging til kommunala umsiting fer at hava á viðurskifti sum skipanarliga kapasitetin hjá kommununum og fólkaræðisliga virkisførið hjá borgarunum.

Í *fjórða kapitli* fer Bárður Larsen at viðgera broytingarnar, sum

komu við nýggju kommunustýrislógini í 2000. Fyrst er ein lýsing av upprunanum til nýggju lógina, síðan eitt yvirlit yvir høvuðsbroytingarnar sum nýggja lógin hevði við sær. Eftir hetta verða tikin upp til kjak nøkur yvirskipað fólkaræðislig viðurskifti, ið lógarbroytingin elvdi til ella átti at sett á breddan. At enda røður høvundin um hetta: At nýggja kommunustýrislógin, eins og so at siga øll onnur føroysk lóggáva, hevði danska lóg sum neyva fyrimynd.

Í *fimta kapitli* er evnið staðbundnar nevndir. Tvær tær fyrstu vórðu stovnaðar í 1970-unum, í 2001 komu tvær, og í 2005 níggju. Í hesum kapitli fer Bjørg Jacobsen at lýsa og analysera hesi nýggju kommunalu organini: Hvat er lógargrundarlagið fyri hesar nevndir, og hvussu arbeiða tær ymisku nevndirnar? Hvat eru kriteriuni fyri, at eitt øki fær eina nevnd, og hvønn leiklut hevur nevndin mótvegis kommununi og móti bygdafólkinum?

Í *sætta* og *sjeynda* kapitli fer Beinta í Jákupsstovu at analysera úrslit frá spurnakanningum millum uppstillað til kommunuvalini í 2000 og 2004. Spurningar umrøddir í sætta kapitli eru m.a. hvussu val til býráð og bygdaráð eru skipað, hvat slag av listum sum eru í ymiskum kommunum, og hvussu nógv ið verða uppafturstillað og afturvald. Í sjeynda kapitli er evnið politisk umboðan: Hvussu væl umboða tey uppstillaðu og valdu ymiskar bólkar, hvørjum eru tey uppstillaðu serliga upptikin av, og hvussu fer valstríðið fram. Fokus verður m.a. sett á undirumboðanina av kvinnum í kommunupolitiskum høpi, og hvussu roynt hevur verið at betra kvinnuumboðanina.

Bókin byggir í stóran mun á tilfar sum vit sjálvi hava savnað. Millum tær týdningarmestu keldurnar eru 1) databasa um uppstillaði og vald 1992-2004, 2) spurnakanningar millum tey uppstillaðu til kommunuvalini 2000 og 2004, 3) samrøður við eini 20 politikarar og embætisfólk í kommunala sektorinum, 4) samrøður við limir í teimum 13 staðbundnu nevndunum og við umboð fyri tær fýra kommunurnar, ið hava slíkar nevndir, 5) skipaðar kanningar av gerðabókum hjá staðbundnum nevndum, og 6) skipaðar kanningar av broytingum í lógargrundarlagnum fyri kommunurnar.

Granskingarráðið gav verkætlanini stuðul í 2006 og 2007, takk fyri tað! Ein serstøk takk til Eli Kjersem, sum er fimti limur í bólkinum. Hon hevur m.a. hjálpt við spurnakanningum og verið

við til at skriva tvær frágreiðingar, sum er grundarlag fyri fleiri kapitlum í bókini. Takk til Audun Offerdal, professara, og Jacob Aars, granskara við Universitetið í Bergen, og somuleiðis takk til luttakarar í norðurlendsku kommunugranskingarráðstevnunum í Odense 2006 og í Gøteborg 2007 fyri viðmerkingar og íblástur. Takk til Ólav Christiansen, lektara á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya, fyri rættlestur og viðmerkingar.

Bókin er prentað við stuðuli frá Kommunusamskipan Føroya, Løgmálaráðnum, Eik Vísindagrunninum og Mentanargrunni Landsins. Takk fyri stuðulin.

Á Mikkjalsmessu 2008

Beinta í Jákupsstovu, Ingibjørg Berg,
Bjørg Jacobsen og Bárður Larsen

# 1

# Kommunur
# – stovnar við fólkaræði

*Beinta í Jákupsstovu*

*„Menn skapa kongaríki og tjóðríki, men kommunalir felagsskapir tykjast at koma úr Guds hondum“*, skrivaði Alexis de Tocqueville í 1834.[1] Alla staðni har tað eru tættbýli, eru tað eisini okkurt slag av politiskum skipanum, har fólkini á staðnum kunnu finna felags semjur um, hvussu hetta økið verður brúkt og røkt. Lokalsamfeløgini mugu finna fram til skipanir, so til ber at liva saman í frið og sóma. Summir heimspekingar lýsa grundarlagið fyri *statum* at vera sáttmálar millum fólkið og statsvaldið, har einstaklingar geva frá sær persónligt frælsi fyri at fáa trygd móti yvirgangi.[2] Tjóðríkini hava í modernaðari tíð fingið einkarætt til at brúka harðskap móti borgaranum, teirra legitimitetsgrundarlag er stýri við lóg.[3] Sum hægsti politiski myndugleiki kann *sentrala* statsskipanin seta formligar karmar fyri lokalpolitiska virkseminum. Løgtingið hevur formligan myndugleika til at delegera uppgávur ella at taka tær aftur, og til at leggja kommunur saman ella býta tær sundur. Men lokalsamfeløgini liva samstundis sítt egna politiska lív, óheft av statsvaldinum, og hava sínar serligu møguleikar og vansar í mun til fólkaræðiligt stýri.

Tað er so ymiskt, hvussu bundin fólk í okkara tíð eru at tí staðnum, har tey búgva. Summi eru so góð við heimplássið, við landskap og

---

1 „Man creates kingdoms and republics but townships seem to spring from the hand of God“ (Alexis de Tocqueville 1835; her í Sharpe, L.J. „Theories and values in local government.“ *Political Studies* 1970, s.159).

2 Thomas Hobbes *Leviathan,* 1651; John Locke *Two Treatises of Government*, 1690; her í Held, David *Models of Democracy.* Polity Press 2006.

3 Weber, Max *Makt og byråkrati.* Oslo, Gyldendal 1971.

fólkið har býr, at tey onga aðra staðni vilja búgva. Onnur kunnu ikki flyta, tí tey hava ábyrgd fyri familiu á staðnum, ella tí tey ikki finna arbeiði ella ikki hava ráð til hús aðra staðni. Onnur aftur fara bara at vera í hesum lokala, og kanska eisini sosiala, felagsskapi eina stutta tíð.

Fólk í somu kommunu hava nógv til felags, men tey hugsa ikki eins, og tey hava ikki altíð felags áhugamál. Tí er neyðugt hjá teimum eisini at hava ein politiskan stovn fyri at kunna loysa trætur sínámillum.[4] Í Føroyum hava vit eina aldargamla skipan, *grannastevnur*, fyri at taka sær av tí, ið var felags, longu tá landið varð bygt: hagi, fuglur, vatn o.s.fr. Men grannastevnur hava lítlan týdning longur; nú eru tað bý- og bygdaráð, sum skulu finna loysnir, sum hóska fyri kommununa. Hesi bý- og bygdaráð hava yvirtikið nakrar av teimum uppgávunum, sum grannastevnurnar høvdu (t.d. vatnveiting) og fingið ein hóp av uppgávum afturat. Nú fáa tær óivað uppaftur fleiri. Føroyar eru vorðnar eitt nútímans vælferðarsamfelag við m.a. skúlum og almennum tænastustovnum bæði til børn og gomul. Tá ið hetta verður skrivað, í 2008, verða ætlanir gjørdar at flyta ábyrgdina av almennum skipanum fyri børn og gomul frá landi til kommunurnar.

At lokala sjálvstýrið er lokalt, merkir, at hetta sjálvstýrið er avmarkað í mun til lands- og ríkisstýrið, sum kunnu avgera, at tað lokala sjálvstýrið verður víðkað ella skert. Ein kommuna er bæði ein *politiskur felagsskapur* og ein *fyrisitingarlig eind*. Tað er sum politiskur felagsskapur, at bygda- og býráð royna at finna loysnir fyri kommununa, sum ikki eru givnar við lóg. Sum fyrisitingarligar eindir skulu tær skipa fyri tí, ið verður ásett við lóg av løgtingi og landsstýri, at kommunurnar skulu gera. Landsstýrið, miðfyrisitingin og KSF metir, at fyri at kunna virka væl sum fyrisitingarligar eindir, eigur talið á kommunum at minkast. Til seinasta kommunuval í 2004 minkaði talið úr 48 til 34, til heystar verður talið minni enn 30, men sum kunngjørt á Ólavssøkusetuni 2008 er ætlanin, at tað í næstu framtíð bert skulu vera sjey kommunur. Hetta kann tykjast

4 Offerdal, Audun (2007) „Lokalstyreinndeling: administrativ effektivitet og sosiale realitetar." Framløga, kommunuseminar í Tórshavn 21. juni 2007.

skilagott, um kommunurnar fyrst og fremst skulu vera tænastuveitarar til fólkið, sum har býr. Men hvussu man hetta fara at ávirka *fólkaræðið* í kommununum?

Eyðsæð er, at færri politisk umboð verða vald. Eftir lógini kunnu í mesta lagi 17 fólk sita í býráðnum. Um bara sjey býráð verða eftir, verða sostatt í mesta lagi 119 býráðslimir í Føroyum. Helst verða tey færri. Nú hevur Havnin 13 býráðslimir, og hinar stóru kommunurnar hava valt at hava 11. Við hesum sniði verða 79 kommunupolitikarar í Føroyum, móti 220 í 2005-08 og 272 í 2001-2004. Sum dømi um hvat hetta merkir fyri lutfallið millum veljarar og vald kunnu vit hyggja at kommunuvalinum í 2004. Tá vóru 34.371 í Føroyum sum høvdu valrætt og eisini kundu veljast. 220 av teimum vóru vald, t.v.s. at í meðal umboðaði hvør kommunupolitikari 156 fólk. Við bert 79 býráðslimum høvdu føroyskir kommunupolitikarar í meðal umboðað 435 fólk. Tað eru munandi færri enn danskir kommunupolitikarar, men fleiri enn norskir, finskir og íslendskir kommunupolitikarar umboða, sí 1. talvu:

**Talva 1A:**
**Kommunuval í Norðurlondum.**
**Lutfall millum veljarar/valbar og vald.**

| | Føroyar Valið 2004 | Ísland Valið 2006 | Noreg Valið 2003 |
|---|---|---|---|
| Valbar/ Veljarar | 34 371 | 216 191 | 3 619 927 |
| Uppstillað | 785 | 2675 | 62 555 |
| Vald | 220 | 529 | 10 946 |

**Talva 1B:**
**Kommunuval í Norðurlondum.**
**Lutfall millum veljarar/valbar og vald.**

| | Finland Valið 2004 | Danmark Valið 2005 | Svøríki Valið 2006 |
|---|---|---|---|
| Valbar/ Veljarar | 4 099 864 | 4 191 725 | 7 098 097 |
| Uppstillað | 39 906 | 11 407 | |
| Vald | 11 966 | 2 522 | 13 078 |
| Meðaltal at umboða | 343 | 1 622 | 543 |

Í hvønn mun hetta hevur týdning fyri fólkaræði, veldst um, hvat fólk halda, at fólkaræði og luttøka í politikki eigur at innibera. Hugsanirnar eru sera ymiskar. Vit kunnu taka útgangsstøði í skilgreiningini hjá Beetham.[5] Hann sær nútímans fólkastýrisskipanir sum praktiskar tillagingar av tí fyrimyndarliga, sum er *beinleiðis fólkaræði.*[6] Avgerðir verða tá tiknar aftan á opið kjak, har øll hava

5 Beetham, David: *Democracy.* Oneworld Oxford, 2005, s 165.

6 Onnur halda øðrvísi. Eitt nú verður ofta víst á, at amerikansku fedrarnir ikki fataðu beinleiðis fólkaræði sum idealið, ið mátti víkja av praktiskum orsøkum. Í teirra hugaheimi var representatiónin saman við einum valdsbýti (vertikalt og horisontalt) neyðug fyri at framtvinga deliberatión. Sí t.d. sitat frá The Federalist No. 10 og umrøða av hesum sjónarmiði í Julian N. Eule, Judicial Review of Direct Democracy, The Yale Law Journal, Vol 99, 1990, 1503, s. 1526:

"The problems posed by majority factions were most acute in a direct democracy. Placing the exclusive power of ordinary lawmaking in governors distinct from the governed checked „the inducements to sacrifice the weaker party, or an obnoxious individual." Public views can be „refined and enlarged . . . by passing them through the medium of a chosen body of citizens, whose wisdom may best discern the true interest of their country, and whose patriotism and love of justice, will be least likely to sacrifice it to temporary or partial considerations." This was not a wholly naive or elitist vision of representatives as morally and intellectually superior actors--although it is certainly not above criticism on either ground. The vision was a broader one. Its scope encompassed the virtues of deliberation and cooperation."

sama rætt at siga sína meining, og allar meiningar (atkvøður) telja líka. Tað kann vera ópraktiskt, at øll luttaka sjálvi (tað tekur nógva tíð og kann geva hølistrupulleikar), og tá kunnu fólk velja umboð at taka avgerðir sína vegna, t.v.s. skipa fyri *óbeinleiðis fólkaræði*. Men um hetta ikki skal verða fámannaveldi (oligarki), sigur Beetham, mugu tað setast ávís krøv til skipanina: At øll í samfelagnum hava sama rætt at velja og verða vald, at øll hava somu møguleikar at luttaka í politiskum virksemi (t.d. í valstríði), og at tey fólkavaldu umboðini til eina og hvørja tíð kunnu verða kravd at standa til svars fyri tær avgerðir, sum tey hava tikið. Øll mugu eisini hava rætt til at fáa fulla og nágranna vitan um allar tær grunngevingar, sum hava verið fyri avgerðum, sum tiknar eru teirra vegna. Eisini skulu tey umboðaðu hava rætt til at broyta treytirnar hjá teimum, sum eru vald umboð í tí politisku skipanini.

Fólkaræði merkir also, at øll skulu hava sama møguleika at ávirka politiskar avgerðir. Í Føroyum hava vit *umboðandi fólkaræði*. Hetta inniber, at fólkið velur umboð at taka avgerðir fyri seg. Ofta verður tá kjakið um fólkaræðisliga luttøku ein spurningur um valluttøku og valúrslit. Men, sum Beetham vísir á, fólkið í einum fólkaræði hevur altíð myndugleika til at broyta ta politisku skipanina, um tað eru nóg nógv sum halda at skipanin ikki (longur) virkar sum ætlað. Eitt dømi er kravið um opinleika og opið kjak um alment virksemi: Politiska skipanin missir legitimitet, um fólk ikki halda at tey fólkavaldu geva nóg góðar grunngevingar fyri sínum politisku avgerðum. Tey kunnu tá krevja, at stýrisskipanin fær størri dám av *beinleiðis fólkaræði*. Tað inniber, at fólk flest luttaka á ein ella annan hátt í politiskum virksemi, og at almenna kjakið í størri mun fer at snúgva seg um tað, ið hendir *millum* valini.[7]

Um vit meta røturnar til lokala sjálvstýrið í Føroyum at vera grannastevnurnar, er hetta ein meira *beinleiðis* fólkaræðislig skipan. Hon er ikki ólík tí vit kenna frá Aten uml. 300 f.Kr., og frá víkingatíðini. Sum Bjørk skrivar: „Grandestævne er ikke nogen for Færøerne særegen institution. Tilsvarende institutioner kendes i så at sige alle

7 Held, David, *op.cit.*; Stava, Per: „Lokaldemokrati, brukar og borgar. Ideal og realitetar" í Sagli. Jo og Tor Bjørklund (red.) *Lokalvalg og lokalt folkestyre.* Gyldendal norsk forlag AS 2005.

germanske retsforfatninger, hvor der har været jordfællesskab".[8] Tilvitanin um hvønn týdning grannastevnan sum stovnur hevði í stýringini av lokalsamfelagnum var so sterk, at skipanin ikki varð kodifiserað við lóg fyrr enn í 1891. Grannastevnurnar umboðaðu virði, sum sambært Sharpe[9] eru grundleggjandi fyri lokalt sjálvstýri: Frælsi, luttøku og effektivitet. *Frælsi*: Avgerðirnar vórðu tiknar lokalt og vóru galdandi lokalt. *Luttøka*: Sambært Bjørk kom við tíðini ein broyting frá, at hvør maður hevði eina atkvøðu, til at tað vóru 1) umboð fyri hvørt húsarhald (húsfaðir), og 2) umboð fyri ogn (markatal). Oftast vóru umboðini fyri húsarhaldini menn, men húskið kundi eisini vera umboðað av eini kvinnu, sum tað sæst í umrøðu frá løgtinginum í 1884: „ved en husfader forstås den, som repræsenterer familien, hvad enten vedkommende er mand eller kvinde. Er det to familiefædre i et hus, er begge husfædre."[10] Hugburðurin til „kvinnuligar húsfedrar" er eitt dømi um, at kyn ikki hevði so avgerðandi týdning í gamla samfelagnum, sum tað seinni kom at fáa; og reglan um „begge husfædre" vísir, at um nýggj ættarlið giftust inn og fingu egið húsarhald uttan at seta egið búgv, var tað ikki ein forðing fyri, at eisini hesi húski fingu rætt til umboðan. *Effektivitetur*: Grannastevnur hava ivaleyst medvirkað til, at Føroyar høvdu eitt burðardygt nátturuhúsarhald í fleiri hundrað ár.

Fjølment luttøka í lokalpolitikki førir ofta til at tær lokalpolitisku avgerðirnar verða betri og meira effektivar, enn um bert fólk við ongum tilknýti til bygdina, og sum arbeiða í eini landsfyrisiting, skuldu funnið loysnirnar. Fólk á staðnum hava vitan um lokal viðurskifti, sum kann vera virðismikið ískoyti til tær metingar, sum landspolitikarar ella serfrøðingar hava gjørt. Tá ber betri til at laga almennar íløgur og tænastur til tørv og ynski hjá teimum, ið búgva har.[11] Breið luttøka gevur eisini myndugleikunum eina betri hóming av ymiskum tørvi hjá ymiskum samfelagsbólkum, enn um bert fá luttaka í politikki.[12]

8 Bjørk, Erik A. (1956/57): *Færøsk bygderet*, s 19. Matrikulstovan.
9 Sí Sharpe, op.cit.
10 Bjørk, op.cit. s. 31.
11 Sharpe. op.cit.
12 Beetham op.cit.

Eitt samfelag sum leggur upp til at fjøldin luttekur í politikki *(active citizenship)*, hevur nakrar fyrimunir fram um samfeløg, har tað bert er eitt fáment lið, ið hevur vald at taka politiskar avgerðir. Royndir hava víst, at fólk flest duga at nýta politiskt skil: Tá fólk luttaka í einum høpi, har politiskar loysnir skulu finnast fyri at loysa ein samfelagstrupulleika, verða tey meira hóvlig í mun til egin áhugamál, bæði tí at tørvurin hjá øðrum verður teimum meira sjónligur, og tí at tað er áhugamálunum hjá almenninginum, ikki bara sínum egnu, sum loysn skal finnast á.[13] Luttøka í politikki gevur meira vitan og økta kompetansu, eisini *politiska* kompetansu, og tað kann sigast at vera samfelagnum at gagni.

Í politiskum og fakligum kjaki um fólkaræði hevur tað leingi verið eitt rák við ótta fyri, at fólkaræðið í teimum 'gomlu' londunum skal vikna, tí fjøldin virkar at vera politiskt líkasæl. Mælt verður til at gáttin til luttøku í politiskum virksemi verður gjørd lægri. Seinastu árini hava kommunustýri í okkara grannalondum, ofta saman við lokaldemokratigranskarum og statsfyrisiting, gjørt royndir at endurnýggja politisku stovnskipanina, so at lokala fólkaræði kann mennast.[14] Ein máti er at velja *borgaraumboð,* t.d. eldraráð, ella at velja *brúkaraumboð* í stýri fyri almennar stovnar, t.d. barnagarðar. Á henda hátt verður *luttøku*fólkaræðið styrkt, í hvussu er á einum ávísum øki. Onnur átøk skulu styrkja *samskiftið* millum fólkið og teir politisku myndugleikarnar, millum veljarar og vald. *Samskiftis*fólkaræðið inniber, at politiskar avgerðir ikki verða tiknar, fyrr enn tað hevur verið opið kjak um málið, og tey fólkavaldu hava grundgivið fyri sínum niðurstøðum og avgerðum. Í nøkrum kommunum eru krøvini til hoyringar skerpt, so at fleiri fáa møguleika til at siga sína hugsan framman undan at avgerðir verða tiknar. Onnur hava tikið við eini skipan, sum sigur, at borgarar kunnu krevja at fáa mál á dagsskránna

---

13 Ostrom, Elinor og James Walker (ed.): *Trust and Reciprocity: Interdisciplinary Lessons for Experimental Research.* New York: Russel Sage Foundation. 2003.

14 Baldersheim, Harald og Lawrence E. Rose: „Kampen om kommunen: Foran et nytt kommunalt hamskifte?" í *Norsk Statsvitenskapelig Tidsskrift 3, 2003.* Universitetsforlaget; Aars, Jacob: *Noen kjennetegn på godt lokaldemokrati.* Rokkansenteret, http:/www.ks.no/upload/93137/JacobAarsKjennetegn.pdf, 2007.

í býráðnum. Eisini verður skipað fyri fólkafundum og lokalum fólkaatkvøðum, og alnótin verður nýtt til lokalpolitiskt kjak. Eitt nýtt 'tól' er *deliberativar hoyringar*, sum hevur verið roynt tá stór mál hava verið á skránni. Tá hava kommunur skipað *borgarapanel*, t.v.s. sett saman ein bólk av tilvildarliga valdum umboðum til at kjakast um málið og at geva býráðnum tilmæli. – Samstundis, ella kanska eisini framman undan hesum *top-down* royndum at styrkja lokala fólkaræði, er tað vorðið meira vanligt, at felagsskapir eru skipaðir *bottom-up* fyri at fáa ávirkan á ávís lokalpolitisk mál. Eitt sjónarmið er, at átøk *bottom-up* hava størri týdning enn tiltøk *top-down*, tá talan er um endurnýggjan av fólkaræði. Tey, sum stýra, hava sjáldan áhuga í at lata veruligt vald frá sær.[15]

Felags fyri hesar royndir at bøta um fólkaræðið eru ynski um at fáa meira *beinleiðis* fólkaræði, har flest øll luttaka í politiskum virksemi, eisini millum valini. Men ikki øll eru samd um at hetta er tað besta fyri samfelagið. Eftir teirra tykki er tað frægari við *umboðandi* fólkaræði, har fólkið velur umboð at taka avgerðir fyri seg. Uppgávan hjá teimum fólkavaldu er at hava umsorgan fyri øllum samfelagnum og at finna góðar heildarloysnir. Tað merkir, at tey, sum hava serligan hug til politiskt virksemi, mugu kappast við onnur um at verða vald. Um veljararnir ikki hava álit á teimum, verða tey ikki vald, og um veljararnir hava mist álit á teimum, verða tey ikki afturvald.

Í *elitu*fólkaræði verður vanligi borgarin ikki mettur at at hava skil á politikki. Valdið má tí latast til eitt úrvalslið, sum so eigur at fáa arbeiðsfrið.[16] Omanfyri eru nevnd dømi um hvussu grannalond hava sett skipanir á stovn, sum skulu økja um politiska luttøku og samskifti. Hin vegin eru samstundis stýringsbroytingar í somu londum, sum hava meira felags við *elitu*fólkaræðisliga hugsan. Roynt hevur verið, sum í Føroyum, at minka um talið á fólkavaldum umboðum í kommununum. Hildið verður, at málsviðgerðin ofta gerst óneyðuga drúgv og fløkt, um nógv taka lut. Áhugavert er í tí sambandi hvussu stóran dent Fólkaræðisnevndin,

15 Aars op.cit.

16 Schumpeter, Joseph: *Capitalism, Socialism and* Democracy, 1942. Her: Held, op.cit.

sum Norðurlendska Ráðharraráðið setti í 2004, legði á týdningin av, at nógv fáa roynt seg í politikki. Teirra niðurstøða var, at „De nordiske länderna och självstyrelsesområdena föreslås återupprätta uppfattningen om kommunala förtroendeuppdrag som en skola i demokrati – öka snarare än minska antalet förtroendevalda.“ [17]

Í føroyska kjakinum seinastu árini hevur ein grunngeving fyri at minka um talið á kommunustýrislimum verið at skipanin er ov dýr. Síðan lógarbroytingina í 2000 eru samsýningarnar til politikarnar nógv hækkaðar. Summi mæla tí til heldur at brúka pengar til løn til kommunufyrisiting enn til eitt stórt tal av kommunupolitikarum[18] (sí eisini kap. 3 og kap. 5 í hesi bók). Hesar framførslur avspegla ein hugsanarhátt, har tey, ið búgva í kommununi, fyrst og fremst fáa ein leiklut sum *brúkarar* av kommunalum tænastum. Men fólkið er eisini *borgarar* við politiskari ábyrgd og rættindum. Í kommunupolitiska kjakinum her á landi tykist minni at hava verið hugsað um hvussu fólkaræðisliga skipanin virkar.

Tey sum rokna *elitu*fólkaræðið sum eina góða fólkaræðiliga skipan, meina at ein skipan við vali t.d. fjórða hvørt ár, har øll hava atkvøðurætt o.s.fr., í sjálvum sær tryggjar, at tey, ið hava frægast politiskt skil, koma at sita við politiska valdinum. Um vallutøkan er høg ella lág, hevur í hesum høpi minni týdning.[19]

Eisini hjá teimum sum mæla til skipanir við *val*fólkaræði, er tað *umboðandi* heldur enn *beinleiðis* fólkaræði, sum er tað fyrimyndarliga. Men hesi halda tað vera umráðandi, at fólkið vísir, at tað stuðlar ta politisku skipanina við at fara á val. Stór vallutøka bendir á eina politiska álitisváttan. Harafturat má sambandið millum stýrandi og

17 Demokratiutvalget: *Demokrati i Norden. Sluttrapport.* ANP 2005:701. Nordisk Ministerråd, s. 150.

18 *Sosialurin* segði 22. nov. 2006 frá einum borgarafundi í Suðuroy kvøldið fyri, at landsstýrismaður Jacob Vestergaard kundi vísa á, at teir til saman 42 bý- og bygdaráðslimirnir í teimum sjey kommununum í oynni fingu útgoldið til saman 3,6 milliónir kr í lønum og nevndarsamsýningum. Um kommunurnar vórðu samanlagdar, helt hann fyri, fór eitt býráð við 11 limum at gera tað peningaliga møguligt at fáa eina professionella umsiting, sum fór at vera minni bundin av miðfyrisitingini í Havn.

19 Sbr. t.d. ta sera lágu vallutøkuna til val í USA.

stýrd vera gott, eisini millum valini.[20] Tey fólkavaldu umboðini eru tá *delegatar* við givnum mandati frá veljaranum. Tey mugu hava sítt mandat í huga, og um nýggir spurningar stinga seg upp millum valskeiðini, mugu tey spyrja seg fyri t.d. á flokstingi, soleiðis at avgerðirnar, sum tey eru við til at taka, eru í samsvar við áhugamálini hjá hjá teimum umboðaðu.[21]

Hvussu man hugsanin vera um fólkaræði í føroysku kommununum? Søguliga sæð tykist fyrimyndin at hava verið elitufólkaræði. Eftir grundlógarlýsingina komu tey fyrstu átøkini til tess at nútímansgera umsitingina í lokalsamfeløgunum við „Lov om fattigvæsenet på Færøerne" í 1855. Í hvørjum prestagjaldi, umframt í Havnini sum øki fyri seg, skuldu nú vera eitt „fattigforstanderskab". Prestur var formaður. Ein embætismaður var fastur afturat: í Havnini fútin og í hinum økjunum sýslumaðurin. So vóru tað teir fólkavaldu: Í Havnini vóru tríggir limir valdir „af samtlige de Huusfædre i Sognet, som ikke have nydt nogen Fattigunderstøttelse, der ikke er tilbagebetalt eller eftergiven". Á sama hátt vóru limir valdir til forstandarskapini í bygdunum, ein úr hvørjari kirkjusókn.

Nøkur ár seinni var kommunalt sjálvstýri sett í verk í Føroyum, eini tríati ár seinni enn í Danmark.[22] Í 1866 kom „Lov om Byen Thorshavns økonomiske Bestyrelse", sum segði, at „Landfogden og Byens Repræsentanter i Forening" skuldu stýra býnum. Tey fólkavaldu vórðu vald á almennum valum. Atkvøðurætturin var avmarkaður til „alle fuldmyndige Mænd, der ikke staa i noget personligt Tjenesteforhold, naar de have fast Ophold i Kommunen i det sidste Aar og erlægge i kommunale Afgifter et Beløp af mindst to

20 Stava op.cit.

21 Christophersen, Jens A. *Representant og velger.* Tidsskrift for Samfunnsforskning 1963 og 1964.

22 Kommunala sjálvstýrið í Danmark stavar frá lógum frá 1837, 1840 og 1841 um 'Købstædernes, Hovedstadens og Landkommunernes Styrelse', og kom also fyrr enn einaveldið var avloyst av tjóðskaparligum fólkaræði í 1848. Í Føroyum komu ikki lógir um kommunalt sjálvstýri fyrr enn eini tjúgu ár aftaná at løgtingið var endurreist sum ráðgevandi amtskommunalur stovnur í nýggju fólkaræðisligu skipanini í danska kongsríkinum.

Rigsdaler aarlig.“ Fútin hevði fastan sess fram til 1908. Tá varð lógin broytt, soleiðis at hereftir vóru allir býráðslimir fólkavaldir.

Í 1872 var restin av landinum býtt upp í sjey kommunur, við teimum sjey prestadømunum sum grundarlag, og við *forstandarskapum* sum stýrum við 5-9 limum.[23] Eisini her var ein embætismaður settur at hava eftirlit við at skil var í, tá teir fólkavaldu stýrdu, sí § 3: „I Skole- og Fattigsager har Sognepræsten Sæde og Stemme i Forstanderskabet.“ Sambært Steining gav hetta prestum ein nógv meira týðandi leiklut í føroysku kommunustýrunum enn teirra starvsfeløgum í Danmark.[24] At embætisfólk skuldu hava umsjón við teimum fólkavaldu avspeglar eina hugsan um, at bert elitan í samfelagnum er før fyri at finna rættar politiskar loysnir. Eisini aðrar reglur um aldur, kyn, ogn og heimarætt søgdu at ikki hvør sum helst kundi vera fólkavaldur. Aldursmarkið var 25 ár, og kvinnur kundu ikki velja ella verða valdar til kommunustýrini fyrr enn lógarbroytingar vórðu gjørdar í 1908 og 1909.

Føroyar hava havt strangari reglur enn grannalondini, tá talan er um at geva fólkum við øðrum ríkisborgararætti rætt til at luttaka í lokala fólkaræðnum. Vallógin er nú broytt, soleiðis at frá 2004 hava norðurlendskir ríkisborgarar, og frá 2006 eisini aðrir ríkisborgarar, havt bæði valrætt og valbæri til kommunuval, um tey hava havt fastan bústað í Føroyum seinastu trý árini undan valinum.

Fyrstu árini aftan á at kommunustýrini vórðu sett á stovn vóru eingir flokkar í Føroyum. Við flokkunum komu nýggjar hugsanir um rekruttering av fólkavaldum. Hetta fekk sjálvandi serligan týdning til løgtingsval, men eisini til kommunuval í Havnini og í bygdum, har politiskir flokkar stilla listar upp. Frá 1908-09 til 1972 høvdu stillararnir heimildina at raðfesta valevnini á listanum til kommunuval: Tann ið stóð ovast á listanum varð altíð fyrst valdur, tann sum stóð nummar tvey, varð næsti maður o.s.fr., eisini um

23 Løgtingið skuldi áseta limatalið. Útgangsstøðið skuldi vera, at hvør sókn skuldi hava eitt umboð. Forstandaraskapið valdi eina sóknakommissión við trimum limum, ein teirra mátti vera limur í forstandarskapinum. Hesin limur var formaður, tá tað ikki vóru skúlamál ella fátækramál, sum skuldu viðgerðast. Um so var, varð sóknapresturin fjórði limur og formaður.

24 Steining, Jørgen (1958) „Nyere historie“ í Jacobsen, O. og N. Djurhuus (red): *Færøerne I.* Dansk-færøsk samfund , s. 231.

onkur, sum stóð seinni á listanum, fekk fleiri persónligar atkvøður. Á uppstillingarfundunum varð avgerð tikin um, hvørji skuldu verða umboð floksins ella listans, og við hvørjari raðfesting á listanum. Hetta merkti samstundis at størri dentur kundi leggjast á leiklutin hjá teimum valdu politikarunum sum delegatar ella umboð fyri sínar stillarar. Núgaldandi valskipan er at tey við flestum atkvøðum verða vald. Plássið á listanum hevur ongan týdning, bara navnið er komið upp á. Hetta kann hugsast at bera við sær at summi av teimum fólkavaldu leggja minni dent á sín leiklut sum umboð fyri ein flokk ella ein bólk. Kanska tey heldur síggja seg sum úrvalingar, sum av øðrum verða mett at hava serligt politiskt skil, og tí mugu stremba fyri at finna politiskar loysnir saman við hinum fólkavaldu.

Sum skilst eru ymiskar hugsanir um hvussu borgarar skulu taka lut í politikki, og hvussu sambandið skal vera við tey valdu umboðini. Tað eru eisini ymiskar hugsanir um hví fólk skulu luttaka í politiskum virksemi. Ymiskir hugsanarhættir um týdningin av almennari luttøku hava sín uppruna í einum grundleggjandi og afturvendandi spurningi. Hetta er spurningurin um í hvønn mun tað ber til at finna loysnir á politiskum stríðsmálum. Summi halda at tað *ber* til at finna fram til tað rætta at gera, um bert tey røttu fólkini, t.v.s. tey sum hava best skil, stýra tilgongdini. Onnur halda *ikki*, at tað ber til at finna 'rættar' loysnir, men at tað í einum fólkaræði tíbetur ber til at finna *semjur*, sum bólkar við ymiskum áhugum kunnu taka undir við.[25] Munirnir í hugsanarhátti eru stiliseraðir í mynd 2:

25 Sbr. March, James G. og Herbert A. Simon (1993) *Organizations.* Balckwell, kap. 5.

**Mynd 2:**
**Hvørji skulu luttaka í viðgerðini av politiskum málum?**

| | | **Endamálið fyri politiskum virksemi** | |
|---|---|---|---|
| | | **Finna semju (politisk konflikt)** | **Finna rætta loysn (politiskt harmoni)** |
| **Fyrimyndarlig politisk luttøka** | **Beinleiðis luttøka** | 1. Almenn luttøka (luttøku-fólkaræði) | 2. Alment samskifti (samskiftis-fólkaræði) |
| | **Umboðandi luttøka** | 3. Áhugaumboð (delegatar) (valfólkaræði) | 4. Úrvalsfólk (elitufólkaræði) |

Bæði tá dentur verður lagdur á *samskifti*, og tá ið valdið at taka avgerðir verður latið *úrvalsfólkum* (einari elitu), verður hugsað at tey skilagóðu fara at megna at finna fram til tær røttu loysnirnar. Roknað verður við at loysnirnar finnast, um bert vit og skil verður tikið í brúk. Semjuhugsanirnar (t.e. fólkaræði við *almennari luttøku* og fólkaræði við vali av *áhugaumboðum*) kunnu har afturímóti bólkast í tað slagið av hugaheimi, har tað verður mett, at fólk mugu tingast við onnur um egin og felags áhugamál, tí áhugamálini hjá ymiskum samfelagsbólkum ikki eru sameinlig, og at tað tí ongantíð fer at bera til at finna til ta 'røttu' loysnina. Upprunamerkingin fyri latínska orðið 'interesse' er 'at vera millum'. Síðan hevur hetta orðið fingið merkingina 'áhugamál'.[26] Henda merking ímyndar sostatt hugmyndina um semjuna sum loysn. Tá er tað av størsta týdningi at tín bólkur er umboðaður, har avgerðir verða tiknar, antin talan er um stættarliga ella landafrøðiliga umboðan, kvinnu- og mansumboðan ella aðra umboðan.

26 Jónasdóttir, Anna G.: „On the Concept of Interest, Women's Interests and the Limitations of Interest Theory", í Jones, Kathleen and Anna G. Jónasdóttir (1985): *The Political Interests of Gender.* Sage. 1985.

**Samanumtøka**

Í hesum kapitulli hevur verið víst á ymiska hugsan um hvussu fólkaræðið í kommununum eigur at verða skipað og mannað. Summi halda at øll eiga at (hava møguleika fyri at) luttaka beinleiðis. Í okkara døgum er skipanin við valdum umboðum fast inngrógvin. Tí munnu tey flestu halda tað vera rætt at regluliga skipa fyri valum, har tey fólkavaldu fáa eina álitisváttan um at halda fram, ella nýggj umboð verða vald.

Seinastu árini hevur verið merkt av tveimum mótstríðandi rákum: Samstundis sum ynski verða sett fram um størri almenna luttøku í lokalpolitikki, verður roynt at minka um talið á fólkavaldum. Í Føroyum kann úrslitið av kommunusamanleggingum verða at talið á kommunupolitikkarum verður undir 30 % av tí, tað var í 2001-2004 (79/272). Færri sleppa tá at royna seg í fólkaræðisligum stovnsvirksemi; og vandi kann verða fyri, at tey fólkavaldu (framvegis) fara at umboða elituna heldur enn fjøldina.

Samansetingin av kommunustýrunum sigur nakað um, hvussu tann politiska skipanin virkar. Um tað er torførari fyri summar bólkar at verða umboðir enn tað er fyri aðrar bólkar, kann tann politiska skipanin verða hildin at vera órættvís, og um skeivleikarnir sleppa at halda fram, kann politiska skipanin missa sín legitimitet. Tað er ofta lítil bati í bert at skipa fyri politiskum kjaki uttan fyri teir stovnar, har politisku avgerðirnar verða tiknar, tí um kjakið er púra óforpliktandi og ikki tengt at avgerðunum, kann hetta bera við sær at borgararnir missa (enn meira) álit á politisku skipanini.[27]

Vit venda aftur til hesar spurningar í hinum kapitlunum í bókini.

27 Christensen, Dag Arne og Jacob Aars: *Teknologi og demokrati. Med norske kommuner på nett!* Rokkansenteret, 2002.

# 2

# Kommunan – lokalpolitiskur felagsskapur og fyrisitingarlig eind[1]

*Beinta í Jákupsstovu*

## 2.1 Inngangur. Hugsjónarlig rák um kommunuskipanir

Føroyskur kommunupolitikkur er nú í broyting. Gomul siðvenja møtir nýggjum hugsanum. Hetta eru hugsanir um hvat ein kommuna er, hvat ið kommunupolitikarar skulu taka sær av, og hvussu stórar kommunur eiga at vera. Ætlanir um broytingar í kommunuskipanini eru óivað ávirkaðar av gongdini í grannalondunum. Í øllum Norðurlondum er kommunusamanlegging nú ein politiskur málsetningur, og endamálið er at fáa meira effektivar og virkisførar kommunur.

Í bókini *Kommunestørrelse og lokalt demokrati*[2] umrøða Kjær og Mouritzen hugsanarhættir sum hava ligið til grund fyri kommunusamanleggingunum í Danmark. Tá vit sammeta grundgevingarnar fyri broytingum í donsku kommunuskipanini í 1970unum við grundgevingarnar fyri samsvarandi broytingum í Føroyum í dag, koma nógv felags eyðkenni til sjóndar í grundgevingunum: [3]

1 Hetta kapitlið er ein longri útgáva av fyrilestri hildin á Frændafundi á sumri 2006. Sí eisini tvær frágreiðingar skrivaðar saman við Eli Kjersem: *Rekruttering av færøyske kommunepolitikere* (Møreforsking 2005:4) og *Politisk representasjon i et kommunepolitisk system i endring* (Møreforsking 2008:7).

2 Kjær, Ulrik og Poul Erik Mouritzen (red.) (2003): *Kommunestørrelse og lokalt demokrati.* Syddansk Universitetsforlag, Odense (2003).

3 Takk til prof. Mogens N. Pedersen fyri hesa ávísing á XV. norðurlendska kommunuseminarinum í Odense nov. 2006.

> Ser man tilbage til kommunalreformen i 1970, var det i udpræget grad dette argument, der blev holdt frem som en gulerod for kommunerne: „Gør Jer større, og I vil kunne få overført opgaver og beslutningskompetence", var beskeden fra staten til kommunerne.[4]

Tey hugsjónarligu rákini seinasta mansaldur um skipan av kommunum hava, sum ávíst av Mouritzen og Kjær, sín uppruna úr USA. Kommunusamanleggingar frá umleið 1970 vórðu framdar við tí fyri eyga at fáa kommunur, sum vóru meira effektivar, við størri førleika (kapasiteti), og við størri sjálvstýri. Við størri kommunum var roknað við at tað fór at verða meira áhugavert at fáast við lokalpolitikk, tí við størri kommunum bar til at flyta uppgávur av týdningi frá tjóðartingi og -fyrisiting (landinum) til lokala fólkastýrið (kommunurnar). Kommunurnar fóru tá at hava ráð til eina meira professionella fyrisiting, og fóru at verða betri førar at taka avgerðir um hvussu uppgávurnar kundu loysast í mun til vav og dygd, fígging og íverkseting. Um virksemið í hvørjari kommunueind varð størri, varð roknað við at raksturin lutfalsliga fór at gerast bíligari. Eisini var tað hildið at vera ein fyrimunur, um tað vórðu færri politikarar. Í staðin átti at verið roynt at styrkja ta „pluralistisku" skipanina, t.d. við at gera tað lættari at skipa áhugafeløg, sum so kundu leggja sína orku í at royna at fáa politisku skipanina at fremja síni áhugamál.

Hugsanirnar frá 1970unum bygdu sostatt á ta fatan, at kommunan skuldi vera ein samskipað eind, sum tók sær av øllum teimum lokalmálum, sum kundu loysast innan sítt landafrøðiliga øki. Seinni komu nýggjar hugsanir úr Ameriku, hesu ferð við navninum *Public Choice*, sum metir hugsanarháttin frá 1970unum at vera ov stirvin. Nýggi hugsanarhátturin speglast í málburði. Nú verða íbúgvararnir í kommununi (borgarar/veljarar) nevndir „brúkarar", og serligur dentur verður lagdur á leiklut kommununnar sum tænastuveitari (heldur enn sum politiskur felagsskapur). Nú ræður um at fáa sambandið millum brúkara og tænastuveitara so tætt sum til ber. Tá so er, hóskar tað ikki altíð at loysa øll mál í einari eindarkommunu; viðhvørt er kommunan ov stór og viðhvørt er hon ov lítil. Heldur enn

4 Kjær og Mouritzen 2003, s.13.

at skipa fyri *multi purpose*-kommunum, eigur kommunan sambært Public Choice-ástøðinum at vera *poly-sentrerað*. Í USA merkir hetta tillaging av skipanini til verandi støðu, tí kommunurnar í USA hava ikki so føst landafrøðilig mørk sum t.d. í Skandinavia. Tað kann vera ein kommunal eind fyri vatnveitingina, ein onnur fyri sløkkilið, aðrar fyri ymisk sjálvstýrandi skúlaøki, o.s.fr.[5] Hetta svarar til tað vit kenna í Føroyum: smáar kommunur sum við hvørt hava kommunalt samstarv tvørtur um kommunumørk, og skipanir av størri 'kommunum' til serlig endamál, t.d. interkommunalt samstarv um streym og burturkast, kommunulæknar og barnavernd. Eisini eru føroysk dømi um at skipað verður fyri minni 'kommunum', t.d. nýggja skipanin við skúlastýri fyri hvønn skúla sær. Kortini má sigast at stórur munur er á hugburði í USA og Føroyum, og serliga hvat viðvíkir tí *at hoyra til* í einum grannalagi. Hetta hevur óivað sítt at siga fyri munir í hugsanum um hvat ein kommuna er, og hvat uppgávurnar hjá kommunupolitikarum eru. Um amerikansk ástøði avspegla hugsanina hjá fólkinum, verður mest hugsað um *einstaklinganna nyttumaksimering*, – at hvør sær hugsar bert um hvat ið sær gagnar best – og um borgarin ikki er nøgdur, so flytir hann bara ("atkvøður við beinunum").

Ofta hava fólk í Føroyum verið so bundin at heimstaðnum (í virki og/ella kensluliga) at tað skal nógv til, áðrenn tey flyta. Tá so er, er tað ein meira upplagdur møguleiki at luttaka í kommunupolitikki fyri at fremja felags áhugamál, til frama fyri sín bólk ella fyri kommununa sum heild. Men kanska eru føroyingar ikki longur so bundnir at heimstaðnum? Kanska broytingarnar í kommunuskipanini ikki (bara) eiga at metast sum aping eftir øðrum londum, men sum ein tillaging til tær stóru bygnaðarligu broytingar, sum eru farnar fram seinastu árini?

Hetta kapitlið fer fyrst at greiða frá søguligu gongdini í føroyskum kommunupolitikki, frá kommunurnar vóru stovnaðar til tær seinni vórðu sundurbýttar. Síðan verður greitt frá samanleggingum av kommunum, har m.a. hugt verður at møguligum bygnaðarligum grundgevingum fyri samanleggingum seinastu árini. Kommunupolitikkur er í stóran mun vælferðarpolitikkur. Í seinasta parti av kapitlinum verður hugt at nøkr-

5 Op.cit. s 12-13.

um myndlum fyri skipan av kommunum, soleiðis at tær kunnu megna fyrisiting av vælferðartænastum, og hvussu tær føroysku kommunurnar hava skipað sína vælferðarumsiting sammett við onnur Norðurlond.

## 2.2 Føroyska kommunuskipanin í søguligum høpi

Í fyrsta kapitli varð greitt frá stovnsetingini av føroyskum kommunum við lógum frá 1866 og 1872. Eisini varð greitt frá hvør ið fekk sess í bý- og bygdaráðunum, og um røturnar aftur til 'fattigforstandarskapini' frá 1855. Hilmar Høgenni hevur greinað gongdina tá avgjørt var hvussu føroyska kommunuskipanin skuldi vera:[6]

Tá løgtingið varð endurreist í 1852, vóru tvey uppskot klár um eina kommunuskipan. Bæði uppskotini vóru frá 1850. Annað uppskotið var frá embætismonnunum í Havn, hitt frá Niels Winther. Bæði uppskotini mæltu til, at í samband við stovnan av amtsráði / endurreisn av løgtinginum skuldi hvørt prestagjald hava eitt 'kommunalbestýrilsi', umframt at Tórshavnar sókn og restin av hesum prestagjaldinum skuldi vera tvær kommunur. Innanríkismálaráðharrin metti hinvegin at føroyingar ikki vóru búnir enn. Hann helt tað var at leypa framav at geva føroyingum meira enn eitt ráð við fólkavaldari umboðan í fyrstu atløgu. Kommunustýrini komu tí ikki samstundis sum løgtingið varð sett á stovn í 1852 sum ráðgevandi stovnur við nøkrum fleiri uppgávum enn donsku amtsráðini.[7]

Í 1866 kom, sum nevnt í kap. 1, „Lov om Byen Thorshavns økonomiske Bestyrelse". Løgmálaráðið gjørdi lógaruppskotið við grundstøði í uppskoti frá amtmanninum í 1863 og viðmerkingum frá løgtinginum til amtmannsuppskotið.[8] Grundarlagið fyri at gera serliga lóg fyri Havnina var at lógir framman undan bert fevndu um Tórshavnar kirkjusókn og ikki alt prestagjaldið.[9] Tórshavn hevði

6 Høgenni, Hilmar (1992): *En færøsk kommunalreform?* Københavns Universitet, Økonomisk Institut, serliga kap. 6.

7 Thorsteinsson, Jákup (1990) Et Færø som et *Færø: studier i Færøernes forfatningsmæssige stilling i forhold til Danmark 1834-1852*, Aarhus University Press.

8 Eisini vóru lógir smíðaðar fyri Akureyri og Reykjavík brúktar sum grundarlag fyri føroysku lóggávuni, sí Høgenni op.cit.

9 Lógin frá 1855 um 'Fattigvæsenet', og lógirnar frá 1856 um 'Brandvæsen' og

tá ikki fingið býarrættindi; „Lov om Byen Thorshavns kommunale Styrelse" kom ikki fyrr enn 27. mai 1908. Tá varð eisini fólkaræðið styrkt soleiðis at fútin ikki longur var formaður í býráðnum. Nú skuldu øll umboð veljast (sí kap. 1). Við hesi lóg fingu kvinnur í Havn valrætt og valbæri. Árið eftir fingu eisini kvinnur í bygdunum hesi rættindi við lóg frá 30. apríl 1909 um „Ændring i Landkommunalloven af 28. Febr. 1872, §§ 4-10".[10]

Í 1867, eitt ár aftan á at Havnin hevði fingið kommunala umboðan, setti løgtingið fram ynski um at fáa betri skipanir fyri sløkkiliði, samferðslu og heilsuverki, eisini uttanfyri Havnina. Amtmaðurin skrivar í sínum viðmerkingum til løgtingsuppskotið at kommunur eiga at verða settar á stovn fyri at taka sær av slíkum málum. Løgmálaráðharrin ivaðist í um løgtingið var samt við amtmannin, og hann bað tí løgtingið um at greina nærri frá sínum ynskjum. Løgtingið bað um at fáa eitt uppskot til kommunulóg sum kundi betra um undirvísingina í bygdunum; tá var enn eingin skylda hjá føroyskum børnum at ganga í skúla. Amtmaðurin fekk síðan til uppgávu frá løgmálaráðharranum at gera uppskot til føroyska kommunulóg við donsku lógini frá 1867 sum fyrimynd.

Tann største ósemjan millum myndugleikarnar í Føroyum og í Keypmannahavn kom at vera um grundeindina fyri kommununum. Skuldi hetta vera prestagjaldið ella sóknin? Sóknarbýtið hevur djúpar røtur; vit finna býtið longu í íslendsku lógbókini Grágás, skrivað upp í 1118.[11] Stefán Ólafsson[12] skrivar at kommunusóknirnar vórðu skipaðar fyri at greiða hvørji høvdu ábyrgd fyri teimum, ið ongan góðan áttu. Sóknin var við øðrum orðum ikki bert ein kirkjusókn; hon var eisini grundeindin í tí politisku skipanini. Vit hava dømi

---

'Bygningskommission', sí Høgenni op.cit.

10 Jacobsen, Elin Súsanna: „Kvinnuvalrættur í Føroyum". Fyrilestur í fundarrøð sum Demokratia skipaði fyri september 2008.

11 Djurhuus, Johan (1974): „Um sundurbýti av Nes sóknar kommunu lýst við dømum frá øðrum kommunubýtum." Í Fróðskaparrit, 22. bók, 1974, s. 135

12 Stefán Ólafsson: „Þróun velferðarríkisins" í G. Hálfdanarsson og S. Kristjánsson *Islendsk þjóðfélagsþróun 1880-1990.* Reykjavík. Félagsvísindastofnun Háskóla Íslands og Sagnfræðistofnun Háskóla Íslands, 1993.

frá nýggjari tíð at skilt hevur verið millum sókn í kommunalari og í kirkjuligari merking.[13]

Tá henda nýggja skipan skuldi setast á stovn, er tað er sjálvandi trupult at meta um týdningin av at ein aldargomul skipan var frammanundan. Kanska stovnurin er so inngrógvin at hann kann sammetast við eina livandi veru, sum hevur krav upp á at yvirliva? Ella kanska fyribrigdið verður brúkt av teimum, ið hava egin áhugamál at røkja – sum eitt høvi til at halda uppi verandi valdsskipan? Her verður ikki roynt at svara hesum spurningum. Amtmaðurin hevði ta áskoðan at sóknirnar máttu vera grundarlagið fyri kommununum, um kommunuskipanin skuldi fáa undirtøku millum fólk. Innanríkisráðharrin var ikki samdur við amtmannin. Hansara áskoðan var at hetta fór at geva ov nógvar kommunur, 40 sóknaráð til umleið 9000 fólk. Hann vildi hava prestagjaldini sum grundeind samsvarandi skipanini av økjum til fátækrahjálp frá 1855. Henda loysn samljóðaði eisini betri við donsku kommunuskipanina.

Júst skipanin av fátækrahjálpini hildu løgtingsmenn hevði riggað betri um sóknin var grundeindin og ikki prestagjaldið. Útreiðslurnar til fátækrahjálp vóru vaksnar nógv síðan henda nýggja skipanin við 'fattigkommissiónum'var komin. Í einum prestagjaldi máttu sóknir við stórari fíggjarorku (og fáum fátækum) gjalda nógv meira til skipanina enn fátæk sókn (við nógvum fátækum). Løgtingið helt at um hvør sókn sær tók sær av sínum fátæku, høvdu samlaðu útreiðslurnar minka, og at tá stuðulin frá amtsfátækrakassanum varð býttur út, kundi ójavni í útreiðslum millum sóknirnar verðið javnaður.

Úrskurður løgtingsins í kjakinum millum amtmannin og ríkisstjórnina var at prestagjøldini kundu vera grundarlag fyri kommununum. Hinvegin var mett umráðandi at hvør sókn var umboðað í 'forstandarskapinum' fyri prestagjaldið, og at hvør sókn

---

13 Sí Djurhuus, op.cit., sum á s. 136 vísir á dømi um Dímun, sum var kirkjusókn, men ikki slapp at vera kommunusókn; og á s. 135 dømi um Skopun, sum fyrst varð kirkjusókn í 1898, síðan sókn í kommunalum týdningi á 1909, og at enda kommuna fyri seg í 1931.

var ein búskaparlig eind[14] við eini 'sóknakommissión' til at umsita kommunalu viðurskiftini.

Løgmálaráðið valdi at gera eitt endaligt lógaruppskot í samsvari við úrskurð løgtingsins. Undir viðgerðini í landstinginum og fólkatinginum ivaðust summir av teimum donsku fólkavaldu í, um tað var rætt at víkja frá danskari lóggávu við at lata sóknirnar vera sjálvstøðugar búskaparligar eindir, og við at lata prestarnar fáa so sterkan leiklut í forstandarskapinum og í sóknaráðnum. Men føroysku umboðini stríddust fyri framlagda uppskotinum, og danir hildu seg ikki kunna gera annað enn at ganga løgtingsins ynskjum í møti.

Við kommunulógini í 1872 vórðu so sjey 'landkommunur' settar á stovn, við tilsaman 39 sóknum. Harafturat kom sum áður nevnt Havnar kommuna, sum var skipað við egnari lóg. Hilmar Høgenni metir[15] at løgtingið longu frá byrjan hevur roknað við at kommunuskipanin frá 1872 ikki fór at vara. Eftir eina tillagingargongd mundu stór sókn fara at verða skild frá sum sjálvstøðugar kommunur. Hetta hendi eisini. Longu í 1876 kom fyrsta frábýtið, tá Nólsoyggin vildi verða egin kommuna. Í 1900 vóru 15 kommunur. Í 1910 fór fyrsta sókn í tvey við at Skopun varð sjálvstøðug sókn í Sands kommunu, og í 1930 varð Skopun eisini sjálvstøðug kommuna. Soleiðis hildu kommunurnar áfram við at vaksa í tali.

Bert eina ferð segði løgtingið nei til frábýti. Hetta var tá Dímun vildi vera egið sókn í kommunalari merking. Johan Djurhuus skrivar at „Løgtingið noktaði, tí um so varð skuldu teir hava sóknarnevnd, skúlanevnd og valnevnd, og var tað ikki hildið møguligt at manna

14 Sí brot úr áliti frá løgtingsnevndini sum viðgjørdi málið (her endurgivið úr Høgenni 1992:39): „at udvalget ikke kan skønne, at en gavnlig kommunal udvikling kan finde sted, medmindre at præstegjældenes økonomiske anliggender bestyres sognevis, idet f.eks. oprettelsen af en skole på grund af bygdernes fjerne beliggenhed fra hinanden i regelen kun har betydning for den bygd, hvori skolen oprettes, hvilket endmere gælder med hensyn til de rent stedlige indretninger; forbedringer af gader og landingssteder m.v., hvortil trangen i de forskellige bygder, ligesom de dertil fornødne udgifter ville kunne være overordentlige varierende; disse ere nemlig i så udesluttende grad i vedkommende steds særlige interesse, at en udover sognet gående fordeling af udgifterne vel næppe kan anses for billig, og i ethvert fald ville virke hæmmende."

15 Høgenni 1992, s. 45.

hesar nevndir."[16] Seinasta býtið var í 1967 við býtinum í Runavíkar og Nes kommunu. Við hesum býti vórðu 51 kommunur í Føroyum. Tá var rákið longu skift, tí í 1966 gav løgtingið landsstýrinum heimild at seta nevnd at kanna kommunulóggávuna og møguleikarnar fyri at leggja kommunur saman.[17] Nýggj lóg kom í 1972.

## 2.3 Samanlegging av kommunum

Kommunulógin frá 1872 varð lítið broytt tey 100 árini hon var í gildi. Í lógini æt stovnurin fyri kommunala sjálvsstýrinum óbroytt øll árini *forstanderskab*. Sum Djurhuus vísir á var vanliga heitið millum manna fyrst *sóknarstýri* og síðani kommunustýri. „Navnabroytingin er ikki bert ein málslig broyting, men ein broyting, ið lýsir, hvat hent er í kommunala sundirbýtinum av landinum, at kommunurnar frá at vera prestagjaldskommunur, sum tíðin gekk, eru býttar í sóknakommunur og eisini smærri." [18]

Nýggja lógin frá 1972 kom við nýggjum heitum: Býráð og bygdaráð. Her er eisini ein kommunupolitisk hugburðsbroyting: „Ein av mununum millum tær báðar lógirnar er, at meðan hin eldra sigur, hvussu fram skal farast, tá ið kommuna skal býtast, men einki sigur um samanlegging av kommunum, so er øvugt við tí nýggju lógini, hon hevur bert reglur um samanlegging."[19]

Kommunutalið fór at minka, men seint gekk í fyrstuni. Í 1977 valdi kommunan fyri Kaldbak og Sund at leggja saman við Tórshavnar kommunu, og árið eftir fór Hoyvík úr Tórshavnar uttanbýggja kommunu og upp í Tórshavnar kommunu. So kom stígur í; men í 1996-97 hvarv Tórshavnar uttanbíggja kommuna, tá Argir, Syðradalur og Norðadalur løgdu saman við Tórshavnar kommunu. Í 2001 fór eisini Kollafjørður upp í Tórshavnar kommunu. Til seinasta kommunuval, í 2004, minkaði talið á kommunum frá 48 til 34. (Talvur 4,5 og 6 aftast í bókini vísa, hvørjar kommunur sum

16 Djurhuus 1974, s.136.
17 Ibid. s. 134.
18 Ibid. s. 129.
19 Ibid. s. 130.

hvurvu tá). Ætlanin er, sum nevnt í 1. kapitli, at talið skal verða 7 í næstu framtíð.

Mynd 2.1 á næstu síðu vísir broytingarnar frá støðuni frá 1967 til 1976, tá talið var 51 kommunur, til støðuna 2005-08 við 34 kommunum, og myndilin fyri nýggju kommunuskipanini við sjey kommunum.

Arbeiðið við at broyta kommunuskipanina tók dik á seg fyri umleið 10 árum síðan. Ferð var sett á við „Grøna álitinum' frá 1998 og nýggju kommunulógina í 2000 (sí kap. 3 og 4). Síðan 1999 hevur verið skipað fyri fleiri fólkaatkvøðum um kommunusamanleggingar. Hesar vegleiðandi fólkaatkvøður eru sjálvbodnar, og kommunurnar gera sjálvar av hvussu atkvøðurnar verða skipaðar. Áhugavert er at samanbera við Ísland. Har verða tílíkar atkvøður altíð skipaðar í báðum kommunum.[20] Í Føroyum ráða kommunurnar sjálvar fyri um fólkið í báðum ella bara í aðrari kommununi skal luttaka í fólkaatkvøðuni. Spurningar um grannakommunur skulu inn í Tórshavnar kommunu hava ikki verið til atkvøðu millum havnafólk, men bert í teimum kommunum, sum ikki longur fara at vera egin kommuna. Í øðrum førum, tá talan hevur verið um meira javnlíkar kommunur, hevur fólkaatkvøða verið skipað í báðum kommunum. T.d. vóru atkvøðugreiðslur bæði í Runavík og á Skála í 2001, men bert í Oyndafirði í 2003. Bæði Skála og Oyndafjørður eru nú partar av Runavíkar kommunu. Einaferð var úrslitið av fólkaatkvøðu meiriluti ímóti samanlegging. Á fólkaatkvøðuni í mai 2003 søgdu seks kommunur ja til at leggja saman til eina Sunda kommunu – men í Hósvík søgdu tey nei. Tá varð tað skipað fyri nýggjari atkvøðu í Hósvík fýra mánaðar seinni, og hon endaði við 88 atkvøðum fyri samanlegging, 83 ímóti.[21] Eina aðru ferð varð tað skipað fyri tveimum atkvøðum sama mánaða í einari kommunu: Í nov. 2003 segði Oyndafjørður fyrst nei til at vera partur av Fuglafjarðar

20 Eythórsson, Gretar (2005) „Folkets attityder till kommunsammenslagningar. Tidigare forskning och nya empiriska exempel från Eyjafjörður regionen." NOPSA 11.-13. august 2005, Reykjavík.

21 Holm, Dennis og Bjarni Mortensen: *Kommunusamanlegging – Hvat siga suðringar?* Arbeiðsrit nr 7/2004, Granskingardepilin fyri økismenning, s. 6.







kommuna, síðan ja til at vera partur av Runavíkar kommunu.[22] Hesi bæði dømini avspegla ágrýtni hjá summum at fáa størri kommunur, og ivasemi hjá øðrum um tað er rætt at avtaka sítt bygdaráð.

## 2.4 Kommunusamanleggingar og samfelagsbroytingar

Tað er helst ov einfalt at lýsa núverandi kommunusamanleggingar-rák sum bert eitt úrslit av hugsjónarligum rákum úr USA og Danmark, ella sum ein avleiðing av at øll hini Norðurlondini

22 Ibid, s. 7.




**Mynd 2.1: Samanlegging av kommunum**
*Myndin vísir broytingarnar frá støðuni frá 1967 til 1976, tá talið var 51 kommunur, til støðuna 2005-08 við 34 kommunum, og myndilin fyri nýggju kommunuskipanini við sjey kommunum.*

royna at minka um talið á kommunum. Rákið er ivaleyst eisini ein avleiðing av stóru samfelagsbroytingunum í føroyska samfelagnum seinasta mansaldur. Búsetingarmynstrið er broytt, samferðslan er styrkt, fólkið væntar í størri mun enn fyrr at fáa hjálp frá tí almenna, og førleikin í landsfyrisitingini er øktur munandi.

Umleið 85 % av fólkinum býr nú í einum miðstaðarøki, og hjá teimum tekur tað minni enn fimm korter at flyta seg úr einum enda í hin. Her eru vegasambond, berghol og brýr millum oyggjar og bygdir. Restin, 15 % av fólkinum, býr í einum útjaðara í mun til *meginlandið*, sum summi eru farin at nevna miðstaðarøkið.

Samferðslan er kollvelt. Í 1960unum var framvegis vanligt at ferðast við báti ella at ganga millum bygdir. So kom bilferðslan av álvara: Í 1963 var Hvalbiartunnilin liðugur sum tann fyrsti av mongum, í 1964 fekk Havnin vegasamband til bygdir norðanfyri, og í 1974 kom brúgvin um Sundalagið og samband millum tær báðu størstu oyggjarnar.

Bygdirnar hava frá gamlari tíð verið ein bú- og arbeiðsfelagsskapur. Hetta er í broyting. Gott vegasamband ger at til ber, og serliga hjá teimum, sum búgva í miðstaðarøkinum, at búgva í einari kommunu og arbeiða í einari aðrari. Sum Finnson og Kristiansen taka til: „At liva á bygd er nú á døgum meiri at meta sum ein lívsstílur enn sum ein lagna“.[23] Tað kann hugsast at hesar broytingar ávirka hugburðin hjá summum til sína heimakommunu. Tað eru óivað summi sum ikki leggja so stóran dent á tað lokala sjálvstýrið, men heldur meta tað sum ein fyrimun at búgva í einari stórari kommunu. Havnar kommuna er kanska vorðin ein fyrimynd? Hon hevur tíðum havt størri orku, bæði fíggjarliga og fyrisitingarliga, at loysa almennar uppgávur enn tað, sum tær minnu kommunurnar hava megnað í samstarvi við landið.

Hin vegin eru øki í landinum uttan vegasamband við miðstaðarøkið. Her er fráflyting heldur enn tilflyting, og gamla bygdamentanin tykist enn at vera sterk har.[24] Onkur heldur at við eini postmodernaðari mentan í miðstaðarøkinum kunnu tær sosioøkonomisku og mentanarligu gjáirnar millum sentrum og periferi dýpast.[25]

At tað ikki longur bara eru menn í løntu arbeiðsmegini hevur havt stórar avleiðingar fyri samfelagið. Í 1960 høvdu bert 12 % av giftum kvinnum arbeiði uttan fyri heimið, í 1970 var luturin 41 %, og í dag eru næstan allar kvinnur í vinnuførum aldri í arbeiði uttan fyri heimið, eisini tær, sum hava børn ella onnur í familjuni, sum krevja umsorgan. Hetta hevur borið við sær ein øgiligan vøkstur í

---

23 Finnson, Bergmann og Sámal Matras Kristiansen (2006): *Bygdin – fyrr, nú og í framtíðini.* Granskingardepilin fyri økismenning. www.region.fo, s. 25.

24 Sí lýsingar av gomlu føroysku bygdamentanini hjá m.ø. Heðini Brú. Eyðun Andreasen lýsir eisini bygdamentan í nýggjari tíð í *Folkelig offentlighed: en undersøgelse af kulturelle former på Færøerne i 100 år.* København, Museum Tusculanum, 1992.

25 Sí samrøðu við Sámal Matras Kristiansen í Dimmalætting 2. mars 2007.

almennum í vælferðarstovnum, serliga innan barnagarðar og eldrarøkt.[26] Tað eru partvís kommunurnar og partvís landið, sum byggja og reka slíkar stovnar. Vónin hjá teimum, ið hava gjørt uppskotini til broytingar í kommunuskipanini, er m.a. at tað við sjey kommunum fer at verða lættari at fáa eitt greitt uppgávubýti millum land og kommunur, og at tað við tíðini fer at gera tað einfaldari at stýra útbygging og rakstur av almennum tænastum.

Fyri at skilja tilgongdina í kommunala økinum er vert at líta at enn einari stórari broyting seinastu árini: menningini av landsfyrisitingini. Eitt mát fyri hesa menning er talið á starvsfólki í meginfyrisitingini: í 1997 vóru tey 60 fólk, í 2007 150 fólk.[27]

Síðan heimastýrið kom í 1948 hava kommunumál verið undir føroyskum myndugleika. Men landsfyrisitingin var sera fáment fyrstu árini, og avmarkað var hvørjar grundleggjandi broytingar hon kundi seta í verk. Í 1970unum byrjaði landið at yvirtaka fyrisitingina av málsøkjum, og í 1988 kom skipanin við blokkstuðuli. Hetta kravdi fleiri fólk í umsitingina. Umsitingin fór av álvara at vaksa tá nýggja stýrisskipanin kom í 1994. Landsstýrið skuldi ikki longur vera skipað eftir myndli fyri kollegium, men fyri ministararáði. Hvør landsstýrismaður fekk ábyrgd á sínum málsøki.[28] Landsfyrisitingin varð umskipað og styrkt.

Tað er lítið at ivast í, at menningin av kommunudeildini í landsfyrisitingini er ein meginorsøk til at kommunurnar nú leggja

---

26 Sambært Hagstovu Føroya vaks talið á starvsfólki innan tað almenna úr knøppum 6.500 í 1997 til fleiri enn 8.500 í 2007. Í hesum tíðarskeiði kom 85 % av vøkstrinum frá kvinnum; tær vóru 4.200 í 1997, og 6000 í 2007. Hesin vøkstur avspeglar menningina í almennum vælferðarstovnum.

27 Sambært Marjun Hanussardóttir, løgmansstjóra, juli 2007.

28 *Løgtingslóg nr 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya / om Færøernes styrelsesordning* § 33. Løgmaður býtir málsøki landsstýrisins millum landsstýrismenninar. Teir sita fyri málsøkjum sínum hvør sær.

*Stk. 2.* Løgmaður samskipar starv landsstýrismanna og boðar í hesum sambandi regluliga til landsstýrisfunda, har m.a. øll uppskot landsstýrisins til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og eykajáttanir verða framløgd áðrenn tey verða løgd fyri løgtingið.

*Stk. 3.* Løgmaður hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt.

saman. Her munnu vera teir mest eldhugaðu fyri einari nýggjari kommunuskipan við færri kommunum. Kreppan setti ferð á nýggju ætlanirnar fyri kommunurnar, tí 'bygdapolitikkur' var hildin at vera ein orsøk til kreppuna. Landið ynskti størri tamarhald á búskapinum í kommununum. Í 1993 kom lóg ið avmarkaði kommunala frælsið til lántøku og íløgur. Í 1996 setti landsstýrið eina nevnd at endurskoða uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur, og at geva tilmæli um hóskandi tal og støðd á kommunum, og um møguligar serskipanir fyri tey smáu bygdasamfeløgini. Eingin politikkari kom at sita í hesi nevnd. Úrslitið varð eitt álit í trimum bindum, sum gjølla greiðir frá støðuni í kommununum, landafrøðiliga, búskaparliga, fyrisitingarliga o.s.fr. Kommununevndin legði eisini fram uppskot til nýggja kommunustýrislóg og hvussu broytingarnar kundu setast í verk. Løgtingið samtykti nýggja kommunustýrislóg í 2000 (sí kap. 3 og 4).

## 2.5 Myndlar fyri skipan av kommunum

Kjakið um kommunusamanleggingar fær sín serliga dám av nýggjum ætlanum um hvat kommunurnar skulu hava ábyrgd av í framtíðini. Hóast fólkatalið er nógva ferðir minni,[29] verður tað hildið at vera sjálvsagt at (nøkulunda) sama ábyrgdarbýti er millum land og kommunur í Føroyum sum millum stat og kommunur í skandinavisku londunum. Hetta merkir at kommunurnar m.a. skulu hava ábyrgd av lógarásettum vælferðartænastum. Millum tey yrkislærdu mæltu summi ímóti at barnaverndin varð miðspjadd. Summi yrkislærd mæla nú móti at ábyrgdin av fólkaskúlunum verður løgd til kommurnar. Samanumtikið kann kortini ikki sigast, at tað hevur verið stórvegis alment kjak um tann stýringsbroytingarpolitikk, sum landsstýrið og landsfyrisitingin

29 Føroyar høvdu 1.1.2007 48.350 íbúgvar. Í fimm av teimum 34 kommununum búðu færri enn 100 íbúgvar, 13 kommunur høvdu færri enn 500 íbúgvar, og 21, ella 2/3 av kommununum, høvdu færri enn 1000 íbúgvar. Til samanberingar kunnu vit hyggja til Danmarkar. Har høvdu 2/3 av kommununum í 1999 millum 5.000 og 15.000 íbúgvar. Seytjan danskar kommunur høvdu tá fleiri enn 50.000 íbúgvar (Kjær og Mouritzen 2003).

nú førir; hvaðna minni kjak hevur verið um øðrvísi hættir at skipa uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur.[30]

Sum vit fara at síggja í 6. og 7. kapitli, tykist áhugin fyri at vera vald(ur) í býráð og bygdaráð at vera stórur millum fólk – størri í Føroyum enn flestu grannalondunum. Ein orsøk kann vera at føroyskar kommunur hava havt fáar lógarbundnar uppgávur, og tí hava kommunurnar kunna valt at seta í verk tiltøk út frá lokalum ynskjum. Skattaprosentið verður sett lokalt (nú innan fyri ávís mørk), og higartil hevur eingin skattainntøku-útjavningarskipan verið millum kommurnar. Tí hava bý- og bygdaráðslimirnir havt rættuliga góða hóming av hvat kommunan hevur at ráða yvir.[31] Báta- og svimjihylar og bygdavegir eru dømi um íleggingar, sum í lítlan mun hava verið merktar av uppíblanding frá landinum. Bygging av barnagarði, eldrasambýlum o.l. hevur verið sett í gongd í kommununum, og so hevur raksturin verið býttur millum land, kommunur og brúkarar.

Tær føroysku kommunurnar hava víst kreativitet og fleksibilitet tá tað snýr seg um mátar at skipa virksemi, har ein einstøk kommuna ikki einsamøll megnar at loysa uppgávurnar. Hansen og Heløe[32] vísa á fýra ymiskar myndlar, sum hvør á sín hátt umboða ein máta at skipa fyri almennum vælferðarstovnum. Hyggja vit eftir hvussu føroyskar kommunur hava skipað sítt virksemi, eru dømi um royndir við øllum fýra myndlum:

Grundeindin er *basiskommunan* ella 'tann autonoma minimumskommunan', sum er grundað á regluna um lokalan sjálvsavgerðarrætt. Tær smáu føroysku kommunurnar hava klárað seg, m.a. tí tær tungu

---

30 Sambært Holm, Dennis og Bjarni Mortensen (2002) *Kommunalt samstarv – ein onnur loysn enn kommunusamanlegging?* Arbeiðsrit nr. 1/2002). Granskingardepilin fyri Økismenning.

31 Sambært Michel Crozier er tað at hava vald, at ein sjálvur, men ikki hini, vita, hvussu leikur fer fram. Misnøgdin hjá kommununum um ætlanir hjá landinum at seta í verk eina kommunala útjavningarskipan kann møguliga metast við hesum sum grundstøði. Fyri at kommunurnar ikki skulu halda seg vera komnar í eina avmaktsstøðu, er opinleiki um ta búskaparligu stýringina umráðandi í viðurskiftunum millum land og kommunur.

32 Hansen, Tore og Leif Arne Heløe (2004) „Ny kommunestruktur eller ny kommunalreform?“ í *Nordisk Administrativt Tidsskrift 4/2004*

vælferðaruppgávurnar verða røktar á hægri støði í fyrisitingini; fyrr var tað ríkið, nú er tað landið sum tekur sær av hesum uppgávum.

Viðhvørt verður ein annar myndil brúktur, nevndur *serkommunur.* Tá verða serliga tungar uppgávur fluttar úr kommununi til ein stovn, sum hevur serførleika til at umsita júst hetta málsøkið. Eitt dømi, har smáar kommunur eru slopnar frá uppgávum, sum so hava verið lagdar til landsfyrisitingina, er barnaverndin. Hon var fram til 2005 skipað eftir tveimum ymiskum myndlum. Bert tær stóru kommunurnar høvdu førleika og orku at loysa hesar uppgávur einsamallar (sum basiskommuna). Í hinum kommununum fingu tey Almannastovuna til at hjálpa sær (sum so virkaði sum eitt slag av serkommunu).

Barnaverndarlógin frá 2005 setur krøv um samstarv millum tær smáu kommunurnar um felags barnaverndarnevnd og um eina felags umsiting sum kann viðgera slík mál. Talið av íbúgvum í hesum (ser)kommunum má í minsta lagi vera 1500. Hetta er eitt dømi um triðja kommunumyndilin hjá Hansen og Heløe, nevniliga *samstarvskommunan*. Nýggja barnaverndarlógin er dømi um tvungið samstarv, men tað eru eisini fleiri dømi um sjálvboðið samstarv millum kommunur. SEV er eitt dømi um landsumfatandi kommunalt samstarv, og IRF fevnir um allar kommunur uttan Havnina. Næstan allar kommunur luttaka eisini í øðrum formligum interkommunalum samstarvi, t.d. um skúla, sløkkilið ella eldrarøkt. Miðvágur og Sandavágur bygdu í 1961 felags skúla á Giljanesi, sum er á markinum millum hesar báðar kommunurnar. Í Vágunum hevur nú í mong ár verið skipað samstarv millum allar kommunurnar (í sonevndu *felagskommununi*); hetta samstarv kom av fyrstan tíð í lag sum samarbeiði um barnavernd, tí tað er so skjótt, at fólk í *basiskommununi* verða ógegnug í slíkum málum. Kommunurnar við Sundalagið er eitt annað øki við longum royndum við interkommunalum samstarvi um fleiri málsøki. Hesar kommunur bygdu upp eina felags fyrisiting, tí tað hevði verið ov dýrt hjá teimum smáu kommununum hvør sær at seta fólk við fyrisitingarligum og tekniskum serkunnleika.[33] I 2003 valdu kommunurnar í

33 Holm 2002, op.cit.

hesi samvinnu at leggja saman til eina kommunu, Sunda kommunu. Eisini Skálafjarðakommunurnar samstarva; tær hava felags brunaverju. Í Suðuroy hava fýra kommunur gjørt samstarvsavtalu um felags almannafyrisiting.

Fjórða kommunumyndilin hava Heløe og Hansen givið heitið *tann víðkaða vælferðarkommunan.* Henda kommuna er fyrst og fremst tænastuveitari, og minni dentur verður lagdur á lokalt fólkaræði og lokalt sjálvstýri. Kravt verður av hesum slagi av kommunu, at hon skal vera før fyri at veita vælferðtænastur av ymiskum slag, sum bæði eru dygdargóðar og víðfevndar. Fyri at kunna ganga hesum stóru krøvum á møti kenna kommunurnar seg ofta noyddar til at leggja saman við øðrum. Soleiðis verða kommunurnar størri.

Fellman og Lindstrøm[34] hava í einum áliti, skrivað í samband við kjak um møguliga at broyta verandi kommunuskipan í Álandi, brúkt teir fýra myndlarnar hjá Heløe og Hansen til at lýsa hvussu Norðurlond hava skipað sínar kommunur. Í kanningini hjá Fellman og Lindström eru tær føroysku, íslendsku og norsku kommunurnar flokkaðar sum *basiskommunur.* Sum nevnt er basiskommunan fyrst og fremst ein karmur fyri nærsamfelagið, hon er ein lokalpolitiskur felagsskapur og heldur fast um samleika. Basiskommunan er stórt sæð sloppin undan teimum mest krevjandi vælferðaruppgávunum, og tí hevur tað borið til við so smáum eindum. Ein orsøk til mótstøðu í Noregi, Íslandi og Føroyum móti at leggja kommunur saman er helst, at í hesum londum hevur lokali samleikin verið so sterkur. Royndir úr Íslandi benda tó á, at tá kommununum verða álagdar nýggjar uppgávur og størri enn tær megna einsamallar, verður hildið frægast at leggja saman við aðrar.[35] Samanlagdar kommunur verða tá meira at meta sum *víðkaðar vælferðarkommunur*, sum Fellman og Lindström rokna tær donsku og svensku kommunurnar at vera.

Álendskar kommunur hava Fellman og Lindström sett í básin

---

34 Fellman, Katarina og Bjarne Lindström (2006) „Kommunstrukturen i det övriga Norden – reformer og debatt, i *Kommunreform i Åland? En förstudie.* Åsub Rapport 2006:5

35 Reynisson, Reinhard (2008) „Sameining sveitarfélaga – nýir tímar kalla á nýjar aðferðir", í Sigurðardóttir, Turið og Magnús Snædal (ritstj.) *Frændafundur 6.* Fróðskapur.

*samstarvskommunur.* Eisini føroyskar kommunur kundu verið settar í henda bás. Hetta er sum nevnt ein myndil har kommunurnar fáa ábyrgd av stórum uppgávum, men tær vera verandi smáar tí tær skipa seg í interkommunalar felagsskapir. Hesar eindir megna tá at veita íbúgvunum góðar tænastur.

*Serkommunan* er ein myndil har tað ikki verða sett krøv um generalitet, t.v.s. at allar kommunur skulu hava somu skipan. Í serkommunumyndlinum verður skipanin í teimum ymisku kommununum lagað eftir m.a. stødd og landafrøði. Eftir hesum myndlinum kann ein stór kommuna, sum t.d. Tórshavnar kommuna, virka sum ein víðkað vælferðarkommuna; aðrar kommunur kunnu virka eftir samstarvsmyndlinum, og uppaftur aðrar sum basiskommunur. Reglugerðir, ábyrgd, uppgávur og samstarvshættir eru v.ø.o. ikki eins fyri allar kommunur í landinum.

Ætlandi vera skjótt bert sjey kommunur í Føroyum. Óivað fara eisini hesar sjey 'stóru' kommunurnar at brúka ymiskar samstarvshættir tá tær skulu seta politiskar viðtøkur í verk. Tað kunnu vera samstarvshættir ið eyðkenna samstarvskommunur og serkommunur. Óivað verður alt roynt at fáa tiltøkini at virka væl – uttan mun til um tað er landið ella kommunurnar sjálvar, sum hava tikið politisku avgerðirnar um hesi mál. Tað er kanska meira óvist hvussu tey serligu fólkaræðisligu virðini, sum tær 51 basiskommunurnar umboðaðu, fara at verða vard í framtíðini.

## 2.6 Kommunan sum lokalpolitiskur felagsskapur og fyrisitingarlig eind

Kommunan sum stovnur skal fata um ymiskar funktiónir. A) Hon skal fyri tað fyrsta vera ein stovnur har fólkið í nærumhvørvinum kunnu loysa síni vandamál og sínar trætur. B) Kommunan má eisini hava umboð, sum kunnu virka sum talsmenn fyri íbúgvararnar, tá politiskar avgerðir verða tiknar á løgtingi ella øðrum yvirskipaðum stovnum. C) Fyri tað triðja er kommunan ein fyrisitingarligur stovnur sum skal seta politiskar avgerðir í verk; summi av hesum málum eru slík, sum kommunustýrið sjálvt er komið fram til, eiga at verða sett í verk. D) Onnur mál eru sum verða loyst saman við

landsfyrisitingini. Í summum førum er tað kommunan sum má taka stig til at fáa landið at hjálpa til við einum tiltaki. Í øðrum førum er tað landið, ið áleggur kommununi at loysa uppgávur. Mynd 2.2 vísir at tað eru sera ymiskar uppgávur sum kommunan skal loysa:

**Mynd 2.2 Ymiskar funktiónir hjá kommunustovnum**

| | Kommunan sum politiskur felagsskapur | Kommunan sum fyrisitingarlig eind |
|---|---|---|
| Mál, ið bara viðvíkja tí einstøku kommununi | A | C |
| Mál, ið verða loyst í samstarvi millum land og kommunu(r) | B | D |

Í Føroyum hevur verið roynt at fáa samsvar millum hesar ymisku funktiónir, síðan nútímans fólkaræðið varð stovnsett í seinnu helvt av 19. øld. Ta fyrstu øldina við kommunustýrum skuldu kommunupolitikararnir serliga taka støðu til mál, sum bert viðvíktu tí einstaka lokalsamfelagnum (A + C). Tað vóru sjálvandi uppgávur sum allar kommunur vórðu álagdar at loysa, t.d. at byggja skúlar (D). Men so avbyrgdar sum bygdirnar vóru fyrr, bar tað ofta illa til at gera hetta til felags verkætlanir fyri allar bygdir í kommununi. Talið á kommunum vaks, tí at bygdir í kommununum ikki hildu seg hava nóg nógv felags áhugamál við hinar bygdirnar. Felags áhugamálini vóru í hvussu er ikki nóg nógv ella stór at grundarlag var fyri at vera saman í einari kommunu. Tann lokalpolitiski samleikin lá til heimbygdina og ikki til prestagjaldið. Hesin samleiki til bygdina var, og er kanska framvegis, sera sterkur. Summi hava mett bandið til bygdina at vera sterkari enn tilknýtið til landið og samleikan sum føroyingar.[36] Bygdir hava slitið seg frá kommunum og stovnað sína

36 Sí t.d. Joensen, Jóan Pauli „Eplatallerkar og felags politisk mentan", *Sosialurin 8.3.2003* .

egnu kommunu tá dýrar verkætlanir eru settar í gongd, sum øll í kommununi skuldu fíggja – eisini tey, ið búðu har tey einki mettu seg at fáa burtur úr sjálvi.[37]

Summi halda eisini at samanseting løgtingsins hevur avmyndað lokalu áhugamálini meira enn heildarætlanir fyri allar Føroyar.[38] Hetta var høvuðsgrundgevingin fyri at Føroyar vórðu eitt valdømi, fyrstu ferð til valið í januar 2008. Nýggja valskipanin skuldi byrgja fyri 'bygdapolitikki' í løgtinginum. Vísandi til mynd 2.2., bás B, ber tað eisini til at venda hesum við: Sum ein av uppgávum hjá løgtingslimum kann roknast at vera umboð fyri teirra kommunu og forsprákari fyri teirra nærumhvørvi. Hetta geldur bæði tá talan er um mál ið serliga viðvíkja heimkommununi, og tá talan er um kapping við onnur øki um at fáa virksemi til kommununa. Bæði sæð frá kommununi og sæð frá landinum er tætt band og samstarv millum land og kommunu ein styrki. Tað er eisini breið semja um framhaldandi búseting um allar Føroyar. Hetta politiska málið krevur at tað eru støðug arbeiðspláss eisini uttan fyri Havnina. Ein av leiklutunum hjá kommununum í tí føroysku stýringsskipanini er at vaka yvir hesum máli.[39]

Hvussu sampakkar hetta so við ætlanirnar um at minka talið á kommunum niður í sjey? Fleiri av teimum fyrrverandi útjaðarakommununum hava merkt at tað eru gjørdar íløgur í bygdini aftaná samanleggingina, og talan er eisini um íløgur sum ein lítil kommuna valla hevði megnað. Hin vegin er eisini hugsandi at hugsjónin um framhaldandi búseting í øllum bygdum sum frá líður fer at verða slept, og at tað í staðin verður miðað ímóti at styrkja størsta býin ella ta mest býarkendu bygdina í kommununi. Í hvussu er tykist ikki longur vera hildið neyðugt at hava skúla í øllum bygdum. Ein miðsavnan í kommununum av øðrum almennum stovnum fer eisini

37 Wang, Zakarias (1988) *Stjórnmálafrøði*. Forlagið Stiðin.
38 Sørensen, P.B. (1992) *Vælgeradfærd på Færøerne*. Århus Universitet.
39 Hovgaard, Gestur, Gretar Eyþórsson og Katarina Fellman *Future Challenges to Small Municipalities. The Cases of Iceland, Faroe Islands and Åland Islands.* Stockholm. Nordregio 2004.

í ein vissan mun fram, og plássið har miðsavnað verður til, fær tá støðug arbeiðspláss.

Krøv um at fáa fleiri almennar vælferðastovnar eru nær tengd at spurninginum um arbeiðspláss. Stovnarnir krevja nógv starvsfólk. Samstundis ber tað til hjá fleiri kvinnum at arbeiða úti, tá tað eru barnagarðar og røktarheim í nærumhvørvinum. Um allar Føroyar koma nú krøv um at fáa eins lætta atgongd sum í hinum Norðurlondum til stovnar ið veita heilsuhjálp og umsorgartænastur.[40] Av tí at løgtingið og landsfyrisitingin bæði fakliga og fíggjarliga hava stuðlað lokalum framtøkum, hevur tað borið til at seta kommunalar vælferðarskipanir á stovn.

Seinastu árini hava landsfyrisitingin og landsstýrini sæð tað sum eina avbjóðing at broyta kommunuskipanina soleiðis at kommunurnar betri verða førar fyri at veita almennar tænastuveitingar. Sum nevnt er talið av starvsfólki í landsumsitingini vaksið sera nógv seinastu árini, og nú verður eisini roynt at styrkja og menna fyrisitingina í kommununum. Men um hugsað verður um at landið hevur færri enn 50.000 íbúgvar, er ikki vist at besta loysnin er at flyta ábyrgdina av tænastum, sum øll hava rættindi til sambært lóg, frá landinum og til kommunurnar at umsita.

Føroyskur kommunupolitikkur hevur verið stuttligur at luttikið í, millum annað tí at kommunurnar hava havt fáar lógfestar uppgávur. Tí hevur borið til hjá bý- og bygdaráðum at seta í verk tiltøk, sum tey sjálvi hava raðfest ovarlaga (básur A og C í mynd 2.2). Í framtíðini kann kommunupolitikkur gerast minni hugaligur. Um nøkur fá ár verða væntandi bert sjey kommunur. Tær skulu eftir ætlan megna at taka stór tøk. Sum Ingibjørg Berg fer at vísa í 3. kapitli, kunnu tær bygnaðarbroytingarnar sum nú verða settar í verk, bera við sær at kommunurnar fáa fleiri lógarbundnar uppgávur og tískil minni lokalt ræði á inntøkum og útreiðslum. Um kommunurnar framyvir fáa ábyrgd av at veita fólki tænastur, sum løgtingið hevur samtykt

---

40 Joensen, Petra J. (2007) „En belysning af det sociale område på Færøerne og dets udvikling samt en sammenligning med forholdene i de øvrige nordiske landene.“ *Velferdsforskningsprogrammet, Nordisk Ministerråd: Forskning indenfor social-, sundheds- og arbejdsmarkedsforhold i Vestnorden.* Tórshavn.

at tey hava rættindi til, mugu kommunupolitikarnir fyrst finna fígging til tær bundnu uppgávurnar. So má tað koma í aðru røð, sum kommunan sjálv hevur hug at seta í verk.

Til ber at samanbera við gongdina í øðrum londum, har kommunurnar hava fingið slíkar uppgávur. Í Noregi vóru royndirnar at sum frá leið gjørdist meginuppgávan hjá kommununum at umsita og samskipa landspolitikk lokalt (básur D í mynd 2.2). Hesar uppgávur eru vorðnar so kravmiklar at lítið og einki rásarúm er eftir hjá kommunupolitikarunum til mál, ið tey sjálvi ynskja at seta á politisku dagsskránna.[41] Seinastu árini eru tó nøkur málsøki flutt frá tí lokalu til ta sentralu fyrisitingina at umsita. Eitt eyðsýnt dømi er sjúkrahúsverkið, sum varð umsitið av fylkiskommununum fram til 2002, men sum staturin nú hevur fulla ábyrgd av. Anne Lise Fimreite væntar at henda gongdin fer at halda fram, og at hetta fer at gagna kommununi sum politiskur stovnur:[42]

> Om (eller når) staten overtar ansvaret for oppgaver av „nasjonal karakter", vil kommunen bli avlastet de oppgaver der handlingsrommet er fraværende, og vil i stedet kunne konsentrere seg om det man lokalt kan bli enig om er „genuint lokale saker". Dette vil være saker der lokalpolitikk, og dermed lokal deltakelse, fortsatt har innvirkning på de veivalg som fattes.

Ilt er at spáa, serliga um framtíðina. Í føroysku skipanini verður roynt at varða av lokala fólkaræðinum á smáplássum: Fyri útoyggjarnar er serligur felagsskapur sum skal menna hesi samfeløg. Kommunustýrislógin gevur annars kommunum, sum velja sjálvstøðuna frá, møguleikan at skipa staðbundna nevnd (sum Bjørg Jacobsen viðger í 5. kapitli).

Ein av teimum stóru óloystu skipanarbygnaðarligu trupulleikunum í dag er Tórshavnar kommunu. Kommunan hevur skipanir við staðbundnum nevndum í fyrrverandi sjálvstøðugum kommunum, men

41 Fimreite, Anne Lise „Velferdsstat og lokaldemokrati – uforenelige størrelser?" í *Norsk Statsvitenskapelig Tidsskrift 3/2003.*

42 Fimreite, op.cit. s 354.

onga umboðanarskipan fyri býlingar í Havn, sum í dag eru sum stórar bygdir. Tórshavnar kommuna er vorðin stór, landafrøðiliga og í fólkatali. Frástøðan millum tey í býráðnum og veljararnar tykist at vaksa. Hetta eru spurningar sum vit fara at lýsa í 6. og 7. kapitli.

Kommunuskipanin við umleið sjey kommunum verður óivað veruleiki um fá ár, men arbeiðið við at finna ta góðu loysnina, fólkaræðisliga og fyrisitingarliga, er neyvan fullfíggjað við hesum.

# 3

# Kommunala sjálvræðið í eini broytingartíð

*Ingibjørg Berg:*

## 3.1 Innleiðsla

Kommunurnar í Føroyum hava rættiliga frítt at raðfesta millum uppgávur – og kanska serliga frítt at avgera, *hvussu* tær loysa uppgávur. Nøkur fá undantøk eru t.d. á barnaverndar-, dagstovna- og heilsuøkinum, har ásett er í lóg, hvørji rættindi borgarar hava til ávísar tænastur frá kommununum, ella hvussu umsiting av økinum skal skipast. Men hetta at lógarfesta, hvussu kommunurnar skulu útinna uppgávur, er enn ikki serliga vanligt í Føroyum.

Seinastu árini hevur almenna viðgerðin av leiklutinum hjá kommununum serliga verið um leiklutin at framleiða vælferðatænastur. Viðgerðin hevur fyri tað mesta snúð seg um at skapa størri eindir, sum kunnu átaka sær fleiri uppgávur. Grundhugsanin tykist at vera, at fleiri vælferðauppgávur, sum landið í dag varðar av, høvdu verðið betur røktar nærri borgarunum, t.v.s. av kommununum.

Umrøðan, sum verið hevur í Føroyum um hesi viðurskifti[1], tykist eisini at vera grundað á eina fatan av, at sjálvvirkandi samband er ímillum hetta at kommunurnar fáa fleiri øki at umsita, og at lokala sjálvræðið verður størri.

Kanningar í grannalondunum vísa hinvegin, at fleiri ymisk viðurskifti ávirka sambandið millum nøgdina av uppgávum at umsita og

1 Hetta kapitlið tekur støði í almennu viðgerðini, sum er at finna í tilfari frá almennu myndugleikunum. Eg havi ikki tikið við hoyringsskriv frá áhugabólkum, viðmerkingar í fjølmiðlunum, lesarabrøv o.t.. Gjørdi eg tað, hevði eg uttan iva funnið onnur sjónarmið eisini.

lokala sjálvræðið[2]. Í fleiri londum uppliva vit t.d. í alt størri mun samanrennandi áhugamál hjá borgarum og landi um at lógarfesta rættin til vælferðatænastur av ávísum slag og ávísari dygd frá kommununum. Hetta bæði ávirkar møguleikan hjá kommununum at framleiða tænastur, sum tær sjálvar ynskja, og kemur í staðin fyri tað, sum áður var ein spurningur um, at lokali myndugleikin sjálvur metti um tørvin og lagaði veitingar innihaldsliga til einstaka økið. Hetta ávirkar eisini fíggjarliga rásarúmið hjá kommununum, sum ofta mugu ganga saman um at loysa uppgávurnar sum ásett – antin við kommunusamanlegging ella við at samstarva sínámillum um uppgávur.

Vit síggja eisini, at eftirlitið við kommununum veksur – til tess at tryggja at tær liva upp til nýggju innihaldsligu krøvini til tænastuframleiðslu, men eisini tí at kommunurnar koma at standa fyri einum alt størri parti av tjóðarbúskapinum.

Í hesum kapitli fari eg at viðgera spurningin um kommunala sjálvræðið í lýsinum av myndugleikaviðgerðini av kommunuuppgávum og -bygnaði seinastu 10-15 árini. Eg fari við støði í almennum tilfari[3] at lýsa hugsanirnar aftanfyri ætlanina at broyta kommunuskipanina í Føroyum og býtið av uppgávum millum land og kommunur. Ástøðiliga grundarlagnum er ikki stórt gjørt burturúr, men álit og viðmerkingar í lógum geva kortini ábendingar um, hvørjar hugsanir liggja aftanfyri tiltøkini, sum hava verið, og sum ætlanir eru um at gera. Síðani fari eg at viðgera hetta í mun til ástøði á økinum, sum eru sprottin úr líknandi tilgongdum í grannalondum okkara, kanningum av viðurskiftunum har, og úr ástøði um fólkaræði yvirhøvur.

## 3.2 Politiska viðgerðin av uppgávu- og ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur

„Grøna kommunuálitið"[4] er tað verkið, ið hevur havt størsta ávirkan,

2 Sí serliga tilfar úr norska og danska valdsgreiningararbeiðinum (maktutredninger), men eisini greinar sum t.d. Anne Lise Fimreite og Tommy Tranvik, „Konsekvenser av velferdsrettigheter", Tidskrift for Velferdsforskning, Vol. 8 No. 4, 2005

3 Sí viðmerkingar omanfyri í notu 1.

4 Frágreiðing um kommunurnar – nýggj kommunal skipan í Føroyum, Føroya landsstýri, 1998

og oftast verður endurgivið í sambandi við kommunupolitikk í Føroyum. Álitið er úrslitið av arbeiðinum hjá kommununevndini, sum í 1996 varð sett at endurskoða uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur, og at gera tilmæli um nýtt kommunuuppbýti og kommunustýrisskipan.

Tilgongdin hjá nevndini var „instrumental". Fokus var fyrst og fremst á uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur og á, hvussu vit í Føroyum hava skipað kommunuøkið landafrøðiliga. Grundhugsanin er, at nærri er best, og størri er neyðugt, og at líkskapur, tá øki verða løgd kommununum, skal tryggjast við neyvari lógarfestum rættindum.

Í álitinum „Staðfesting og raðfesting – uppgávu og ábyrgdarbýti millum land og kommunur" frá 2001, sum er ein lýsing og dagføring av teirri lýsing, ið kommununevndin kom við í 1998, sigur løgmaður í fororðinum, at landsstýrið hevur samtykt at halda fram við arbeiðinum við at umskipa viðurskiftini millum land og kommunur, og at endamálið framvegis er at fáa eitt greiðari uppgávu– og ábyrgdarbýti millum land og kommunur.

Álitið tekur útgangsstøði í nøkrum meginreglum, sum skulu vera grundarlag undir arbeiðinum at fáa greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Millum annað at: „Uppgávur verða loystar, so tær eru fullgóðar samfelagsbúskaparliga, men so nær borgarunum sum til ber", og at „uppgávur, ið verða lagdar kommunununum, skulu kommunurnar vera førar fyri at røkja sjálvstøðugt ella í samstarvi við aðrar í nærøkinum, og tað skal bera til at laga uppgávurnar til tann staðbundna tørvin". [5]

Nærleiki og burðadygd eru týðandi tættirnir í hesum meginreglum[6].

---

Føroya landsstýri avgjørdi í september 1995 at seta nevnd at lýsa galdandi kommunuskipanina og seta fram uppskot um nýggja skipan við ásetingum um *kommunala uppbýtið, uppgávu- og ábyrgdarbýtið og stýrisskipan kommunanna*. Arbeiðssetningurin varð góðkendur av Løgtinginum, tó við teirri broyting og ískoyti, at kommunusamanleggingar skuldu vera sjálvbodnar. Nevndin fór til verka 23. apríl 1996 og legði fram seinasta og endaliga partin av sínum áliti í september 1998.

5 „Staðfesting og raðfesting – uppgávu og ábyrgdarbýti millum land og kommunur". Álit 2001, s. 83 og 84.

6 Heitini *burðadygd* og *miðfirringarvinningur* verða nýtt í grøna álitinum; eg

Grundhugsanin er, at miðfirringarvinningur fæst við tað, at kommunurnar betur enn landið eru førar fyri at nøkta ynski/tørv borgarans á staðnum, at rættari vav og samanseting av almennu tænastunum tí fæst fyri sama pening, og harvið fíggjarligur vinningur fyri samfelagið.

At framleiðsluføri krevur stórar eindir er eisini eitt grundleggjandi sjónarmið í sambandi við meginreglunar í kommunuálitinum. At kommunan er burðadygg merkir, at hon skal kunna hava búskaparligan og umsitingarligan førleika at stýra, soleiðis at tilfeingið verður gagnnýtt sum best. At allir borgarar hava atgongd til somu tænastur er eisini grundleggjandi, eins og spurningurin um rættartrygd.

Hetta sama sjónarmiðið um stødd verður sett meira ítøkiliga fram í viðmerkingunum til lógina um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv frá 2007[7]. Her verður m.a. staðfest at: „Hvussu stór ein eind í minsta lagi eigur at vera, er treytað av, hvørjar uppgávur kommunurnar skulu loysa. Umframt eina sømiliga fyrisiting, skal eindin eisini kunna bjóða sínum borgarum tær tænastur, sum ein borgari í einum nútíðar samfelagi krevur; og krøvini verða størri og størri. Um so er, at eindin ikki megnar hetta, ja, so leitar borgarin sær aðrar leiðir eftir hesum tænastum. Ein eind eigur m.a. at bjóða sínum íbúgvum: Skúlagongd, eina sosiala skipan, ellis- og røktarheim, ítrottar- og samkomuhús o.s.fr.“ Í viðmerkingunum til eldru lógina um sjálvbodnar samanleggingar frá 2001 verða kommunusamanleggingar grundgivnar við, at „ein tílík samanlegging skuldi givið samanløgdu kommununum størri umsitingarligan førleika og møguleika fyri við skynsamari rakstri at minka um rakstrarútreiðslurnar.“[8]

Í bóklinginum „Visjón 2015 – mál og vegir“ frá 2007 skrivar arbeiðsbólkurin, ið viðgjørdi evnið samfelagsbygnaður, at kommunurnar skulu vera færri og størri, so at tær sjálvstøðugt kunnu røkja tær

havi tí valt at brúka hesi somu heiti í míni framseting av innihaldinum í álitinum, hóast heitini bæði málsliga og fakliga eru umstrídd.

7 Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar komunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur.

8 Løgtingslóg nr. 88 frá 30. apríl 2001 um sjálvbodnar samanleggingar.

uppgávur, teimum eru álagdar. Uppgávur skulu verða loystar, har tær verða røktar best, samfelagsliga sæð, ábyrgdarbýtið skal vera greitt, og uppgávurnar loysast so nær borgarunum sum gjørligt. Arbeiðsbólkurin staðfestir, at tað ikki er eitt mál í sjálvum sær at skerja talið á kommunum, men at fáa størri eindir, so inntøkugrundarlagið verður størri og fjølbroyttari, og fíggjarliga orkan størri. „Kommunurnar fáa betur nøktað staðbundna tørvin og ynskir borgarans, og tænastustøðið gerst fjølbroyttari. Við størri kommunalum eindum er lættari hjá kommununum at fáa sær tann neyðuga fakliga førleikan, styrkja umsitingina og skipa seg soleiðis, at tilfeingið verður gagnnýtt sum best“.[9]

Felags og avgerandi fatanin, soleiðis sum hon er lýst í almenna tilfarinum, tykist at vera, at eitt nýtt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur eigur at hava sum útgangsstøði, at uppgávur skulu liggja nær borgarunum. Hetta loysir seg samfelagsbúskaparliga, tí jú nærri avgerðirnar eru at brúkarunum, jú neyvari verður framleiðslan av tænastum í mun til veruliga tørvin á staðnum, og tí verður tilfeingið betri gagnýtt. Men fatanin tykist eisini at vera, at størri umsitingarligar eindir og harvið størri fakumhvørvi skulu til fyri at skapa umstøður í kommununum, so tær vera førar fyri at umsita fleiri uppgávur. Eisini verður mett neyðugt við størri fíggjarligari orku at møta fjølbroytta eftirspurninginum eftir tænastum. Nógvar kommunur eru í dag ov smáar til at lúka yvirskipað mál fyri tænastuframleiðsluna – herundir eitt dygt framleiðsluføri, førleika at tryggja rættvíst býtið av tænastum, rættartrygga málsviðgerð, og tað at passa inn sum ein eind í eina yvirskipaða tjóðarbúskaparliga heild.[10]

---

9 Bóklingurin *Visjón 2015 – mál og vegir* frá 2007 er úrslit av stórum útgreinandi arbeiði, sum løgmaður í 2005 tók stig til. Fleiri arbeiðsbólkar hava orðað uppskot til mál og strategi fyri 13 ymisk samfelagsøki. Greitt verður frá, hvørji stig eru neyðug at røkka málunum, at Føroyar eru millum bestu londum at virka og liva í í 2015. Her endurgivið frá s. 133-134.

10 Seinastu árini hava skiftandi landsstýrismenn í fíggjarmálum arbeitt fyri at fáa kommunurnar at góðtaka at gerast partur av fíggjarskipan landsins – ella í øllum førum at hava felags kommunala fíggjarskipan, sum samskiftir við fíggjarskipan landsins. Høvuðsendamálið er lættari at fáa yvirlit yvir allan almanna sektorin og at lætta um uppgerð av tjóðarbúskapi.

### 3.3 Grundleggjandi virðini í viðgerðini

Síðan kommununevndin gjørdi sítt tilmæli í 1998, hevur tað so at siga einsamalt sett dagsskránna í føroyskum kommunupolitikki.

Tilgongdin hjá nevndini var sum áður nevnt instrumental. Setningurin var at koma við tilmæli um, hvørji øki skulu latast kommununum at umsita, og hvussu kommunubygnaðurin skal lagast til, so kommunurnar megna at taka ímóti fleiri umsitingartungum uppgávum. Tilgongdin var ein skipað gjøgnumgongd av ymsu málsøkjunum – hvat er og hvat eigur at verða broytt við nýggjum uppgávu- og ábyrgdarbýti fyri eyga. Meginreglurnar, sum nevndin bygdi sítt arbeiði á, vóru eisini instrumentalar og høvdu samfelagsgagn og framleiðsluføri sum grundleggjandi virði.

L.J. Sharpe[11] viðger í grein um lokalpolitisk virði eisini týdningin av, at avgerðir verða tiknar nær teimum, sum tær snúgva seg um. Hann vísir á, at tað er í nærumhvørvinum, at kunnleikin um tørv er, og at valdu loysnirnar í nærleika verða bæði betri og bíligari. Men hjá honum er útgangsstøðið fyrst og fremst fyrimunirnir við, at avgerðir vera tiknar á breiðum, luttakandi og sjálvstøðugum demokratiskum grundarlagi. Kanska hetta er undirskilt í grøna álitinum, kortini var spurningurin um umstøður og innihald hjá lokala fólkaræðinum, og hvussu hetta verður ávirkað av meira umfatandi og øðrvísi skipaðum uppgávum, ikki viðgjørdur.

Hóast – ella kanska júst tí, at hetta ikki var partur av arbeiðssetninginum hjá nevndini, er tað undrunarsamt, at heldur eingin av almennu, politisku myndugleikunum av álvara hevur tikið táttin upp í umrøðuni av málinum, t.d. soleiðis at tað sást aftur í politisku viðgerðini av lógunum báðum um kommunusamanleggingar. – Tað tykist sum felags fatanin hevur verið, at fleiri uppgávur í sjálvum sær hava við sær størri lokalt sjálvræði. Úrslitið av, at spurningurin ikki varð viðgjørdur tá, og ikki av álvara er reistur síðani, er, at einastu týðandi virðini, sum síggjast aftur í almennu álitunum, lógunum og viðmerkingunum til lógirnar eisini eru instrumental: Framleiðsluføri og rættartrygd eru lyklahugtøkini og aðalendamálini, ikki luttøka og

11 L.J. Sharpe, „Theories and values of local government", Political Studies, Vol. XVIII, No 2, 1970

ávirkan – ella fólkaræði í breiðum týdningi, hóast arbeitt verður við grundleggjandi broytingum á aðrari av grundeindunum í demokratisku samfelagsskipan okkara.[12]

### 3.4 Lokala sjálvræðið í broyting

Sambært Francesco Kjellberg hevur lokala sjálvræðið broytt innihald yvir tíð, frá í høvuðsheitum at vera frælsi frá uppílegging frá landsins embætisverki í lokal viðurskifti, til í størri mun at snúgva seg um frælsi til at seta tiltøk í verk og at taka ítøkilig stig til at menna vælferðatænastur til lokala samfelagið. Tvs. innihaldið er broytt frá at vera neiligt greinað frælsi til at vera eitt fólkaræðisligt amboð at útinna lokal áhugamál grundað á sjálvstøðug, lokal virði[13].

L.J. Sharpe viðgerð í greinini „Theories and Values of Local Government" tríggjar grundleggjandi virðisfaktorar undir kommunala sjálvræðinum: *sjálvstøða*, *luttøka* og *framleiðsluføri*. Hann heldur, at tað er trupult at verja grundarlagið fyri kommunum sum fólkaræðisligar skipanir, um ikki øll hesi viðurskifti eru til staðar[14].

Týdningurin av hesum virðisfaktorum gongur á ymiskan hátt aftur hjá fleiri ástøðingum, sum fáast við at kanna broytingar í kommunuskipanum og kommunala sjálvræðinum[15]. Størsta avbjóðingin á kommunuøkinum í dag er at fáa hesar virðisfaktorar, saman við frælsisfatanini hjá Kjellberg, at yvirliva í eini tíð, har vit eisini uppliva stórar broytingar í virkisrúminum hjá kommununum. Broytingar sum fyrst og fremst koma av samanrennandi áhugamálum hjá borgarum og landi um at lógarfesta rættin til vælferðatænastur, og sum bæði ávirka møguleikan hjá kommununum at framleiða tænastur, sum tær sjálvar ynskja og meta tørvur er á, fíggjarliga rásarúmið hjá

12 Tað nærmasta vit koma er, tá løgtingið avgjørdi, at avgerðin um kommunusamanlegging skuldi verða sjálvboðin og ikki tvungin, soleiðis sum kommununevndin mælti til. – Men hetta var fyst og fremst gjørt út frá einum ynski um at fara hóvligari fram, ikki út frá einum ynski um at fáa á dagsskrá eina viðgerð av innihaldi, virkishátti og karmum um lokala fólkaræðið.

13 Francesco Kjellberg, „The Changing Values of Local Government" ANNALS, AAPSS, 1995, s. 43

14 L.J. Sharpe, „Theories and Values of Local Government" Political Studies, Vol XVIII, No 2, 1970 153-174.

15 Td. Dahl og Tufte, Kjellberg og Sharpe.

kommununum og harvið eisini hugin hjá fólki at taka lut í kommunupolitikki.

Sum ítøkiligt dømi um hetta kann nevnast, at ein av høvuðsniðurstøðunum í norsku Makt- og demokratifrágreiðingini frá 2003 er, „at folkestyret som styringsform er svekket – at kommunale selvstyret har mistet mye av sitt innhold igjennom kombinasjonen av rettighedslover, statlige pålegg og budjettsknapphet. Flere kommunale oppgaver detaljstyres av staten –hvilket fører til ytterligere svekkelse av lokaldemokratiet”[16].

## 3.5 Um stødd og fólkaræði

Robert Dahl og Edward Tufte settu sær fyri í bókini *Size and Democracy*[17] at kanna samspælið millum støddina á fólkaræðisligum eindum og veruligu møguleikarnar fyri, at fólkaræðisliga eindin er ella kann vera demokratisk[18].

Dahl og Tufte knýta tvey lyklahugtøk at hugtakinum *fólkaræði.* Hesi lyklahugtøk eru *citizen effectiveness* og *system capacity.*

*Citizen effectiveness* skilmarka teir sum hetta, at samfelagsborgarar nýta førleikar sínar á ábyrgdarfullan hátt til at stýra avgerðunum, ið fólkaræðisliga eindin tekur. Vit kunnu umseta c*itizen effectiveness* til føroyska hugtakið *Virkisføri hjá borgarum.*

*System capacity* skilmarka teir sum hetta, at fólkaræðisliga eindin hevur neyðugan førleika og orku, so hon til fulnar kann seta samfeldu ynskini hjá borgarunum í verk. Vit kunnu umseta s*ystem capacity* til føroyska hugtakið *Kapasitetur hjá skipanini.*

Teir vísa millum annað til orðini hjá Montesquieau: „*er eitt lýðveldi lítið, forkemur onkur útlendis noyðsla tí; er tað stórt, forkemur onkur*

---

16 Her endurgivið úr eini framløgu, „Demokrati i Norden. Noen hovedpunkter fra Norge“, sum Fredrik Engelstad, gjørdi til norðurlendsku fólkaræðisnevndina í 2003. Sí annars www.maktutredningen.no, maktutredningens hovedkonklusioner, 2003

17 Dahl, R.A. og Tufte, E.R.: *Size and Democracy,* Standford Univeristy Press, Stanford, Calif.,1973

18 Ein fólkaræðislig eind kann í hesum høpi vera einhvør greitt skilmarkað, politiskt stýrd eind – tað verið seg t.d. ríkjasamband, land, landspartastjórn, kommuna ella t.d. býarpartsráð. – Men í okkara høpi eru landið og kommunan eyvitað mest áhugaverdu eindirnar.

*innlendis ódygd tí*". Tvs. at ov lítið og ov mikið man hvørt vera verri enn annað: Er fólkaræðisliga eindin alt ov lítil, megnar hon mestsum als onki. Tá er lítil dugur í, at fáu borgararnir eru sera virkisførir í mun til pinkusamfelag sítt. Øvugt man lítið høpi vera í at tosa um fólkaræði, um fólkaræðisliga eindin til dømis er eitt heimssamfelag við 6-7 milliardum íbúgvum.

Dahl og Tufte nýta ástøðiligu lyklahugtøkini *Virkisføri hjá borgarum* og *Kapasitetur hjá skipanini* við at seta tey inn í eina k-skipan. Teir kunnu við hesum vísa, at ymisk lond – ella ymiskar kommunur – kunnu verða sett inn í k-skipanina í mun til, hvussu *Virkisføri hjá borgarum* og *Kapasitetur hjá skipanini* eru stødd í mun til hvørt annað.

**Mynd 3.1**
*Virkisføri hjá borgarum* og *kapasitetur hjá skipanini* hjá fólkaræðisligum eindum



Leggja vit eitt sindur annað ítøkiligt innihald í lýsing teirra, kunnu vit til dømis ímynda okkum, at A er dreymasamfelagið, at B ímyndar Føroyar, C er ein stór kommuna og D er ein heilt lítil kommuna. – Vit kunnu (uttan um utopiska A) ikki siga nakað um, hvør eind er betur enn onnur. Her veldst bæði um virðini hjá borgarunum og um málsøkini sum eindin hevur ræði á.

Dahl og Tufte skifta síðani frá at hyggja at fólkaræðisligu eindunum einsamøllum, til at hyggja at tí einstaka málinum ella málsøkinum, sum fólkaræðisliga eindin hevur ræði á, og hugsan borgarans um hesi. Teir vísa á, at uttan mun til hvør sannføring tín er um eitt mál/málsøki, so er tað tær ikki nógmikið, at tað liggur tær væl fyri at ávirka avgerðirnar, sum verða tiknar á økinum: Hevur tú so passaliga stóra ávirkan, meðan myndugleikin sum tú ávirkar, mestsum onki fær gjørt við málið, so hevði tú helst viljað, at málið varð flutt øðrum myndugleika, sum var betur førur fyri at gera nakað við málið. Og øvugt: Er myndugleikin framúr væl fyri at stýra málinum ella málsøkinum, meðan hin einstaki so at siga onga ávirkan kann fáa á gongdina, høvdu tey flestu helst ynskt sær at fingið nakað meira ávirkan, hóast tað hevði „kostað", at myndugleikin ikki hevði heilt so stóran kapasitet. Og eru vit onkustaðni mitt í, har myndugleikin hevur rættiliga stóran kapasitet, samstundis sum tú kann hava rættiliga fitt av ávirkan, so kann tað hugsast, at tað so at siga ikki ger tær mun, um tú hevur eitt sindur minni ávirkan, og myndugleikin afturfyri hevur frægari kapasitet, ella øvugt.

At lýsa hvussu hin einstaki (ella allir borgarar í meðal) velja hetta sambandið millum *Virkisføri hjá borgarum* og *Kapasitetur hjá skipanini*, læna Dahl og Tufte hugtakið indifferenskurvar[19] úr búskaparfrøðini.

19 Indifferenskurvur verða vanliga nýttar at vísa nøgdarsamanseting av tveimum vørum ella tænastum, sum geva einum húsarhaldi somu nyttu ella nøgdsemi. Kurvan er fallandi, tí minni nøgd av eini vøru/tænastu má kompenserast við eini størri nøgd av hinari vøruni, um húsarhaldið skal varðveita sítt nyttustig.

**Mynd 3.2**
Hvussu borgarar velja millum *Virkisfrøði hjá borgarum* og *Kapasitet hjá skipanini* í ymiskum málum




Tað sum indifferenskurvarnar lýsa er: Hin einstaki (ella tey flestu í meðal í samfelagnum) eru eins væl foreint við, at málsøki a verður viðgjørt í eini skipan, bara hon liggur onkra staðni á indifferenskurvu A. Og sama er fyri øki b, bara skipanin gevur onkra av ímyndaðu samansetingunum á indifferenskurvu B.

Harafturímóti hevði ónøgd verið, um a varð viðgjørt í eini skipan har samansetingin millum *Virkisførið hjá borgarum* og *Kapasiteturin hjá skipanini* er sum í A1, ella b varð viðgjørt í B1, tí allastaðni á indifferenskurvuni A kunnu bæði *Virkisføri hjá borgarum* og *Kapasitetur hjá skipanini* í senn vera hægri í mun til málsøkið a, enn í A1, og sama er við b í mun til B og B1.

Sum vit síggja, er hallið á indifferenskurvunum A og B eitt sindur ymiskt. Í veruleikanum man tað helst vera so, at hallið á indifferenskurvunum man vera rættiliga ymiskt, alt eftir hvørja politiska sannføring tú hevur, bæði um fólkaræði yvir høvur og um einstaka málið ella málsøkið.

Harumframt eru sjálvsagt mong onnur viðurskifti, ið áttu at verið tikin við. Hesar ástøðiligu indifferenskurvarnar kunnu í besta lagi bert ímynda ein part av veruleikanum.

Kortini man hetta slagið av myndlum siga ikki so lítið – bæði um viðurskiftini hjá hinum einstaka í mun til samfelagið, og í mun til tað sum allir borgarar tilsamans halda og ynskja.

Um vit nú bera myndlarnar hjá Dahl og Tufte eitt sindur longur inn í veruliga politiska lívið, enn teir gera sjálvir, kunnu vit til dømis ímynda okkum, at indifferenskurvurnar fyri tvinni málsøki kunnu vera sum í mynd 3

**Mynd 3.3**
*Virkisføri hjá borgarum og Kapasitetur hjá skipanini* í sambandi við ymisk málsøki



A kundi her til dømis ímyndað eina indifferenskurvu fyri eitt málsøki a við týðandi stórrakstrarfyrimunum, so sum løgreglu og dómsvald, meðan B kundi ímyndað eina indifferenskurvu fyri eitt málsøki b, har onnur atlit viga meira enn stórrakstrarfyrimunir eitt nú at umstøðurnar á staðnum telja við, dømi kundi verið býarskipan. Her kundu indifferenskurvarnar bent á, at málsøki av slagnum b eru betur egnað at liggja hjá eini kommunu við lutfallsliga høgum *Virkisføri hjá borgarum*, meðan málsøki av slagnum a eru betur egnað at liggja hjá landsmyndugleikunum við lutfalsligum høgum *Kapasiteti hjá skipanini*.

## 3.6 Sambandið kommuna – borgari

Tá rættindi til tænastur verða neyvt reglusett í lóg, verða tey eisini á ein hátt broytt grundleggjandi. Regluseting merkir, at rættindi verða knýtt beinleiðis at hinum einstaka, og tey verða tá eisini háttað sum klassisk frælsisrættindi, meðan vanligar tænastur frá vælferðastatinum eru háttað sum kollektiv rættindi. Kommunurnar fáa somuleiðis eina rættsliga skyldu heldur enn ein rættsligan møguleika at seta tiltøk og tænastuveitingar í verk. Og at tryggja hendan rætt fáa vit í fleiri førum eisini dómstólslíknandi myndugleikar, sum borgarar kunnu kæra til, um tey ikki eru nøgd við tænastuna.

Anne Lise Fimreite og Tommy Tranvik vísa á trupulleikar, hetta hevur við sær fyri møguleikan hjá kommununum at ávirka innihald og støði á kommunalu tænastuveitingunum – ella við øðrum orðum at føra politikk. Tí tá rættindi til vælferðatænastur verða ásett sum klassisk frælsisrættindi, verða vælferðarættindi at samanbera við privatrættarlig rættindi: Er politikkur gerðir rættaðar móti tí kollektiva, so verða politisku gerðirnar einnýtis gerðir – nevniliga at samtykkja hesi rættindi í lóg. Meðan tað at útinna rættindini og geva teimum innihald verða individuellar gerðir – eins og t.d. tað at krevja sín rætt í mun til ein privatrættarligan keypssáttmála.[20]

At viðurskifti, ið fyrr lógu undir ræðisøkinum hjá teimum fólkavaldu, flyta í eina rættarliga skipan, og at valdið hjá politiska stovn-

20 Anne Lise Fimreite og Tommy Tranvik, „Konsekvenser av velferdsrettigheter", Tidskrift for Velferdsforskning, Vol. 8 no. 4, 2005, s.209

inum harvið minkar samsvarandi, saman við tí at borgarin ikki longur skal ábyrda politikarar, men kann kæra sína ónøgd til ein 3. instans, sum er óheftur av politisku skipanini, meina Anne Lise Fimreite og Tommy Tranvik samanlagt er ein hóttan móti fólkaræðisligu stýrisskipanini.[21] Tí tá leikluturin hjá kommununi verður avmarkaður til at seta í verk tiltøk, sum landsmyndugleikarnir politiskt hava samtykt, er vandi fyri, at kommunali myndugleikin missir sín politiska/fólkaræðisliga legitimitet. Borgaraleikluturin verður eisini ávirkaður – til at verða brúkari, kundi ella ein sum bert hevur ávís rættindi í mun til kommununa. Landið er tá fyri borgaran einasti samfelagsstovnurin við politiskum/ fólkaræðisligum leikluti.

Ein onnur avleiðing er, at samráðingarrúmið millum land og kommunur verður minni og ofta avmarkað til samráðing um fígging. Handlirúmið hjá kommununum at føra politikk minkar, og mátið fyri, hvussu væl kommunurnar megna at stýra verður í størri mun avmarkað til viðurskifti kommunurnar onga ávirkan hava á.

Úrslitið er, at kommunupolitikarar royna at føra kommunupolitikk á øðrum økjum, ið ikki eru eins lógarstýrd. Slíkur politikkur verður hinvegin í alt størri mun avmarkaður av fíggjarstøðuni hjá kommununi, og av tí sum er eftir, tá lógarbundnu skyldurnar eru røktar.

Hetta kann skapa bæði ónøgd og ørkymlan í sambandinum millum borgara og kommunupolitikara. Borgarin hevur somu atgongd til býráðspolitikaran sum áður, men býráðið hevur færri heimildir. Støðan hjá kommunalpolitikaranum gerst enn meira ørkymlandi, tí tað verður ilt hjá borgaranum at skilja, at hann samskiftir við ein politikara, ið mestsum einans er politikari av navni, men í veruleikanum virkar sum eitt valt embætisfólk, ið umsitir løgtingslógirnar, mestsum uttan ávirkan.

Vit kunnu taka indifferenskurvu-myndilin fram aftur í mynd 4 og ímynda okkum, at A ímyndar indifferenskurvuna fyri eitt øki, sum liggur hjá landinum. Økið er lítið reglusett, og tí er lutfalsliga lætt hjá borgarunum at ávirka gongdina á økinum, og samstundis er *Kapasiteturin hjá skipinini* hjá landinum – alt annað líka – altíð best.

21 Anne Lise Fimreite og Tommy Tranvik, op.cit., s.202 ff

Síðani verður sama øki lagt kommununum at umsita. Kommunurnar hava alt annað líka minni *Kapasitet hjá skipanini* enn landið. Afturfyri hava kommunurnar ta styrki, at tær duga at laga tilboðini til serliga tørvin á staðnum; men nú landið hevur sett sær fyri við lóg at rættartryggja krav borgarans um eins tænastur uttan mun til, hvar í landinum borgarin býr, verður hetta slagið av kapasiteti í kommunalu skipanini ikki gagnýtt. Eftir stendur tí bert, at fíggjarligi og fyrisitingarligi kapasiteturin hjá kommunum sum heild er minni enn hjá landinum.

**Mynd 3.4**
*Virkisføri hjá borgarum* og *Kapasitetur hjá skipanininini* í sambandi við at málsøki verður flutt og neyvt reglusett




At økið er neyvari reglusett enn áður ger eisini, at tað er verri hjá borgaranum at ávirka tænastuútboðið, í hvussu so er um lógarbroyting krevst. Harumframt kemur, at landið, samstundis sum tað hevur reglusett økið

neyvari, hevur lagt kommununum tað at umsita. Mest natúrligt er tí, at borgarin vendir sær til kommununa, men í roynd og veru fær hon onki broytt. Og sjálvt um borgarin er so gløggur, at hann gjøgnumskoðar hetta, er spurningurin um hann fær nakað burturúr at venda sær til landspolitikararnar heldur, tí nú er økið vorðið kommunalt, so tá Tingið nú viðger málið, viðger tað ongantíð bara innihaldið á økinum, men eisini viðurskiftini millum land og kommunur.

Úrslitið av, at øki verða løgd kommununum at umsita, og samstundis verða neyvt reglusett, er tí ikki, at økið verður flutt eitt petti í landsynning eftir somu indifferenskurvu í K-skipanini (sum til dømis úr a1 í a2), men at indifferenskurvan øll sum hon er verður flutt í ein útsynning, tí skipanin missir kapasitet, *samstundis sum* fólkaræðisliga virkisføri hjá borgarunum minkar. Myndugleikin orkar minni at gera tilboðini soleiðis sum borgarin ynskir, *samstundis sum* tyngri verður hjá borgarunum at ávirka skipanina, hóast hon nú liggur hjá kommununum at umsita.

Vit hava enn bert nøkur fá dømi í nýggjari lóggávu í Føroyum, sum hava neyvt reglusett rættindi í lóg. Men tvey av dømunum – barnaverndarlógin og dagstovnalógin – eru eisini dømi um málsøki, ið nýliga eru løgd kommununum at umsita. Hetta kundi, saman við tí sum verður sagt í grøna álitinum og í viðmerkingunum til lógirnar um kommunusamanlegging, bent á, at jú fleiri øki kommunurnar fáa at umsita, meira kunnu vit vænta okkum av hesum frameftir. Spurningurin er um hetta slagið av útlegging er væl gjøgnumhugsað.

## 3.7 Hugsað og roynd tiltøk

Gongdin í føroyskum kommunupolitikki seinastu árini ber greið boð um, at vit eru á veg inn á somu leið sum grannalond okkara longu leingi hava verið á. Vit hava politiskan málsetning um, at kommunurnar skulu hava fleiri málsøki at umsita, og samstundis tykist hugur vera til við neyvari lógarstýring at tryggja eins tænastur í øllum landinum. Uppgávuloysnir verða settar í lóg, og tað, sum áður hevur verðið latið upp til lokala tørvsmeting, kann hugsast í størri mun at fara at verða reglusett sum kravt tænastustøði og ítøkilig rættindi.

Hetta kann fara at geva okkum sama skilna millum fólkaræðislig

virði og ein ástøðiliga ásettan nominellan/kvantitativan líkskap, sum tekur sum givið, at ólíka er illegitimt. Tað vil siga, at tað at finna lokalar loysnir grundað á lokalan tørv er illegitimt. – Skulu fortreytirnar vera hesar, er spurningurin, um vit við útlegging í veruleikanum eru um at spæla okkum stórrakstrarfyrimunin við at økini verða verandi lands av hendi uttan at fáa nakað afturfyri, tí neyva stýringin við lógarregluásetingum ger, at tað sum skuldi verið sjálv aðalstyrkin við lokala fólkaræðinum – hetta at finna lokalt grundaðar og tillagaðar loysnir saman við borgarunum – verður illegitimt.

Hesi samanrennandi áhugamálini, ið standast av at hugt verður einvíst eftir hvørjum málsøki sær, og ikki kommunuskipanini sum fólkaræðisligur stovnur, káva útyvir, at fólkaræðisliga ábyrgdin hvørvur úr skipanini. Landspolitikararnir binda reglurnar niður í staklutir, men hava einki við íverksetanina at gera. Kommunupolitikarar hava ábyrgd av at seta tiltøk og fyriskipanir í verk, men onga ávirkan á, hvussu tær skulu vera. Allir borgarar fáa sama tænastustøði; men hvagar skulu tey venda sær við grundleggjandi ónøgd?

Francesco Kjellberg heldur, at stóru broytingarnar í kommunuskipanunum, sum vit hava sæð í fleiri londum, grundleggjandi skulu skiljast út frá sera samansetta grundarlagnum, sum kommunurnar hava at virka á. Hann vísir á, at kommunur bæði skulu virka við grundarlagi í meira klassiskum virðum, sum tey Sharpe setir sum fyritreyt fyri veruligum kommunalum sjálvræði: *Sjálvstøða, luttøka* og *framleiðsluføri*; og eini vaksandi, miðsavnaðari stýring av kommunuvirkseminum, sum Kjellberg heldur, at vit frameftir noyðast at góðataka. Í londum við stórum almennum sektori, og harvið stórum almennum eftirspurningi eftir nýtsluvørum og tænasum, er neyðugt við miðsavnaðari stýring fyri at tryggja virkisføra framleiðslu, umfordeilding av virðum, fíggjarliga stýring og sivil rættindi. Hann heldur tí, at vit, heldur enn at berjast ímóti, eiga at endurskoða leiklutirnar og samskipanina millum miðsavnaðar og lokalar myndugleikar og síggja hesar sum samanhangandi partar av vælferðasamfelagnum, m.a. við í størri mun at heildarstýra í felag, at gera fíggjaravtalur og tryggja meira fjølbroytta fólkaræðisliga ávirkan á lokal viðurskifti.[22]

22 Kjellberg (1995) Op.cit.

Bo Smith, danskur aðalstjóri, er inni á hesum sama. Í eini grein í Djøf-blaðnum heldur hann tað vera fávitskut at halda, at Fólkating og stjórn ikki eisini frameftir fara at vilja blanda seg uppí, tá ræður um at stýra teimum tveimum triðingunum av almenna búskapinum, sum regiónirnar og kommunurnar í dag umsita. Hann heldur at vit noyðast at finna semju um eitt realistiskt arbeiðsbýti við góðari javnvág, sum tilskilar, hvør partur ger hvat.[23]

Fleiri ástøðingar hava víst á møguleikar at finna kommmunum nýggjan leiklut. T.d. umrøður Beinta í Jákupsstovu í 2. kapitli í hesi bók spurningin um, hvørt eindarkommununan megnar at møta kravinum um tætta sambandið ímillum brúkara og tænastuveitara. Hon vísir í greinini á fleiri dømi í Føroyum um, at multi-purpose-kommunan er skift út við polysentreraðu kommununa, sum samstarvar við aðrar kommunur. Við hesum skipast størri kommunur til serlig endamál, t.d. interkommunalt samstarv um streym og burturkast, kommunulæknar og barnavernd.

### 3.8 Barnaverndarøkið sum dømi um samstarvandi millumkommunalar eindir í føroyskum kommunupolitikki, og politiska umrøðan av hesum.

Høvuðsorsøkin til at fara undir at gera nýggja barnaverndarlóg vóru mongu atfinningarnar at gomlu lógini. Hesar komu av, at barnaverndarøkini vóru alt ov smá, og at málsviðgerðin ofta var órógvað av ógegni, vantandi fakligum førleika, vantandi rættartrygd v.m. Fyrsta útspælið hjá landsstýrismanninum í Almanna- og heilsumálum var at flyta økið til landið at umsita. Hesum tóku kommunurnar ikki undir við. Kommunufeløgini bæði fingu undirtøku frá landsstýrinum. Arbeiði varð byrjað við at broyta lógina umaftur, og hesaferð í tøttum samstarvi við kommunurnar. Úrslitið var ein semja, sum byggir á eina felagskommunala eind, Barnaverndarstovu Føroya, sum umsitur partar av økinum fyri kommunurnar, og eitt lógarálagt samstarv í økjum, sum kommunurnar sjálvar avgera hvørji skulu vera, tó so at tey eru størri enn 1.500 íbúgvar.

23 Bo Smith, „Fremtid for offentlig ledelse“, Djøfblaðið nr. 13, 25. august 2008

Innlendismálaráðið, sum umsat kommunumál, mælti í sínum viðmerkingum frá at gera eina skipan sum byggir á, at kommunur skulu flyta partar av sínum myndugleika til millumkommunalan stovn at umsita. Og tá úrslitið m.a. var samstarv millum kommunur í Norðuroyggjum og Sundalagnum, elvdi tað til, at landsstýrismaðurin tók lógina um sjálvbodna kommunusamanlegging frá 2001 upp aftur til endurskoðan. Endamálið var at avmarka rættin hjá kommununum at finna saman í samstørv uttan at taka landafrøðilig atlit.

Í almennu viðmerkingunum til lógina um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur frá 2007, verður sum grundgeving fyri at broyta lógina sagt, at „Síðani lógin um sjálvbodna kommunusamanlegging kom í gildi í 2001, er talið á kommunum minkað úr 48 niður í 34. Allar samanleggingar hava hildið seg innanfyri tær í upprunauppskotinum tilmæltu eindirnar. Tað sama er ikki galdandi fyri samstørv millum kommunur, ið eru stovnsett í sambandi við lógarásett samstørv í serlóggávu. Hetta kann vera sera óheppið, um talið av skipaðum samstørvum fer at økjast millum kommunurnar, og/ella um fleiri øki verða løgd til kommunurnar, uttan at kommunur leggja saman í størri eindir. Vandi kann vera fyri, at ymsu samstørvini ikki vera samanfellandi, tvs. at ymsar kommunur fara at samstarva um ymisk økir. Avleiðingin verður, at alt størri partur av kommunala sjálvræðinum verður lagdur til samstørv at umsita, samstundis sum samstørvini bara hava fyrilit fyri tí, ið samstarvað verður um, og ikki øllum økjum, ið kommunurnar umsita.“[24]

Undir sjálvari viðgerðini var eisini drúgv umrøða um fyribrygdið kommunalt samstarv. Klaksvík og Fuglafjørður høvdu reist spurningin í Kommunusamskipan Føroya, KSF, tí kommunurnar báðar ynsktu at samstarva um bussleið. Landsstýrsimaðurin í Innlendismálum segði í sínum viðmerkingum til rættarnevnd løgtingsins at: „Hugtakið felagskommunalt samstarv kann býtast í tvey: Felags kommunalt samstarv við fyrisitingarligum bygnaði, og felagskommunalt samstarv uttan fyrisitingarliga bygnað. Og at ásetingin í lóg-

24 Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar komunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur

ini bert er galdandi fyri kommunalt samstarv við fyrisitingarligum bygnaði, ið verður stovnsett at røkja lógarbundar uppgávur, har fyriskipanarligur bygnaður verður settur á stovn, ið tær samstarvandi kommunurnar geva part av sínum myndugleika".[25]

Tað er týðuligt, at landsstýrismaðurin her sipar til málið um barnaverndarøkini, og at hetta er eitt tiltak at forða fyri eini óskipaðari regionalisering av almenna virkseminum – og serliga at forða at kommunurnar fara at skipa samstørv, sum verða ymisk fyri ymisk málsøki.

Landsstýrið tykist tó ikki at hava eina felags hugsan um hetta. Í sambandi við arbeiðið hjá Mentamálaráðnum saman við kommununum at gera námsfrøðiligar sálarfrøðiligar ráðgevingareindir, NSR, kring landið, hevur Mentamálaráðið valt at skipa málsøkið í onnur øki enn verandi barnaverndarøki, og Almanna- og heilsumálaráðið skipar eldraøkið í uppaftur onnur øki.

Í bóklinginum Visjón 2015 – mál og vegir frá 2007 hevur arbeiðsbólkurin viðvíkjandi samfelagsbygnað nakrar viðmerkingar um kommunal samstørv við fyrisitingarligum bygnaði. Tey skriva at: „Slíkt samstarv er á ein hátt í andsøgn við staðbundna sjálvstýrið, við tað at møguleikin hjá kommununum at raðfesta uppgávurnar minkar munandi, av tí at bæði tilfeingi og myndugleiki verða latin hesi sjálvstøðugu fyriskipan at røkja. Tílíkt samstarv er heldur ikki í samljóð við fólkastýrið, við tað at leiðslan í felagskommunala samstarvinum verður vald óbeinleiðis av kommunustýrunum. Tessvegna fær borgarin bert óbeinleiðis ávirkan á tær avgerðir, ið tiknar verða, og samstarvsleiðslan stendur bert óbeinleiðis til svars mótvegis borgarunum."[26]

Hendan hugsan er sambærlig við tí hugsan, sum Tore Hansen og Leif Arne Heløe leggja fram í greinini „Ny kommunestruktur eller ny kommunereform". Tey føra fram, at formligt kommunusamstarv kann borga fyri neyðuga stødd fyri at fáa kapasitet hjá skipanini og betri rættartrygd, men at slíkar skipanir eisini, um tær ikki eru grundaðar í beinleiðis fólkavaldum stovnum, eru merktar av demo-

25 Op.cit.
26 Bóklingurin Visjón 2015 – mál og vegir frá 2007, s. 135

kratiskum undirskoti við tað, at sambandið við veljaran bert er óbeinleiðis, og fjarstøðan ofta stór.[27]

Almenna umrøðan av spurninginum um formlig kommunusamstørv hevur flutt viðgerðina av málinum nakað í mun til spurningin um, hvussu innihaldið í lokala fólkaræðinum verður ávirkað, men viðger kortini ikki ítøkiliga grundleggjandi spurningar um sambandið millum kapasitetin hjá skipanini og fólkaræðisliga virkisførið hjá borgarunum. Formlig kommunusamstørv eru framhaldandi bert ein háttur at skipa móttakara við høgum skipaninnar kapasiteti av einum málsøki, meðan støða ikki verður tikin til, hvussu málsøki verða løgd kommununum, t.v.s. hvussu virkisførið hjá borgarunum í politisku, fólkaræðisligu skipanini verður ávirkað í mun til í hvussu stóran mun landið velur at regluseta málsøkini, tá tey verða løgd kommununum at umsita – hetta uttan mun til um tað verður lagt einstøkum kommununum ella samstarvandi kommunueindum.

### 3.9 Samanumtøka

Endamálið við hesum kapitli er ikki at finna loysnir, men fyrst og fremst at vísa á, at okkum í Føroyum tørvar eina nógv breiðari og meira grundleggjandi umrøðu av kommunupolitikki og teimum avleiðingum tiltøk á hesum øki kunnu hava við sær fyri lokala fólkaræðið og demokratisku samfelagsskipanina sum heild.

Tað er av stórum týdningi, at vit skilja og hava fyri eyga, at kommunalt sjálvræði bæði er ein spurningur um kapasitetin hjá skipanini og sjálvstøði, og eisini ein spurningur um demokratiska luttøku og ávirkan – hetta, at borgarin hevur møguleika at koma til orðanna og hava ávirkan á egin viðurskifti.

Tað hevur sín týdning, at lokali kunnleikin um viðurskiftini á staðnum verður brúktur – at vavið av tænastum kann tillagast lokala tørvinum, og at tilfeingið harvið verður betur gagnnýtt. Men skal hetta virka eftir ætlan, hevur tað eins stóran týdning, at kommunali myndugleikin saman við borgarunum á staðnum hevur møguleika at raðfesta og gera av, hvørjar uppgávur skulu loysast, hvussu tær

27 Tore Hansen og Leif Arne Heløe, „Ny kommunestruktur eller ny kommunereform?", Nordisk Administrativ Tidsskrift 4/2004, 85. årgang

skulu loysast, og at fíggjarligur karmur er til at geva hesum frælsi innihald – og ikki minst at vit vilja tola, at tænastustøðið og -vavið er ymiskt fyri ymisku málsøkini í teimum ymisku kommununum. Verða økini so reglubundin, tá tey verða løgd kommununum, at uppgávan hjá kommununum einans verður at seta frammanundan givnar staklutaloysnir í verk, verður leiklutur kommunurnar sum partur í demokratisku samfelagsskipanini innantómur, samstundis sum demokratiska ábyrgdin fyri økjunum forfjónast ímillum land og kommunur.

Tann kommunupolitikkur, vit í støðugt størri mun uppliva, hevur sum grundarlag eitt beinleiðis samband millum einstaklingin og landið, har landið við lógum, reglum og kravdum mannagongdum skal tryggja hinum einstaka tað, sum landsins myndugleiki heldur at hin einstaki hevur krav uppá at fáa, og kommunala sjálvræðið verður í hesum sambandi ein institutión, sum kann órógva lógarbundna politikkin á leiðini frá landsins myndugleikunum til hvønn einstakan.

Virðið í vælferðarpolitikkium er í dag í stóran mun rættvísi, einvíst fatað sum líkskapur. Hetta sóu vit eisini var grundarlagið undir meginregluni hjá kommununevndini, og hetta er galdandi fyri bæði vanligan, fyrisitingarligan framferðahátt og avgerðir – eins viðgerð og eins tænastustøði. Við útgangsstøði í hesum kann kommunala sjálvræðið og lokalpolitikkur lættliga koma í andsøgn við hin einstaka.

Men úrslitið av, at øki verða løgd kommununum at umsita og samstundis verða neyvt reglusett, kann – sum vit sóu í mynd 4 – verða, at demokratiska samfelagsskipanin missir kapasitet, *samstundis sum* fólkaræðisliga virkisførið hjá borgarunum minkar. Myndugleikin orkar minni at gera tilboðini soleiðis sum borgarin ynskir, *samstundis sum* tyngri verður hjá borgarunum at ávirka skipanina, hóast hon nú liggur hjá kommununum at umsita.

Størsta avbjóðingin á kommunuøkinum í dag er tí at varðveita demokratiska, lokalpolitiska myndugleikan í eini tíð við broytingum, sum fyrst og fremst koma av samanrennandi áhugamálum hjá borgarum og landi um at lógarfesta rættin til vælferðatænastur, og sum bæði ávirka møguleikan hjá kommununum at framleiða tænastur, sum tær sjálvar halda og meta tørvur er á, fíggjarliga rása-

rúmið hjá kommununum og harvið hugin hjá fólki at taka lut í kommunupolitikki.

Almanna umrøðan av spurninginum um formlig kommunusamstørv hevur í avmarkaðan mun flutt viðgerðina av málinum til eisini at fevna um, hvussu innihaldið í fólkaræðinum verður ávirkað, men fevnir kortini ikki um grundleggjandi spurningar um sambandið millum *kapasitetin hjá skipaninini* og fólkaræðisliga virkisførið hjá borgarunum, soleiðis sum lýst við støði í ástøðiligu framsetingini hjá Dahl og Tufte. Polysentreraða kommununa, sum samstarvar við aðrar kommunur um málsøki, er bert ein háttur at skipa so fyri at móttakarin av einum málsøki hevur kapasitet til at røkja tað, meðan støða ikki verður tikin til, hvussu virkisførið hjá borgarunum í politisku, fólkaræðisligu skipanini verður ávirkað í mun til í hvussu stóran mun, landið velur at regluseta málsøkini, tá tey verða løgd kommununum at umsita – hetta uttan mun til um tað verður lagt einstøkum kommununum ella samstarvandi kommunueindum.

Spurningurin um, hvat slag av lokalum fólkaræði vit vilja hava, hvussu politiski viljin er til at leggja út myndugleika til lokaløkini, og hvussu reglusett málsøkini, ið verða løgd kommununum skulu vera, átti at verið fremsti spurningurin í eini tilgongd at umskipa so stóran part av demokratisku samfelagsskipan okkara. Harnæst er spurningurin hvørji málsøki, og síðani hvørjar ella hvat slag av eindum vit skulu hava við neyðugum kapasiteti hjá skipaninini til at nøkta nýggju avbjóðingunum.

# 4

# Høvuðsbroytingar í sambandi við nýggju føroysku kommunustýrislógina frá 2000[1]

*Bárður Larsen:*

## 4.1 Inngangur

Í hesum kapitli skal verða greitt frá teimum høvuðsbroytingum, sum vórðu framdar við nýggju føroysku kommunustýrislógini frá 2000[2], ið kom í staðin fyri kommunulógina frá 1972.[3]

Hesin kapittulin hevur bæði eina rættarliga lýsing av høvuðsbroytingunum, sum nýggja lógin hevði við sær, og hugleiðingar um tey fólkaræðisligu virði og hugsanir, sum lógu undir, og tey, sum ikki vóru til staðar í sambandi við hesa lógarbroyting. Umframt hetta er um háttalag (metodu) at siga, at viðgerðin eisini grundar seg á samrøður við ein umboðandi skara av núverandi og fyrrverandi kommunustýrislimum og kommunuskrivarum fyri á tann hátt at koma nærri eini mynd av avleiðingunum av broytingunum, og hvussu hesar kendust millum politikarar og starvsfólk úti í kommununum.[4]

---

1 Hesin kapittulin er tillaging av teksti, sum varð lagdur fram á donskum á XVI Nordiske Kommuneforskerkonference í Gøteborg 23.-25. november 2007.

2 Sí løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003. Nýggja lógin kom í gildi 1. januar 2001.

3 Sí løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972 um føroysku kommunurnar.

4 Serliga orsakað av, at kommunurnar eru so ymiskar til støddar og royndirnar hjá kommunustýrislimum og starvsfólkum tískil so ymiskar í mun til, hvørja kommunu talan er um, eru samrøðurnar skipaðar sum samrøður av sokallaðum óstruktureraðum slagi.

## 4.2 Upprunin til kommunustýrislógina frá 2000

Tað er ein næstan triviell søgulig sannroynd, at samfeløg oftast endurskipa seg í kjalarvørrinum av størri kreppum.[5] Sum kunnugt fór føroyska samfelagið gjøgnum eina víðfevnda kreppu frá byrjanini av 1990-árunum og nøkur ár fram. Sjálvsrannsakanin eftir hesa kreppuna fevndi eisini um kommununar leiklut, har tað varð víst á, at fíggjarstýringin hjá kommununum hevði verið ov vánalig við alt ov stórari kommunalari skuld sum avleiðing. Í tí sambandi var ein partur av kritikkinum eisini, at kommunurnar høvdu verið ov smáar til at kunna røkja vanligu krøvini til eina løgliga ella *rættarstatsliga*[6] fyrisiting, um slíkt heiti kann verða brúkt í kommunalum høpi.[7]

Tiltøkini til at endurskoða føroyska kommunubygnaðin, sum nærri lýst niðanfyri, mugu tí eisini fatast í ljósinum av eini meira generellari fyrisitingarrættarligari endurskoðan, m.a. við eini nýggjari fyrisitingarlóg og eini lóg um alment innlit. Hesi tiltøk spruttu út frá nevndu tilvitsku um, at persónlig og politisk fyrisiting nú mátti víkja til fyrimuns fyri eina fyrisiting, ið er grundað á líknandi rættarstatslig virðir, sum longu vóru galdandi í grannalondunum, serliga Danmark. Á kommunala økinum vóru í 1993 tikin ítøkilig stig til at styrkja landsins eftirlit við kommunusektorinum. Fyrsta av hesum stigum var við lógini um kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalum veðhaldsgrunni, o.a.m. frá 1993,[8] sum umframt at áseta, at kommunuskattaprosentið ikki kundi vera

5 Sí t.d. Jon Elster, Forces and Mechanism in the Constitution-Making Process, 45 Duke Law Journal, 364, 1995, s. 370 um líknandi viðurskifti í mun til neyva samanhangin millum kreppur og nýggjar skrivaðar stjórnarskipanir (ella grundlógir).

6 Á donskum/skandinaviskum svarar „retsstatslig" fyrisiting á leið til eina fyrisiting, sum uppfyllir mátini fyri tí, sum tey ensktmæltu kalla Rule of Law. Eftir hesum rættarstatsligu virðum virkar fyrisitingin eftir reglum og prinsippum, sum beinleiðis ella óbeinleiðis eru løgd niður framman undan í lóg, heldur enn at fyrisitingin verður stýrd av persónligum og (parta) politiskum faktorum.

7 Sí eisini um fyritreytirnar fyri lógarbroytingini og nýskipanunum innan kommunuøkið Jákupsstovu og Kjersem 2008, s. 12-13.

8 Sí løgtingslóg nr. 189 frá 8. desember 1993 um kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan veðhaldsgrunn v.m.

uttan fyri ávikavist 16% og 23%, eisini avmarkaði kommunala frælsið til at gera fíggjarætlan, taka upp lán og til at gera íløgur.[9] Ein endurskoðan av sjálvari kommunulógini kom seinni.

### 4.3 Kommununevndin frá 1996 og uppskotið til nýggja kommunala lóggávu

Í september 1995 avgjørdi Føroya landsstýri, at nevnd skuldi setast til at útgreina og kanna higartil galdandi kommunalu skipanina fyri harvið at kunna seta fram eitt uppskot til eina nýggja skipan við ásetingum um *kommunala uppbýtið, uppgávu- og ábyrgdarbýtið og stýrisskipan kommunanna*. Arbeiðssetningurin varð góðkendur av Løgtinginum, tó við tí broyting og ískoyti, at kommunusamanleggingarnar skuldu vera sjálvbodnar og ikki gjøgnumtvingast við lóg.[10]

23. apríl 1996 varð nevndin sett, og hon legði fram seinasta og endaliga partin av sínum áliti í september 1998, m.a. við einum uppskoti til nýggja kommunustýrislóg í sambandi við eina lóg um sjálvbodnar kommunusamanleggingar[11], sum hevði eitt tilmæli til eina føroyska kommunuskipan við í alt sjey kommunum. Hartil bygdi tilmælið frá kommununevndini á ta greiðu fatan, at nýggja kommunala uppbýtið og greiðari uppgávubýtið millum kommunur og land hevði sum fyritreyt eina desentralisering, har fleiri myndugleikauppgávur vórðu lagdar út til størri og arbeiðsførari kommunur.[12]

9 Sí Jákupsstovu og Kjersem, 2005, s. 16.

10 Sí almennu viðmerkingarnar til lógaruppskotið í sambandi við, at lógaruppskotið varð sett fram í Løgtinginum, løgtingstíðindi 1995, s. 147ff. Víst verður eisini til álitið frá Kommununevndini, part I og II, sum er at finna á heimasíðuni hjá Innlendismálaráðnum (nú aftur Løgmálaráðnum): http://www.imr.fo/index.asp?pID={6D8FFAC3-34BD-4293-AA07-4339D55B99BF}

11 Í sambandi við kommunusamanleggingar var ein áseting í § 48, 2. petti, í kommunulógini frá 1972 um, at kommunur eftir egnum ynski, og um landsstýrið góðkendi tað, kundu leggja saman. Við broytingunum í 2000 vórðu hesi viðurskifti regulerað við sjálvstøðugari lóg, seinast við løgtingslóg frá 22. februar 2007 um sjálvsbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur.

12 Sí m.a. s. 16.ff. í partinum „Niðurstøða og tilmæli“ í endaliga álitinum frá Kommununevndini og eisini niðanfyri um effektivitet mótvegis fólkaræði.

Endamálið við sjálvum lógaruppskotinum til nýggja kommunustýrislóg, sum upprunaliga varð sett fram í álitinum frá 1998, var at nútímansgera kommunalu lóggávuna, og at kommunala sjálvstýrið og ábyrgdin skuldu styrkjast við greiðari skilnaði millum uppgávur hjá landi og kommunum. Styrkjanin av kommunala sjálvstýrinum, og í tí sambandi tað greiðari ábyrgdarbýtið millum kommunurnar og landsmyndugleikan, er kortini ringt at síggja aftur í sjálvum uppskotinum til nýggja kommunustýrislóg. Hetta er sjálvsagt ein avleiðing av, at nýggi kommunubygnaðurin mest varð ætlaður at verða framdur við serligu lógini um sjálvbodnar samanleggingar av kommunum, og at atlit ikki vórðu tikin til kommunurnar og teirra tillaging til broyttan kommunubygnað í sjálvum uppskotinum til kommunustýrislóg.

### 4.4 Høvuðsbroytingar í sambandi við nýggju lógina

Lógarbroytingin í 2000 hevði við sær eina røð av smærri broytingum og broytingum av meira lógartekniskt kendum slagi. Haraftrat vóru eisini nakrar veruligar broytingar, m.a. reglurnar í §§ 7-9 um rætt hjá løntakarum til fráveru frá arbeiði fyri at taka sær av kommunala yrkinum, verju móti uppsøgn av løntakarum vegna upptøku á uppstillingarlista ella vegna val til kommunustýrið. Hesar teknisku ella politiskt sæð minni kontroversiellu broytingarnar verða ikki lýstar í hesum kapitli, ið heldur fer at snúgva seg um tær broytingar, sum løgliga og politiskt høvdu størstan týdning.

#### 4.4.1 Avtøka av góðkenningarskipanini

Eins og við skipanini í Danmark fram til 1980,[13] so hevði føroyska kommunulógin frá 1972 eina áseting í § 39 um, at upptøka av láni ella broyting í lánitreytum kravdi landsstýrisins samtykki. Á sama hátt var ein áseting í § 41 um, at keyp ella søla av fastari ogn skuldi góðkennast av landsstýrinum. Í praksis vóru hesi mál kortini ikki annað enn avgreiðslumál, tí innihaldsliga royndin[14] frá landsstýrisins síðu var avmarkað. Kommununar vilji varð næstan altíð virdur, og

13 Sí Heide-Jørgensen 1993, s. 67ff.

14 At „royna" sipar her til tað sama sum at „prøve" ella „efterprøve" á donskum.

góðkenningin var sostatt í veruleikanum ikki nógv meira enn eitt seinkandi lið í tilgongdini. Nógvur veruleiki var tískil ikki yvir hesi eftirlitisskipan millum land og kommunur. Sambært almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið – og flest øllum persónunum, ið undirritaði hevur havt samrøðu við – er hetta orsøkin til, at mælt varð til at taka hetta eftirlitið av, tá góðkenningarnar nú gjørdu kommunalu umsitingarnar óneyðuga óeffektivar.[15]

Sambært somu almennu viðmerkingum til lógaruppskotið kann tilmælta avtøkan av góðkenningarskipanini eisini verða fatað sum ein liður í tí at gjøgnumføra eitt greiðari ábyrgdarbýti millum land og kommunur, tí við avtøkuni vildi tað bara snúgva seg um eitt myndugleikatrin aftan fyri kommunalu samtyktirnar heldur enn sum fyrr tvey.[16]

### 4.4.2 Vanliga kommunala eftirlitið

Almennu viðmerkingarnar til lógaruppskotið hava eina viðmerking um, at meðan avtøkan av góðkenningarskipanini á tí eini síðuni hevði við sær, at kommunurnar fáa størri rásarúm, so vildi tað, at landsstýrið ikki longur skuldi góðkenna kommunalar avgerðir á hesum øki, á hinari síðuni hava við sær, at størri orka bleiv hjá landsstýrinum til at útinna sína uppgávu sum eftirlitismyndugleiki.

Tað er helst ivasamt, hvussu nógv virði kann verða lagt í eina slíka leysa viðmerking í almennu viðmerkingunum. Burtursæð frá avtøku av góðkenningini, so hendu ikki týðandi broytingar í ásetingunum um vanliga kommunala eftirlitið. Kommunala eftirlitið var rættiliga veikt í tíðini fram til 2000, meðan tað í verki fekk hægri raðfesting

15 Helst er hetta kortini eins nógv ein eftirrationalisering fyri at seta fram eina skilvísa (rationella) orsøk til tað, sum í veruleikanum er so mikið einfalt sum tað, at ein nýggj føroysk kommunustýrislóg við danskari fyrimynd hevði trupult við at síggja burtur frá, at sama góðkenningarskipan var blivin avtikin í Danmark nøkur á framman undan, og tí ikki longur var partur av (donsku) lógini, ið tænti sum fyrimynd fyri føroyska lóggávuarbeiðnum. Sí um líknandi viðurskifti í kapitli 6 niðanfyri.

16 Hesin partur av almennu viðmerkingunum verður helst raktur av sama kritikki, sum er settur fram í notuni omanfyri, at hetta er (eftir)rationalisering av eini lógarbroyting, sum helst í stóran mun hevði aðrar orsøkir.

eftir hetta.[17] Meira enn tengt at eini broyttari rættarstøðu og betri orku eigur hetta heldur at verða skilt í ljósinum av eini øðrvísi umsitingarligari og politiskari raðfesting av kommunala eftirlitinum. Henda øðrvísi raðfesting var borin fram av teimum áskoðanum um eina meira skipaða kommunala umsiting, ið lá sum drívmegi aftan fyri lógarbroytingina í 2000.[18]

### 4.4.3 Fastar nevndir

Við lógini frá 2000 blivu sum nakað nýtt fleiri kommunur enn higartil beinleiðis fevndar av øllum ásetingum í lógini. Nú skuldu undantøk einans verða gjørd fyri kommunur við færri enn 500 íbúgvum, meðan lógin frá 1972 gjørdi møguleika fyri undantøkum fyri kommunur við færri enn 1000 íbúgvum. Eftir 1972-lógini var gjørt tað undantak fyri kommunur undir 1000 íbúgvar, at tær vóru undantiknar §§ 12-19 í lógini, og kundu tær tískil ikki seta niður fíggjarnevnd ella aðrar fastar nevndir, tí kommunustýrið sjálvt viðgjørdi tey mál, sum annars natúrliga vildu ligið hjá føstum nevndum.

Við nýggju lógini vórðu sostatt kommunur heilt niður í 500 íbúgvar fevndar av kravinum í § 28, stk. 1, um, at kommunustýrið skal seta niður eina fasta fíggjarnevnd og í minsta lagi eina aðra fasta nevnd til beinleiðis umsiting av kommunalu viðurskiftunum. Sambært samrøðum við kommunustýrislimir í kommunum nakað oman fyri 500 íbúgvar, ið vórðu fevndar av hesi broyting, sær út til, at tikið varð undir við hesi lógarbroytingini.[19]

---

17 Sum dømi um hesa fatan: m.a. samrøður við Jógvan K. Mørkøre, bygdaráðslim á Eiði og fyrrverandi formann í Føroya Kommunufelag, august 2008, og Hanus undir Leitinum, borgarstjóra í Húsavíkar kommunu, maj 2008.

18 Henda fatan verður váttað í samrøðu í august 2008 við Sørin Pram Sørensen, fulltrúa við kommunumálum í tíðini upp til lógarbroytingina og lim í Kommununevndini. Sambært honum var tað greitt ein politisk hugburðsbroyting heldur enn lógarbroytingin sjálv, ið var orsøk til, at kommunala eftirlitið fekk hægri raðfesting undir nýggju lógini í mun til gomlu lógina.

19 Váttað av samrøðum; samrøða í august 2008 við borgarstjóran í Hvalbiar kommunu, Levi Niclasen, sum sat undir gomlu lógini og fram til 2008; samrøða við Tór Johannesen, bygdaráðslim í Sands kommunu í august 2008, ið sat undir gomlu lógini og framvegis situr sum kommunustýrislimur. Samrøða, eisini í august 2008, við kommunustýrislim í Eiðis kommunu,

### 4.4.4. Borgarstjórin

Ein onnur týðandi broyting í sambandi við lógarbroytingina frá 2000 var ein uppraðfesting av kommunalu umsitingini við kravinum um, at borgarstjóraembætið skuldi vera røkt annaðhvørt hálva ella fulla tíð.[20] Kravið um, at borgarstjóraembætið skal vera røkt annaðhvørt sum hálvtíðar- ela fulltíðarstarv varð til eftir eitt broytingaruppskot í sambandi við viðgerðina á løgtingi av uppskotinum til nýggju kommunustýrislógina.[21]

Orsakað av, at teir borgarstjórar, sum eftir nýggju lógini komu at sita fulla tíð, eftir § 6, stk. 2, pkt. 4, ikki samstundis máttu hava annað starv aftrat borgarstjóraembætinum, hevur nýggja lógin helst eisini ført við sær eina proffessionalisering av borgarstjóraembætinum. Praktiska avleiðingin av hesum var, at í mongum kommunum, har starvið fyrr hevði verið hálva tíð, bleiv starvið nú sett upp í fulla tíð. Í sambandi við spurnarblaðskanningina hjá Beintu í Jákupsstovu og Eli Kjersem var hetta eisini eitt afturvendandi tema, har kommunalu politikararnir fataðu uppraðfestingina av borgarstjóraembætinum sum týdningarmestu einstøku broytingina í sambandi við broytingarnar í 2000.[22]

---

Johan K. Joensen, sum hevur sitið undir báðum skipanunum, stuðlar, at eisini varð tikið væl móti hesi broyting í Eiðis kommunu. Sambært seinastnevnda var arbeiðið í Eiðis kommunu tó longu skipað í óformligar arbeiðsbólkar framman undan lógarbroytingini, og var henda lógarbroytingin tí fyri hesa kommunu mest av øllum at meta sum ein formalisering av einum praksis, ið longu var frammanunan.

20 Sí § 6, stk. 2, 3. pkt., sum ásetir, at borgarstjóraembætið skal vera ásett í kommunustýrisskipanina sum antin 1/2 ella 1/1.

21 Í upprunaliga framsetta lógaruppskotinum ljóðaði § 6, stk. 2, um borgarstjóran so: „Val av borgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið. Borgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. Tá ið borgarstjórin er valdur, skal hann leggja borgarliga starvið frá sær, umframt øll almenn álitisstørv, sum ikki beinleiðis hava samband við starvið sum borgarstjóri.“ Hetta upprunaliga uppskotið hevði sum fyritreyt, at borgarstjórin virkaði fulla tíð.

22 Sí til hetta sjónarmiðið Jákupsstovu og Kjersem 2007, s. 7. Beinta í Jákupsstovu og Eli Kjersem hava eisini allýst, hvønn týdning lógarbroytingin í 2000 hevur havt fyri samsýningina av einstøku kommunustýrislimunum. Teirra niðurstøða er, at „for kommunene som helhet betydde det en standardisering, der alle kommunestyrene nå valgte å gi seg selv det som maksi-

Í § 58, stk. 1, nr. 2, var eisini ásett, at kommunur við færri enn 500 íbúgvum ikki skuldu vera fevndar av hesum ásetingum, men at tað fyri hesar kommunur skuldi ásetast í kommunustýrisskipanina, hvønn setanarbrøk ið borgarstjórarnir skuldu hava.[23]

### 4.4.5 Tal á kommunustýrislimum

Í § 3 í lógini frá 1972 varð ásett, at talið av kommunustýrislimum skal vera ásett í reglugerðini (svarandi til kommunustýrisskipanina) til 7-9 í kommunum við færri enn 2500 íbúgvum, 9-13 í kommunum við íbúgvaratali millum 2500-5000 og 13-17 fyri kommunustýri í kommunum við fleiri enn 5000 íbúgvum. Í nýggju § 5, stk. 2, í lógini frá 2000 er henda støða í høvuðsheitum endurtikin við ásetingini um, at tað skuldi ásetast í kommunustýrisskipanini, at limatalið í kommunustýrunum skuldi vera í minsta lagi 7 og í mesta lagi 17.

Tískil er rættarstøðan í mun til talið á kommunustýrislimum tann sama sum áðrenn 2000 bert við tí muni, at nakað meira av fleksibiliteti er í skipanini eftir 2000.

Í mun til fyrru § 49, stk. 1, í 1972-lógini bleiv gjørt undantak fyri kommunur við færri enn 1000 íbúgvum, so at landsstýrið kundi frávíkja reglurnar um tal á kommunustýrislimum. Í praksis høvdu smáu kommunurnar oftast eitt tal av kommunustýrislimum á 5, meðan talið 3 tó eisini kom fyri.

---

malt kunne utbetales. Folkevalgte i mange kommuner fikk merke at kommunestyrearbeidet ble mye mer lønnsomt". Sí Jákupsstovu og Kjersen 2008, s. 17. Grundað á hesa kanning er rímiligt at gera ta niðurstøðu, at broytingin í kommunustýrislóg og kommunubygnaði í 2000 sum heild hevur professionaliserað rolluna sum kommunupolitikari, ikki bara í mun til borgarstjórarnar, men eisini í mun til vanligu kommunustýrislimirnar. Undirritaði hevur kortini ikki í samrøðum sínum við kommunustýrislimir og skrivarar kunnað váttað hesa fatan. Til tess vóru sjónarmiðini ov ymisk.

23 Sum eitt kuriosum kann vera nevnt, at lógarkravið um, at borgarstjóraembætið antin skal vera til hálva ella fulla tíð ikki er galdandi fyri kommunur við minni enn 500 íbúgvum. Hóast borgarstjórarnir í hesum heilt smáu kommununum í praksis eru settir í lægri brøki enn 1/2 (ofta bara á tann hátt, at teir fáa eina samsýning uppá t.d. 4000 kr um mánaðin), og alt annað er lítið sannlíkt ella meiningsfult, so stendur tað hesum kommununum frítt at áseta starvið hjá borgarstjóranum til t.d. 3/4 ella fulla tíð.

Við nýggju lógini frá 2000 varð aftur gjørt frávik fyri smáu kommunurnar, so at kommunustýrislimirnir kundu vera færri í tali. Í § 58 stk. 1, nr. 1, varð soleiðis ásett, at fyri kommunur við færri enn 500 íbúgvum í byrjanini av valárinum skuldi talið av kommunustýrislimum vera 5, meðan kommunur við undir 100 íbúgvum sum nakað nýtt einans skuldu kunna velja 3 kommunustýrislimir.

### 4.4.6 Landsins fíggjarliga eftirlit við kommununum

Í hoyringstilgongdini í sambandi við lógaruppskotið til kommunustýrislógina kom skriv frá Fíggjarmálaráðnum (táverandi Fíggjarmálastýrinum)[24], har ráðið mælti til eina skipan sum við „Kommunernes Lønningsnævn" í donsku kommunustýrislógini fyri at forða eini lønarglíðing og at varðveita eitt javnt alment lønarlag. Men úrslitið gjørdist kortini, at eftirlitið kom at liggja hjá sjálvum Fíggjarmálaráðnum við eini § 5, stk. 5, um, at „ásetingar í sáttmálum og avtalum um lønar- og setanarviðurskifti fyri kommunal starvsfólk (íroknað kommunalar felagsskapir) og flokkingar og stig fyri størv, sum ikki frammanundan greitt eru ásett í sáttmála ella avtalu, skulu góðkennast av landsstýrismanninum".

Í mun til kommunala sjálvræðið kann kritikkur vera førdur fram móti hesum, at ongin lønarnevnd eftir danskari fyrimynd varð stovnað. Eftir donsku skipanini velur innanríkis- og heilsumálaráðharrin limirnar í nevndini eftir tilmæli frá donsku kommunalu feløgunum, so sum Kommunernes Landsforening og Amtrådsforeningen. Í Føroyum er sum kunnugt ongin kommunal umboðan til staðar í sambandi við bólkingar og plaseringar av størvum í kommunala sektorinum, tá Lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum einsamøll tekur sær av hesi eftirlitisuppgávu. Hetta er prinsipielt óheppið, at ikki umboð fyri kommunala sektorin sjálvi eru við til at mynda hesar avgerðir og ikki minst í mun til víða rásarúmið, ið embætisfólkini hjá Lønardeildini hava sum góðkenningarmyndugleiki.[25]

Góðkenningarheimildin hjá Fíggjarmálaráðnum viðvíkjandi

24 Sí skriv, dagfest 4. januar 2000, frá Fíggjarmálastýrinum til Løgmansskrivstovuna í sambandi við uppskotið til kommunustýrislóg.

25 Hetta er vanligt sjónarmið í kommunala sektorinum, og verður tað eisini

lønar- og setanarviðurskiftum samljóðar heldur ikki so væl við yvirskipaða málið, sum sagt varð at liggja aftanfyri nýggju kommunustýrislógina, nevniliga at styrkja kommunala sjálvstýrið og ábyrgdina í sambandi við ein greiðari skilnað millum uppgávur hjá kommunum og landi.

Ein nýggj týðandi eftirlitisáseting varð sett inn í § 43, stk. 3, í nýggju lógini frá 2000, har tað kravdist loyvi frá landsstýrismanninum í tí føri, at ein kommuna við skuld yvir eina álíkning vil taka upp nýggj lán ella gera broytingar í verandi lánitreytum. Henda áseting avloysti kravið, sum var galdandi áðrenn, at upptøka av láni ella broyting í lánitreytum kravdi samtykki frá landsstýrinum uttan mun til fíggjarligu støðuna hjá viðkomandi kommunu. Sambært samrøðum hjá undirritaða er rímilig semja millum føroyskar kommunustýrislimir og embætisfólk um, at henda eftirlitismekanisman er neyðug og skilagóð, og teir fata sum heild ikki skipanina sum eina eftirlitismekanismu, ið gongur kommunala sjálvræðinum ov nær. Hesin positivi hugburður er galdandi fyri allar kommunur, hóast hugburðurin tó er mest positivur í kommununi, ið er sterkast fíggjarliga, Tórshavnar kommunu.[26]

Ein nýggj áseting í mun til 1972, sum er skyld við § 43, stk. 3, kom inn í § 54, har landsstýrismaðurin kann geva eini kommunu boð um at gjøgnumføra neyðugar broytingar í uppskotinum til fíggjarætlan ella eykafíggjarætlan, um landsstýrismaðurin metir, at upphæddirnar, ið eru grundarlag undir inntøkum, útreiðslum og íløgum, hvíla á skeivum grundarlagi ella á annan hátt ikki eru rættar ella rímiligar. Henda eftirlitismekanisma hevur kortini ikki havt stóran týdning í praksis.

Ein onnur nýggj áseting, sum eisini hevur til endamáls at hava eftirlit við kommunalu umsitingini av teirra ognum og fíggjarviðurskiftum, er § 44, stk. 1. Sambært hesi áseting kann føst kommunal

---

stuðlað á samrøðu við leiðaran á skrivstovuni hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, Anitu Fuglø, august 2008.

26 Sambært samrøðum við kommunustjóra og næstformann í Kommununevndini, Jens Marius Poulsen, og býráðslimin Leiv Hansen í august 2008 góvu hesir ta meining til kennar, at kravið í § 43, stk. 3, væl kundi verið strangari enn tann eina álíkningin.

ogn nú sum høvuðsregla ikki verða sett til sølu uttan fyrst at hava verið bjóðað út í almennum útboði.

### 4.4.7 Bann móti kommunalum stuðli til einstaklingar og luttøku í vinnulívinum

Sum longu greitt frá oman fyri var nýggja kommunustýrislógin frá 2000 partur av lóggávureforminum, ið var ein reaktión móti m.a. tí meira víðgongdu luttøku í vinnulívinum, sum hevði verið upp gjøgnum 1970- og 1980-árini, og sum hevur fingið sín part av ábyrgdini fyri búskaparligu kreppuni frá umleið 1990 og nakað fram.

Ein av mest týðandi tættunum í hesum tiltaki var eitt bann móti kommunalum stuðli til vinnulívið og stuðli til einstaklingar í § 50 í nýggju lógini. Hetta bannið kann longu sigast at hava verið galdandi á óskrivaðum grundarlagi í donskum – og kanska eisini føroyskum[27] – fyrisitingar- og kommunurætti áðrenn 2000. Uttan mun til, um bannið í § 50 longu var galdandi rættur áðrenn nýggju lógina frá 2000 ella ikki, so er tað ein veruleiki, at í praksis stuðlaðu kommunurnar undan seinastu lógini í stóran mun lokalum vinnulívi.

Í tíðini frá serliga 1970-árunum og fram til búskaparligu kreppuna í 1990-árunum, tá fiskivinnan á landi mentist við flakavirkjum, hevði ein lokalpolitiskt motiverað spjaðing av ídnaðinum út á økini høgan politiskan prioritet. Trupulleikin var kortini, at mong av bygdasamfeløgunum vóru so smá, at tað var ringt at fáa privatan íløgukapital til vega. Hesi viðurskifti, sæð saman við einum hugsjónarliga positivum hugburði til almennan stuðul til vinnulívið, hevði við sær, at fleiri kommunur sjálvar stuðlaðu skipum ella fiskavirkjum við kapitalstuðli ella veðhøldum, ella beinleiðis áttu í vinnurekandi feløgunum. Seinni undir búskaparligu kreppuni var meira ella minni semja um, at henda støða hevði verið óheppin, tá hon hevði elvt til, at neyðuga tileggjanin av vinnulívinum, og møguleikar fyri at meta um lønsemi, vóru ikki til staðar.

---

27 Tann spurningurin er kortini av meira torførum teoretiskum slag og kann ikki verða svaraður uttan atlit til, hvørji kriteriu ið eru tey mest rímiligu at seta upp til at meta eftir, nær ein ávís faktisk støða ella praksis eisini avmyndar galdandi rætt og ikki.

Undirtøka var tí fyri eini áseting í nýggju lógini, sum gjørdi bannið móti kommunalum vinnuvirksemi meira greitt. Bannið var orðað í § 50 í kommunustýrislógini frá 2000, sum í stk. 1. ásetir, at kommunur einans kunnu luttaka í vinnulívinum, um teirra virksemi er almannagagnligt og ikki hevur fíggjarligan vinning fyri eyga. Hartil kunnu kommunur eftir stk. 2 seta almenn tiltøk í verk, um hetta er til fyrimuns fyri lokala vinnulívið, meðan stuðul til einstakar persónar ella einstakar fyritøkur ikki má vera givin, uttan so at serstakar orsøkir eru. Síðan kemur sum eitt nýtt krav, at áðrenn eitt kommunustýri setir møgulig tiltøk í verk eftir § 50, skal hetta fráboðast til kommunala eftirlitið.

Við fyrivarni fyri ymiskum háttum at gera av, hvat galdandi rættur er – sí eisini notu 27 omanfyri – so er § 50 í kommunustýrislógini neyvan nógv meira enn ein roynd at skriva niður (kodifisera) longu galdandi fyrisitingarrættarligar- og kommunurættarligar reglur í donsku (og møguliga føroysku) rættarskipanini á óskrivaðum grundarlagi. Lógir hava kortini ikki einans til endamáls at áseta ávísa rættarstøðu, men eisini at orða og bera fram politisk og løglig virði og hugburð.[28] Á henda hátt kann bannið í § 50 móti kommunalum stuðli til einstaklingar og kommunalari luttøku í vinnulívinum sigast at hava verið skilagott, tí henda rættarstøðan er nú greiðari ásett og ikki minst borin fram á ein greiðari hátt enn fyrr, eins og tað politiskt er breið undirtøka fyri, at (kommunu)politisk luttøka í vinnulívinum ikki verður góðtikin á annan hátt enn til tess at skapa generellar karmar.

### 4.4.8 Serstøk fyrisitingarrættarlig rættindi fyri kommunustýrislimir

Sum longu nevnt kunnu fyrireikingarnar til nýggju kommunustýrislógina frá 2000 skiljast sum liður í rættiliga víðfevndu lógarábøtunum, sum fóru fram í Føroyum í kjalarvørrinum á kreppuni í 1990-árunum. Hesar miðaðu serliga ímóti at bøta um vanligu fyrisitingarrættarligu reglurnar, og onkrar slíkar reglur av serligum

28 Sí t.d. Richard H. McAdams, An Attitudinal Theory of Expressive Law, 79 Oregon Law Review, 2000, s. 339ff.

týdningi fyri kommunustýrislimir komu við í uppskotið og seinni samtyktu kommunustýrislógina. Hesar snúgva seg um § 15-17 í nýggju lógini, har t.d. § 16 gevur kommunustýrislimum rætt til sakkøna hjálp í sambandi við málsviðgerð, og § 17, sum gevur kommunustýrislimum ein víðkaðan rætt til innlit í mun til rættin hjá almenninginum eftir lógini um alment innlit.

Av øðrum nýggjum innihaldi í lógini frá 2000 kann eisini nevnast ásetingin í § 37 um staðbundnu, ráðgevandi nevndirnar, ið hava til endamáls at tryggja borgarunum í økinum, har kommunur eru lagdar saman, ein hoyringsrætt í mun til málsøki av lokalum týdningi. Tað er ivasamt, hvussu henda nýskipan hevur virkað, men tað kann verða staðfest, at ikki allar kommunur, ið hava lagt saman við eina ella fleiri kommunur, hava valt at stovna slíkar staðbundnar nevndir.[29]

## 5. Virðini aftanfyri nýggju kommunustýrislógina – nøkur yvirskipað sjónarmið um fólkaræði og deliberatión

Í sambandi við kjak hjá Kjær og Mouritzen, og hugleiðinar um hugsjónarliga grundarlagið aftan fyri danska kommunureformin í 1970, gera Beinta í Jákupsstovu og Eli Kjersem ta niðurstøðu, at somu hugsjónir sum hesar donsku frá umleið 1970 liggja undir føroyska kjakinum um kommunusamanlegging frá 1990- árunum og fram. Talan er um sokallaðu reformteoriina, sum í verki raðfesti effektivar og stórar kommunur fram um fólkaræði í breiðari merking (atlit til umboðan, deliberatión v.m.).[30] Tað er óivað rætt, at í føroyska kjakinum um kommunusamanlegging er spurningurin um kommunalt sjálvræði rættiliga eintýðugt blivin sæddur frá líknandi sjónarhorni sum hjá nevndu reformteoretikarum.

Frá tí tíðini at kommununevndin varð sett í 1996 og fram til dagin í dag, hava næstan ikki onnur sjónarmið verið at sæð í føroyska almenninginum um (um)skipan av kommununum enn slík, sum snúgva seg um kommunala samanlegging til størri og

29 Sí meira um hendan spurningin í 5. kapitli í hesi bók, sum Bjørg Jacobsen hevur skrivað.

30 Jákupsstovu og Kjersem, 2007, s. 8ff.

meira virkisførar kommunur, og desentralisering av uppgávum frá miðstøði til lokalt støði.

At fólkaræðislig virði og atlit til umboðan og møguleikar fyri kjaki (deliberatión) ikki var til umrøðu í sambandi við uppskotið til lógina frá 2000, er talið á kommunustýrislimum gott dømi um. Av forarbeiðnum til nýggju lógina framgongur onki um, hvørji virði ella áhugamál, ið vóru avgerandi fyri talið á kommunustýrislimum. Sum longu nevnt oman fyri snýr tað seg í høvuðsheitum um framhald av somu skipan sum í 1972 við eini høvuðsreglu um 7-17 limir, meðan undantak varð gjørt fyri smáu kommunurnar, so at talið varð 5 fyri kommunur undir 500 íbúgvar og heilt niður í 3 fyri kommunur undir 100 íbúgvar.

Tá sama nevnd, sum gjørdi uppskot til nýggja kommunustýrislóg, eisini gjørdi tilmæli til nýskipan av føroyska kommunubygnaðinum, kundi verið væntandi, at sama nevnd hevði endurskoðað (ella hugsað um) skipanina av kommunustýrunum í sínum uppskoti. Men onki bendir á tað.[31]

Spurningurin um umboðan og tal á kommunustýrislimum í mun til borgaratal hevur nakað við grundleggjandi fólkaræðisspurningar at gera. Tal á kommunustýrislimum er sjálvsagt týðandi fólkaræðisliga á tann hátt, at jú fleiri veljarar eru fyri hvørt valda umboðið, jú verri er umboðanin, og færri nuansir verða umboðaðar.

Ein annar fólkaræðisligur spurningur av eitt sindur meira praktiskum slagi, sum ofta verður havdur frammi í hesum sambandi, er spurningurin um fólkaræðisliga luttøku. Luttøka í lokalum umboðsstovnum sum kommunustýrinum hevur søguliga verið fatað sum ein týdningarmikil skúling og venjing í fólkaræði.[32] Kritikkur hevur verið settur móti hesi fatan fyri at hava ein feril av paternalistiskum

---

31 Sambært samrøðu við Hilmar Høgenni, deildarstjóra á Kommunudeildini í Løgmálaráðnum og formann í Kommununevndini sum orðaði upprunaliga uppskotið til nýggju kommunustýrislógina, august 2008, vóru fólkaræðislig atlit einans tikin við í sambandi við greinina um staðbundnu nevndirnar í § 37 í lógini.

32 Sí Kjellberg 1995, s. 44-45, Sharpe 1970, s. 161, og Jákupsstovu og Kjersem 2007, s. 17-19.

grundarlagi.[33] Sagt kann verða í semju við henda kritikk, at út frá tí fatan, at (fólkaræðislig) virði eru subjektiv – og tá fólkaræðisligur legitimitetur tískil ikki kann vera grundaður á vitan ella førleika – so er ivasamt, hvussu rímiligt tað er at fata kommunustýrið sum fólkaræðisliga venjingarlegu.

Hóast henda prinsipiella kritikk, so er tað kortini ivaleyst so, at eitt vælvirkandi og nútímans fólkaræði hevur tørv á einum ávísum tali av borgarum, ið duga mannagongdir og siðvenjur á politiska leikvøllinum, og í henda mun er tað ein missur, um samanlagda talið á fólkavaldum fellur.

Í mun til hesi yvirskipaðu fólkaræðisligu viðurskifti, kann spurningurin verða settur, hví álitið frá føroysku kommununevndini frá 1998 ikki viðgjørdi spurningin um umboðan, og vandan við, at kommunusamanleggingar – uttan tillagandi broytingar í kommunustýrislógini – bera við sær fall í talinum av kommunupolitikarum fyri hvønn borgara.

Hóast spurningurin um umboðan í framtíðini mest kemur at verða áhugaverdur í mun til størri kommunur[34], so er eisini orsøk til at finnast at umboðanini og samansetingini av kommunustýrunum í smáu kommununum eftir nýggju lógini. Til ber sjálvandi at mæla ímóti størri umboðan í smáu kommununum og vísa til, at fyri kommunur undir 100 borgarar vil ein umboðan á 3 ikki vera ring umboðan, eins og ein umboðan á 5 kommunustýrislimir lutfalsliga

33 Sí Sharpe 1970, s. 162, um henda kritikk. Paternalisma skal í hesum sambandi skiljast sum ein autoriterur og „faðirligur" hugburður, sum metir borgararnar hava fyri neyðini at verða skúlaðir ella uppaldir til at duga at luttaka í politisku skipanini.

34 Hetta sjálvsagt tí at framtíðin orsakað av líknandi virðum sum liggja aftan fyri nevndu reformteori, ikki fer at síggja eins nógvar smáar føroyskar kommunur, og við vissu ikki so smáar kommunur, at talið verður so lítið sum 100 íbúgvar. Kortini er enn nakað av generellum áhuga í hesum hugleiðingum um støðd á samkomu, serliga tí at sambært § 29, stk. 2, 2. pkt., í verandi kommunustýrislóg skal talið á nevndarlimum vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum. Hetta merkir, at kommunustýri so stór sum upp í 9 limir einans kunnu seta nevndir við 3 umboðum, eins og enn størri kommunustýri enn hetta hava frítt at seta 3 manna nevndir, um tær hava hug til tess.

heldur ikki vil vera ein ring umboðan. Slík umboðan vil lutfalsliga vera betri enn umboðanin í flestu kommununum við frælsi at velja millum 7 og 17 kommunustýrislimir.

Hinvegin kunnu politiskar eindir og politisk samfeløg ikki verða fatað í mun til talfrøðiligar grundreglur. Ein lutfalsliga sæð betri umboðan verður kortini ítøkiliga ein ov vánalig umboðan, so hvørt sum politiska eindin verður minni. Sum lýst nærri niðan fyri eru eisini onnur viðurskifti enn sjálv umboðanin av áhugamálum og virðum, sum hava við sær at ein ov lítil umboðan er óheppin og avmarkandi fyri frælst kjak og deliberatión.[35] Veruleikin er eisini í trá við hetta sjónarmið, tí í mun til lóggevandi tingini í ymisku londunum er tað so, at tinglimatalið víst økist við øktum fólkatali, men kortini í einum minni lutfalli, so at tendensurin er, at einstaki tingmaðurin umboðar fleiri borgarar, jú størri politiska eindin verður.[36]

Amerikanski løgfrøðingurin og ástøðingurin innan deliberativu greinina av fólkaræði, Cass R. Sunstein, hevur viðgjørt spurningin um ymiskar faktorar, ið ávikavist fremja og avmarka politiskt kjak og deliberatión í bólkum av fólki.[37] Hansara boðskapur er, at tað er sera týðandi, at so ymisk áhugamál og politisk sjónarmið sum møguligt eru umboðað í viðkomandi *forum*. Boðskapurin er tvítáttaður. Á tí eini síðuni er tað sera trupult fyri limir í smáum nevndum, t.d.

---

35 Sí longu klassisku umrøðuna um umboðan í The Federalist Papers, No. 55 (Madison) s. 310: „Nothing can be more fallacious than to found our political calculations on arithmetical principles"… og „The truth is, that in all cases a certain number at least seems to be necessary to secure the benefits of free consultation and discussion, and to guard against too easy a combination for improper purposes."

36 Sí Dahl og Tufte 1973, s. 80-84. Hóast Dahl og Tufte vísa til lóggávutingini í statum, so er neyvan orsøk til at halda, at hesi viðurskiftini skuldu verið øðrvísi fyri umboðandi samkomurnar fyri aðrar politiskar eindir, so sum kommunustýri eru fyri kommunur.

37 Kanningin hjá Sunstein er generell, men í mun til spurningin um (ov) lágt tal av limum í samkomum er hon serliga grundað á deliberatión millum dómarar. Kortini kunnu mong av hansara úrslitum eisini í tí føri sammetast við kollegialar/politiskar myndugleikar so sum kommunustýri. Í hvussu er er hetta galdandi í tann mun og í slíkum málum, at dómarar hava eitt ávíst rásarúm í málum, har rættarstøðan ikki er greið, og úrslitið vil verða merkt av teirra politiska og hugsjónarliga førningi og fatan.

dómstólum við 3 limum, at fara í minniluta (dissentiera), tí hetta hevur ov høgan sosialan kostnað við sær fyri viðurskiftini til starvsfelagarnar. Tí verður minnilutin í stóran mun „noyddur" at vera samdur við meirilutanum. Hinvegin vil kortini, hóast tað er ringt at vera í minniluta, ein minniluti í sjálvt heilt smáum kollegialum samkomum hava við sær, at meirilutin verður ávirkaður, so at hann fæst at mýkja síni annars víðgongdu sjónarmið.

Í mun til kommunustýri er henda kanning sjálvsagt viðkomandi á tann hátt, at tess færri limir eru, tess truplari gerst dissensur og kjak (ella deliberatión), tá limirnir av sosialum orsøkum verða noyddir til semju.[38] Spurnarkanningin hjá Jákupsstovu og Kjersem 2008 stuðlar í ávísan mun hesi fatan, at talið 3 ikki er nøktandi, tí uml 60 % av teimum spurdu frá heilt smáu kommunustýrunum við 3 limum meintu, at hesi kommunustýri hava verið ov smá.[39]

Samrøðurnar hjá undirritaða benda eisini á, at eitt tal á 3 limir er óheppið. Vanliga myndin er hon, at minnilutin í hesum kommunustýrum sigur frá eini støðu, har teirra einastu valmøguleikar hava verið fullkomin semja í politisku leiðini hjá hinum báðum limunum, meðan tað sum líkist sjálvstøðu, fyri ikki at nevna veruligan dissens, er endað í eini politiskari støðu, har viðkomandi systematiskt er vorðin mótarbeiddur ella avbyrgdur. Talið 5 kann eisini vera trupult lágt, men í tí føri er kortini møguligt at vera í minniluta saman við einum „starvsfelaga", og tí er støðan ein onnur.[40]

Út frá nevndu sjónarmiðum er orsøk til at vera kritiskur yvirfyri,

38 Sí Sunstein 2003, serliga kap. 8 við s. 186-87, og m.a. kritikki av domstólum við einans 3 limum.

39 Sí Jákupsstovu og Kjersem 2008, s. 76. Kortini er áhugavert, at hóast meira prinsipiellar fólkaræðisligar ivar, ið kunnu verða førdir fram móti ov lítlari umboðan í kommunustýrunum, so vísir kanningin, at politikararnir í øðrum enn heilt smáu kommununum sum heild hava verið nøgdir við støddina á kommunustýrinum.

40 Sambært Sunstein 2006, s. 66ff. bíður tað flestu fólki ímóti at vera einsamøll í minniluta. Sama fatan fekst frá samrøðu í november 2007 við Jógvan Edmund í Geilini, bygdaráðslim og fyrrverandi borgarstjóra í Svínoy, og Amaliu í Frammistovu, bygdarráðslim í Fugloy. At ónøgd hevur verið við lækkaða talið av kommunustýrislimum frá 5 til 3 er eisini stuðlað á samrøðu við fyrrverandi skrivaran í Føroya Kommunufelag, Jens Marius Dalsgaard, í oktober 2007.

at tað í sambandi við broytingina av kommunustýrislógini í 2000 var hildið áfram við so smáum kommunustýrum sum 5 limum, ið enntá varð minkað niður í 3 limir fyri kommunur við upp til 100 íbúgvar. Hesin partur av endurskoðanini í 2000 lýsir væl at broytingin í 2000 sum heild var grundað á virðir sum effektivitet, meðan atlit ikki vórðu tikin til spurningar um umboðan ella møguleikanum fyri kjaki og deliberatión.

Í mun til fólkaræðisliga spurningin um møguleikar fyri kjaki og deliberatión eru eisini sjónarmið, sum tey lýstu omanfyri, ið stuðla rákinum burtur frá smærri og móti størri kommunum og harvið kunnu sáa iva um tilverugrundarlagið hjá smæstu føroysku kommununum. Sum dømi kann verða nevndur borgarstjórin í so mikið stórari kommunu sum Húsavík, sum segði frá í samrøðu við undirritaða, at tað sum heild kendist ódámligt at seta mál til atkvøðugreiðslu í teirra kommunustýri, og at tað bara var í onkrum hendinga føri at mál yvirhøvur vórðu sett til atkvøðu. Í flestu førum skiltu limirnir á lagnum, um undirtøka var fyri ella ikki, og tí var ikki neyðugt við formligari atkvøðugreiðslu. Orsøkin til at tað var ódámligt at seta mál til atkvøðu var sambært borgarstjóranum, at tað illa bar til at liva saman í so lítlum samfelag uttan semju í týðandi málum.[41] Helst kenna nógv frá líknandi bygdasamfeløgum seg aftur í hesum, og lýsir hetta væl, hvussu trupult tað er at fáa kjak og fólkaræði at virka í einum so lítlum samfelag.

## 6. Neyv donsk fyrimynd fyri føroyskari (kommunustýris)lóg

Sum heild er at siga um lóggávuarbeiðið við nýggju kommunustýrislógini, at tað sum føroysk lóggáva annars er nógv merkt donsku fyrimyndini.

Nýggja kommunustýrislógin er merkt av, at uppskotið til tekstin í føroysku lógini antin beinleiðis hevði samsvarandi donsku lógargreinina sum fyrimynd, og/ella at viðmerkingarnar til tilsvarandi greinar í donsku kommunustýrislógini vórðu nýttar sum fyrimynd.[42]

41 Samrøða við Hanus undir Leitinum, borgarstjóra, mai 2008.

42 Samrøða við Hilmar Høgenni og Eyðbjørn Larsen, fyrrverandi fulltrúa á lógardeildini í Løgmálaráðnum, august 2008.

Um danskur lógartekstur ella viðmerkingar vóru fyrimynd, so er úrslitið tað sama, nevniliga at lógin innihaldsliga neyvt heldur seg til samsvarandi donsku lógina.

Hóast nýggja kommunustýrislógin frá 2000 á henda hátt hevur donsku lógina sum fyrimynd, so er hetta kortini ikki nevnt í viðmerkingunum til lógaruppskotið. Talan er her um sama hugburð sum tann vanliga, at latið verður sum um føroysk lóggáva er meira sjálvstøðug, enn hon í veruleikanum er. Á ein ella annan hátt hevur sjálvsfatan føroyinga tað ikki gott við, at neyðugt er at styðja seg til onnur í sambandi við grundleggjandi lóggávuarbeiði. Tað er skiljandi, at so er í mun til meira politisk element í lógini, men annars átti onki løgið at verið í, at størri lógarskipanir verða yvirtiknar av einum minni og orkufátækari løgdømi sum tí føroyska. Slík lán av lógarskipanum eru søguliga vanlig fyri alt Europa og innanhýsis millum nógv størri samfelag enn Føroyar. Í mun til grundleggjandi lógarskipanir – serliga á privatrættarliga økinum, men víst eisini fevnandi um fyrisitingarrætt og harvið eisini kommunustýrisrætt – er ofta so, at tað krevur langa tíð og ávísa støðd, áðrenn samfelagið er ført fyri at kunna menna slíkar á sjálvstøðugari grund.[43]

Føroyar eru so smáar, at potentialið er neyvan fyri teimum royndum og reflektiónum, ið skulu til fyri sjálvstøðugt at menna grundleggjandi lógarskipanir. Í teimum londum, har hetta er møguligt, er tað gjøgnum annað slag av fólkaræði enn deliberatión í tingsamkomum, at hesar reglur og skipanir verða mentar. Sjáldan hava lóggávutingini aðra rollu enn eftirfylgjandi at viðtaka longu galdandi reglur sum lógir fyri á tann hátt at røkta ta lógpositivistisku fatan, at hesi lóggávuting eru alvaldandi samfelagsstovnar.

Í hesum ljósi áttu føroyingar at lagt tvílyndið av sær og meira óskammaðir – bæði í mun til kommunustýrislógina og meira generelt – at viðurkent tað neyðuga í at styðja seg til onnur í lóggávuarbeiði.

43 Sí Alan Watson, „Legal Evolution and Legislation", Brigham Young University law Review, Vol. 1987, s. 353ff., har lýst verður serliga í privatrættarligum ljósi, hvussu lítið lóggávuvaldið ofta er ment at hava av sjálvstøðugari ávirkan á galdandi rætt. Hesi sjónarmið kunnu í stóran mun flytast yvir á rættarviðuskiftini, ið fyrisitingarlóg og kommunustýrislóg regulera.

Kortini var ikki neyðugt altíð bara at havt tað eina landið, Danmark, sum fyrimynd, eins og eitt sindur meira av sjálvstøðu ikki hevði gjørt skaða í mun til meira politiskt kend element í lóggávuni.

**Niðurstøða**

Í hesum kapitli er yvirskipað greitt frá um innihaldið í og bakstøði fyri nýggju kommunustýrislógini, sum varð samtykt í 2000 sum úrslit av tí útgreiningararbeiði og lógaruppskoti, sum Kommununevndin frá 1996 lat í sínum endaliga áliti á heysti 1998.

Tilmælið hjá Kommununevndini í álitinum frá 1998 snúði seg serliga um greiðari ábyrgdarbýti millum land og kommunur við størri og meira virkisførum kommunalum eindum. Hesi vóru tey berandi virðini í tilmælinum frá Kommununevndini. Hesi virði blivu tó ikki endurspeglað í nýggju lógini á annan hátt enn, at tað onkrar staðir vóru smærri tekin um greiðari ábyrgdarbýti. Dømi um hetta er serliga avtøkan av góðkenningarskipanini hjá landsstýrinum í mun til lántøku og keyp og sølu av fastari ogn. Men at landsstýrið á henda hátt á onkrum øki misti eftirlitismyndugleika kom so at siga kommununum aftur um brekkur við, at eftirlitið varð styrkt á øðrum økjum, so sum kravinum um alment útboð av føstum ognum og bann at taka upp lán uttan loyvi úr landsstýrinum, tá kommunur skylda meira enn eina álíkning.

Av høvuðsbroytingum í lógaruppskotinum og seinni lógini kann verða nevnd ein generell styrking av kommunalu fyrisitingini, serliga við eini uppraðfesting av borgarstjóraembætinum og eini betran av starvstreytunum hjá kommunustýrislimunum og teirra rættindum í mun til umsitingina.

At ráðandi virðini hjá Kommununevndini, sum gjørdi álitið við nýggja uppskotinum til kommunustýrislóg, í høvuðsheitum snúðu seg um at fáa eitt effektivari kommunustýri, meðan atlit til fólkaræði í breiðari merking hevði minni áhuga, sæst best við tí týðiligu fráveru av viðgerð av ella hugleiðingum um umboðan og onnur fólkaræðislig viðurskifti.

Sum heild var uppskotið og seinna kommunustýrislógin ikki nógv meira enn ein yvirtøka við ávísum tillagingum til føroysk viðurskifti av danskari kommunustýrislóg og viðmerkingum til somu donsku

lóg. Lætt kann vera at finnast at slíkum lóggávuarbeiði fyri at vera ov lítið sjálvstøðugt, og slíkur kritikkur hevur kanska ein ávísan rætt í mun til meira politisku og prinsipiellu fólkaræðisligu partarnar av lógaruppskotinum. Umframt hetta er kortini neyvan annað væntandi enn neyva danska fyrimyndin, sum eyðkennir føroyskt lóggávuarbeiði sum heild og kanska rímiliga tað, tá hugsað verður um avmarkingarnar, ið okkara lítla løgdømi setir fyri sjálvstøðugt at menna størri lógarskipanir.

# 5

# Staðbundnar nevndir

*Bjørg Jacobsen:*

Hesin kapittul er um staðbundnar nevndir. Í føroyskum høpi og í núverandi líki er ein staðbundin nevnd eitt lutfalsliga nýtt demokratiskt organ. Ein partur av samanleggingarsáttmálunum í summum kommunum, sum løgdu saman um aldarskiftið, var skipan av slíkum nevndum. Uppgávan hjá staðbundnu nevndunum er at veita kommununi ráðgeving um mál viðvíkjandi útjaðara- ella lokaløkjunum í kommununi.

Í skrivandi stund eru 13 staðbundnar nevndir í fýra ymiskum kommunum í Føroyum. Tær fyrstu tvær, Kaldbaksnevndin og Hvítanesnevndin, blivu stovnaðar í 1970unum. Í nógv ár vóru hesar báðar einastu staðbundnu nevndirnar. Í kjalarvørrinum av aldarskiftinum, tá viljin til kommunusamanlegging vaks, komu fleiri staðbundnar nevndir. Í 2001 blivu tvær staðbundnar nevndir stovnaðar, og í 2005 komu níggju aftrat. Við kommunusamanleggingunum í framtíðini fara væntandi fleiri nevndir at verða stovnaðar. Niðanfyri verður greitt frá staðbundnu nevndarskipanini: Hvørji øki hava staðbundnar nevndir, hvørji umboða nevndirnar, og hvussu tær arbeiða. Til seinast verður staðbundna nevndarskipanin mett úr einum lokaldemokratiskum perspektivi.

### 5.1 Teoretiskt útgangsstøði

Ein kommuna er eitt geografiskt avmarkað umráði, og hon er eisini ein politiskur stovnur, sum loysir ásettar felags uppgávur fyri borgararnar í kommununi. Kommunan verður stýrd av umboðum fyri borgararnar í økinum. Spurningurin er so, hvat tað er, sum bindir eina kommunu saman í eina eind. Hví eru júst hesar bygdir í felags kommunu, og hví er handan bygdin í kommunu fyri seg

sjálva? Rose og Ståhlberg[1] nevna fýra perspektiv, ið kunnu forklára, hvat fær fólk at identifisera seg við eina geografiskt avmarkaða kommunu. Í fyrsta lagi kann forkláringin vera genetiskt: kommunumarkið er søguligt – soleiðis hevur tað verið frá gamlari tíð. Íbúgvarnir eru føddir inn í felagsskapin og blivnir partur av honum. Í øðrum lagi kann forkláringin vera sosial-psykologisk: identifikatiónin við eitt geografiskt definerað umráði hongur saman við teimum sosialu bondunum millum íbúgvarnar. Í triðja lagi er ein kontekstuel forklároing: íbúgvarnir identifisera seg við umráðið, tí teir eru stoltir av tí, t.d. mentanini ella náttúruni. Í fjórða lagi kann forkláringin vera rationel: identifiseringin er ein avleiðing av, at íbúgvarnir her fáa uppfylt síni persónligu ynskir og krøv. Tey fyrstu trý perspektivini líkjast við tað, at tey leggja dent á tey sosialu bondini millum íbúgvarnar. Við tíðini veksur ein natúrlig felagskensla og felags áhugamál millum fólk, sum búgva í sama umhvørvi. Tann rationella forkláringin byggir ikki so nógv á týdningin av hesum sosialu bondunum.

Frazer[2] grundgevur fyri, at tað ikki fyrst og fremst er tann *sosiali* felagsskapurin, men tann *lokali,* sum hevur týdning. Við betri flutnings- og samskiftismøguleikum eru fólk ikki longur bundin til tað lokala umhvørvið á sama hátt sum fyrr. Tað er vanligt at arbeiða, keypa inn, íðka frítíðarítriv og at hava vinir og familju uttan fyri lokaløkið, og eisini kunnu mong ørindi avgreiðast á internetinum. Nógv sosial bond eru sostatt ikki longur lokal. Hinvegin eru eisini nógv fólk minni flytbar og meira staðbundin. Børn, ungfólk, gomul, barnafamiljur osfr. eru meira knýtt at einum geografiskum umráði stórar partar av lívinum. Umráðið, tey búgva í, má tískil geva teimum høvi til arbeiði, frítíð og luttøku annars. Fólk eru bundin hvør at øðrum sum grannar, um teimum dámar tað ella ei. Offerdal[3] vísir

1 Rose, Lawrence og Ståhlberg, Krister (2000): Municipial Identifiction and Democratic Citizenship: A Finnish-Norwegian Comparision í Lauri Karvonen and Krister Ståhlberg (eds.) Åbo. Åbo Akademisk Förlag

2 Fraser, Elizabeth (1999): The Problems of Communitarian Politics. Unity and Conflict. Oxford: Oxford University Press.

3 Offerdal, Audun (2007): Lokalstyreinndeling: administrativ effektivitet og sosiale realiteter. Framløga, kommunuseminar í Tórshavn 21. juni 2007.

á, at ein týðandi síða við einum slíkum lokalum felagsskapi er, at hann ikki uttan víðari verður stýrdur av felags normum og virðum. Tvørturímóti eru ofta ósemjur millum fólk, sum búgva tætt saman. Fyri at gera tað liviligt kortini eru politiskir stovnar skaptir. Hesir hava til uppgávu at fyribyrgja og handfara møguligar ósemjur. Tann politiski stovnurin er í hesum føri kommunan.

Prosessin við samanlegging av kommunum kemur ivaleyst at skapa nýggjar felagsskapir, meðan aðrir fara at hvørva. Somuleiðis kann væntast, at summi ósemjumál hvørva, meðan nýggj koma undan kavi. Men hví er valt sum loysn at býta valdið millum land og kommunur? Í klassiskum teorium um lokalt sjálvstýri verður hetta grundgivið við trimum virðum: demokrati, autonomi og effektivitetur. Eitt fullborið nationalt demokrati má eisini vera til staðar lokalt, nevniliga sum fólkastýri í gerandisdegnum. Lokalt demokrati ger demokratiska hugtakið meira fjølbroytt. Lokalt demokrati er sostatt eisini eitt virði í sær sjálvum. Lokalt demokrati kann roknast sum ein „nyttugur" skúli í demokrati og sum ein fyrireiking til luttøku í einum størri demokratii, nevniliga tí nationala. Luttøkudemokratiið kann kanska íbirta og halda uppi einum góðum sirkuli: jú fleiri fólk, ið fáa høvi at luttaka í avgerðarprosessunum, jú fleiri fáa hug at koma uppí, og sostatt verða fleiri skúlað í demokratiskum arbeiði. Tvs. tess fleiri, tess betri og fjølbroyttari demokrati. Autonomi-hugtakið merkir, at teir lokalu stovnarnir mugu hava eitt ávíst sjálvstøði í mun til ta størru politisku skipanina. Uttan slíkt sjálvstøði er sjálvstýrið ikki veruligt. Effektivitets-hugtakið undirstrikar, at almennar uppgávur í lokaløkinum verða loystar meira effektivt, tá tey staðkendu kunnu vera við og ávirka, hvussu uppgávurnar verða loystar. Hesi trý hugtøkini – demokrati, autonomi og effektivitetur – kunnu møguliga koma í andstøðu hvørt við annað. Demokratiið kann darva effektiviteti, t.d. um prosessirnar blíva ov langdrignar. Idealið er kortini, at hesi trý hugtøkini stuðla hvør øðrum í einum góðum sirkuli: Lokalt autonomi er ein treyt fyri lokalum demokratii. Lokalt demokrati er ein drívmegi fyri lokalan effektivitet. Minkandi autonomi merkir minni pláss fyri lokalum prioriteringum, sum aftur minka um plássið fyri lokalum demokratii. Um minni pláss er fyri lokalum prioriteringum, verður tað minni hugaligt hjá veljarunum at luttaka í lokalum valum og at

luttaka á annan hátt. Autonomi er sostatt eitt grundleggjandi virði í lokala sjálvstýrinum. At styrkja um lokala autonomiið skapar ein góðan sirkul, meðan ein minking av lokalum autonomii ber við sær tað øvugta[4]. Í hesum kapituli verða hesi trý hugtøkini – demokrati, effektivitetur og autonomi – brúkt sum grundarlag at meta um staðbundnu nevndirnar sum lokaldemokratisk organ[5].

Eitt er demokrati, eitt annað er politikkur, kortini hanga hesi hugtøkini saman. Nógvar teoriir eru um politikk, og her er relevant at skilja ímillum eitt aggregativt og eitt integrativt perspektiv á ta politisku prosessina. Úr aggregativa perspektivinum verður politikkur fataður sum ein málrættað handling, og fokus er á, hvussu individuel áhugamál verða framd best møguligt. Tað integrativa perspektivið leggur meira dent á samskifti til felags frama og at binda borgararnar saman í ein politiskan felagsskap[6]. Talan er um tvey ymisk sjónarmið, sum hvør í sínum lagi reindyrka ávís eyðkenni við demokratiprosessum. Í tí praktiska gerandisdegnum eru hesi bæði ofta meira ella minni samanflættað. Tað er ikki altíð lætt at skilja ímillum, men í okkara føri leggja vit meira dent á tað integrativa perspektivið: Í hvønn mun eru staðbundnu nevndirnar við til at styrkja tað lokala demokratiið?

## 5.2 Metoda og datagrundarlag

Tað er ikki nógv skrivligt tilfar til um staðbundnu nevndirnar og teirra arbeiði. Henda kanning byggir á gerðabøkur frá nevndarfundum 2005-2007[7], interviews við nevndarumboð í staðbundnu nevndunum valskeiðið 2004-2008, interviews við borgarstjórarnar í teimum fýra kommununum við staðbundnum nevndum og interviews við fólk í umsitingini. Haraftrat eru interviews gjørd við umboð fyri felagið „Bygdabjarging" í Kollafirði og við einstøk fyrrverandi staðbundin nevndarumboð. Umframt borgarstjórarnar sita tríggir limir úr lokaløkjunum og ein úr kommunustýrinum. Sostatt eru fimm í hvørjari

4 Sharpe, L. J. (1970): Theories and Values of Local Government. Political Studies XVIII: 153-174.
5 Effektivitetin verður tó bara mett um í avmarkaðum umfari.
6 March, J. & Olsen, J.P. (1989): Rediscovering Institutions. N.Y.: The Fress Press
7 Fyri Kaldbak, Hvítanes, Árnafjørð og Kollafjørð: 2001-2007.

nevnd. Umframt borgarstjórarnar eru interviews bara gjørd við tey nevndarumboð, sum umboða lokaløkini. Í teimum 13 nevndunum sita í alt 39 umboð úr lokaløkjunum. Interviews eru gjørd við tvey ella trý umboð úr hvørjari nevnd. Eitt undantak er, har tað bara er eydnast at fáa orð á eitt nevndarumboð. Tilsamans eru 28 av teimum 39 interviewað, svarandi til 72%. Interviewini eru 1-2 tímar til longdar. Kanningin er avmarkað til valskeiðið 2004-2008; í ávísum førum eru tøl frá valskeiðnum 2000-2004 tó tikin við.

### 5.3 Hvat er ein staðbundin nevnd?

Í § 37 í kommunustýrislógini[8] stendur:

> Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum.
>
> Stk. 2. Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan.
>
> Stk. 3. Val av staðbundnum umboðum fer fram sama dag og eftir somu reglum, sum val fer fram til kommunustýrið við teimum avvikum, ið umstøðurnar krevja, sbr. stk. 4.
>
> Stk. 4. Nærri reglur um samanseting, manning og hoyringarmannagongd skulu verða ásettar í kommunustýrisskipanina. Eisini verða í kommunustýrisskipani settar neyvari reglur um neyðug frávik frá kommunuvallógini viðvíkjandi valbæri, valrætti v.m.
>
> Stk. 5. Kommunustýrislimur kann ikki samstundis vera staðbundið umboð.

Í viðmerkingunum til lógina stendur m.a.:

> Ásetingin í stk. 1 um møguleikan at seta staðbundnar nevndir hevur sítt støði í fyrilitinum fyri at útinna eitt munadygt, staðbundið fólkastýri. Hevur kommunustýrið samtykt at seta eina staðbundna nevnd, skal nevndin hoyrast, áðrenn avgerð verður tikin í málum,

8 Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

> sum hava við staðbundna økið hjá viðkomandi nevnd at gera, sambært. stk. 3.

Undantikið kravið um, at staðbundnu nevndarumboðini altíð skulu eiga meirilutan, ásetir lógin einki mark fyri nevndarlimatali annars. Í viðmerkingunum til kravið um meirilutan stendur soleiðis:

> Henda lágmarksverndarregla skal veita trygd fyri endamáli nevndarinnar, sum er at fremja og styrkja tað staðbundna fólkastýri.

Tær fýra kommunurnar við staðbundnum nevndum hava allar valt at manna nevndirnar við fimm limum. Sum nevnt verða tríggir valdir millum tey og av teimum við føstum tilhaldi í bygdini. Kommunustýrið velur ein, og fimti limurin er borgarstjórin, ið altíð er føddur formaður. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til kommunustýrið, og valskeiðið er fýra ár. Sambært kommunustýrisskipanunum skulu staðbundnu nevndirnar vegleiða, ummæla og gera tilmæli til kommunustýrið í málum viðvíkjandi bygdini. Staðbundnu nevndirnar hava sostatt ongan avgerðarrætt. Tær hava heldur einki fíggjarligt tilfeingi at ráða yvir.

## 5.4 Hvørji hava staðbundar nevndir?

**Talva 5.1: Yvirlit yvir staðbundnar nevndir (2008)**

| Stovnað | Tórshavnar kommuna | Klaksvíkar kommuna | Runavíkar kommuna | Sørvágs kommuna |
|---|---|---|---|---|
| 1974 | Kaldbaksnevndin | | | |
| 1978 | Hvítanesnevndin | | | |
| 2001 | Kollafjarðar-nevndin | Árnafjarðar-nevndin | | |
| 2005 | Hest/Kolturs-nevndin<br>Nólsoyarnevndin<br>Velbastaðar/Kirkjubønevndin | Mikladals-nevndin<br>Trøllanes-nevndin | Elduvíkar-nevndin<br>Oyndarfjarðar-nevndin<br>Skálanevndin | Mykines-nevndin |

Niðanfyri eru yvirlit yvir fólkatalið í bygdunum í Tórshavnar, Klaksvíkar, Runavíkar og Sørvágs kommunu, og yvir tal á umboðum í kommunustýri og í staðbundnum nevndum.

**Talva 5.2: Bygdir í Tórshavnar kommunu. Fólkatal, umboð í kommunustýri og í staðbundnum nevndum. Januar 2007[9]**

| | Íbúgvatal | Umboð í kommunustýri | Staðb. Nevnd | Umboð í staðb. nevnd |
|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 12.193 | 9 | Nei | - |
| Hoyvík | 3.133 | 3 | Nei | - |
| Argir | 1.907 | 1 | Nei | - |
| Kollafjørður | 817 | 0 | Ja | 2 |
| Nólsoy | 252 | 0 | Ja | 3 |
| Kaldbak | 217 | 0 | Ja | 3 |
| Velbastaður | 186 | 0 | Ja | 2 |
| Signabøur | 157 | 0 | Ja | 1 |
| Hvítanes | 93 | 0 | Ja | 3 |
| Kirkjubøur | 75 | 0 | Ja | 1 |
| Oyrareingir | 42 | 0 | Ja | 0 |
| Hestur | 34 | 0 | Ja | 2 |
| Norðadalur | 14 | 0 | Nei | - |
| Kaldbaksbotnur | 7 | 0 | Ja | 0 |
| Syðradalur | 7 | 0 | Nei | - |
| Sund | 3 | 0 | Ja | 0 |
| Koltur | 2 | 0 | Ja | 1 |
| I alt | 19.139 | 13 | - | 18 |

9 Kollafjørður, Signabøur og Oyrareingir vóru til 2005 felags sjálvstøðug kommuna og hava nú felags staðbundna nevnd.
Kaldbak, Kaldbaksbotnur og Sund løgdu í 1974 saman við Tórshavnar kommunu og hava síðan havt felags staðbundna nevnd.
Kirkjubøur og Velbastaður vóru til 2005 felags sjálvstøðug kommuna og hava nú felags staðbundna nevnd.

**Talva 5.3: Bygdir í Klaksvíkar kommunu.**
**Fólkatal, umboð í kommunustýri og í staðbundnum nevndum.**
**Janaur 2007**

| | Íbúgvatal | Umboð í kommunustýri | Staðb. Nevnd | Umboð í staðb. Nevnd |
|---|---|---|---|---|
| Klaksvík | 4.666 | 10 | Nei | - |
| Norðoyri | 83 | 0 | Nei | - |
| Árnafjørður | 53 | 1 | Ja | 3 |
| Mikladalur | 41 | 0 | Ja | 3 |
| Trøllanes | 27 | 0 | Ja | 3 |
| Ánir | 16 | 0 | Nei | - |
| Tils. | 4.886 | 11 | - | 9 |

**Talva 5.4: Bygdir í Runavíkar kommunu.**
**Fólkatal, umboð í kommunustýri og í staðbundnum nevndum.**
**Januar 2007**[10]

| | Íbúgvatal | Umboð í kommunustýri | Staðb. Nevnd | Umboð í staðb. nevnd |
|---|---|---|---|---|
| Saltangará | 860 | 3 | Nei | - |
| Skáli | 657 | 2 | Ja | 3 |
| Runavík | 470 | 2 | Nei | - |
| Glyvrar | 407 | 1 | Nei | - |
| Søldarfjørður | 351 | 1 | Nei | - |
| Rituvík | 268 | 1 | Nei | - |
| Oyndarfjørður | 161 | 0 | Ja | 3 |
| Lambi | 145 | 1 | Nei | - |
| Skálabotnur | 100 | 0 | Ja | 0 |
| Æðuvík | 100 | 0 | Nei | - |
| Innan Glyvur | 77 | 0 | Nei | - |
| Funningsfjørður | 64 | 0 | Ja | 2 |
| Skipanes | 55 | 0 | Nei | - |
| Elduvík | 30 | 0 | Ja | 1 |
| Lambareiði | 10 | 0 | Nei | - |
| Íalt | 3.755 | 11 | - | 9 |

10 Elduvík og Funningsfjørður vóru til 2005 felags sjálvstøðug kommuna og hava nú felags staðbundna nevnd.
Skáli og Skálafjørður vóru til 2005 felags sjálvstøðug kommuna og hava nú felags staðbundna nevnd.

**Talva 5.5: Bygdir í Sørvágs kommunu.**
**Fólkatal, umboð í kommunustýri og í staðbundnari nevnd.**
**Januar 2007**

| | Íbúgvatal | Umboð í kommunustýri | Staðb. Nevnd | Umboð í staðb. nevnd |
|---|---|---|---|---|
| Sørvágur | 966 | 6 | Nei | - |
| Bøur | 71 | 1 | Nei | - |
| Mykines | 19 | 0 | Ja | 3 |
| Gásadalur | 15 | 0 | Nei | - |
| Tils. | 1.071 | - | - | 3 |

Sum sæst á talvunum 2, 3, 4 og 5 tykist geografisk frástøða frá megin-kommununi í ávísan mun at avgera, um ein bygd hevur staðbundna nevnd ella ikki. Men undantøk eru: Norðadalur liggur t.d. 13 km frá Tórshavn og hevur onga staðbundna nevnd, meðan Hvítanes, sum liggur skamt frá Tórshavn og Hoyvík, hevur staðbundna nevnd. Fólkatalið í bygdunum sær heldur ikki út til at vera avgerandi fyri, um bygdin hevur staðbundna nevnd ella ei. Tað er heldur ikki avgerandi, um bygdin hevur umboð í kommunustýrinum. T.d. hava Skáli og Árnafjørður ávvikavíst tvey og eitt umboð í kommunustýrinum, og haraftrat staðbundna nevnd. Kollafjørður hevur staðbundna nevnd, men einki kommunustýrisumboð. Bøur hevur eitt kommunustýrisumboð, men onga staðbundna nevnd, og Norðoyri hevur hvørki. Summar bygdir hava altso antin staðbundna nevnd ella kommunustýrisumboð, aðrar hava bæði, og aftur aðrar hava hvørki.

Felags fyri staðbundnu nevndirnar er, at tær eru stovnaðar fyri bygdir, sum hava verið sjálvstøðugar kommunur ella partar av slíkum, og sum síðan hava lagt saman ella eru fluttar í aðra kommunu, har tær geografiskt meira ella minni eru útjaðarar. Einasta undantak er Árnafjørður, sum síðan 1908 hevur verið partur av Klaksvíkar kommunu. Efir áheitan frá borgarum í Árnafirði fekk bygdin eina staðbundna nevnd í 2001. Øvugt hava ikki allar bygdir, sum hava lagt saman, fingið staðbundna nevnd. Hoyvík bleiv flutt úr

Tórshavnar uttanbíggjar sóknar kommunu í Tórshavnar kommunu í 1978, men ynskti ikki staðbundna nevnd[11]. Argir legði saman við Tórshavar kommunu í 1997 og vildi heldur onga staðbundna nevnd hava. Bøur og Gásadalur løgdu saman við Sørvágs kommunu í 2005 og hava eftir egnum ynski heldur onga staðbundna nevnd. Heldur ikki nøkur av teimum 11 bygdunum, sum blivu lagdar saman í Sunda kommunu í 2005, hava ynskt staðbundna nevnd.

**Talva 5.6: Íbúgvar pr. staðbundið umboð.**
**Januar 2007**

| | |
|---|---|
| Kollafjørður/Signabøur/ Oyrareingir | 339 |
| Skáli/Skálabotnur | 252 |
| Kirkjubøur/Velbastaður | 87 |
| Nólsoy | 84 |
| Kaldbak/Kaldbaksbotnur/Sund | 76 |
| Oyndarfjørður | 54 |
| Elduvík/Funningsfjørður | 31 |
| Hvítanes | 31 |
| Árnafjørður | 18 |
| Mikladalur | 14 |
| Hestur/Koltur | 12 |
| Trøllanes | 9 |
| Mykines | 6 |

Sum sæst á talvu 6 er fólkatalið í bygdunum heldur ikki avgerandi fyri støddina á staðbundnu nevndunum. Nevndarlimatalið í staðbundnu nevndini er altíð 3[12], sama hvussu stór bygdin er[13]. Í flestu

11 Fyri Hoyvík sat ein staðbundin nevnd frá 1978-80, av tí at valskeiðið ikki var runnið, tá Hoyvík bleiv løgd saman við Tórshavnar kommunu í 1978. Endamálið var at tryggja Hoyvík ein form fyri umboðan restina av valskeiðnum. Eftir kommunuvalið í 1980 bleiv nevndin niðurløgd.

12 Her er talan um talið á *staðbundnu* nevndarlimunum.

13 Har sum fleiri bygdir hava felags staðbundna nevnd, verður í summum førum stillað upp ella kvoterað soleiðis, at nevndarumboðini verða á leið javnt býtt.

førum er talan um smábygdir við undir 300 íbúgvum, men Kollafjørður/Signabøur/Oyrareingir og Skáli/Skálafjørður og hava ávvikavíst 1.016 og 757 íbúgvar[14]. Hetta merkir stóra variatión í íbúgvatali pr. staðbundið umboð, frá 6-339. Samanlagt varierar fólkatalið í bygdunum við staðbundnum nevndum úr 27 til 1.016 íbúgvar[15].

**Talva 5.7: Íbúgvatal pr. kommunustýrisumboð og pr. staðbundið nevndarumboð í Tórshavnar, Klaksvíkar, Runavíkar og Sørvágs kommunu. Januar 2007**

| Kommuna | Kommunu-stýrisumboð | Staðb. nevndar-umboð | Kommunu-stýrisumboð + staðbundin nevndarumboð | Íbúgvar pr. staðb. umboð og kommunu-stýrisumboð | Íbúgvar pr. kommunu-stýris-umboð |
|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 13 | 18 | 31 | 617 | 1.472 |
| Klaksvík | 11 | 9 | 20 | 244 | 444 |
| Runavík | 11 | 9 | 20 | 188 | 341 |
| Sørvágur | 7 | 3 | 10 | 105 | 150 |

Á talvu 7 sæst, at variatiónin er stór, tá vit bera saman talið á staðbundnum nevndarumboðum og kommunustýrisumboðum pr. íbúgva í teimum fýra kommununum. Í Tórshavnar kommunu eru 1.472 íbúgvar pr. kommunustýrisumboð, tvs. næstan tíggju ferðir so nógvir sum í Sørvágs kommunu, har bara 150 íbúgvar eru pr. kommunustýrisumboð. Munurin er minni, tá staðbundnu umboðini verða tald við – tá hava íbúgvarnir í Tórshavnar kommunu 617 íbúgvar pr. umboð, tvs. slakar seks ferðir so nógvar sum Sørvágs kommuna við 105 íbúgvum pr. umboð.

Úr einum geografiskum – ella staðbundnum – perspektivi eru hvørki kommunustýrisumboðini ella staðbundnu nevndarumboðini javnt býtt. T.d. er Árnafjørður við 53 íbúgvum og einum kommunu-

14 Januar 2007.
15 Januar 2007.

stýrisumboði og trimum staðbundnum nevndarumboðum yvirumboðað í mun til t.d. Æðuvík við 100 íbúgvum, og sum hvørki hevur kommunustýrisumboði ella staðbundin nevndarumboð. Sum sæst av talvunum 2, 3, 4 og 5 hava summar bygdir umboð í kommunustýrinum, men yvirhøvur búgva kommunustýrisumboðini í meginøkjunum.

**Talva 5.8: Tal á borgarum í Tórshavnar, Klaksvíkar, Runavíkar og Sørvágs kommunu, sum eru umboðaðir í staðbundnum nevndum**

| | Fólkatal umboðað í staðbundnari nevnd | Í % av fólkatalinum í kommununi |
|---|---|---|
| Runavíkar kommuna | 1.012 | 27 |
| Tórshavnar kommuna | 1.885 | 9,8 |
| Klaksvíkar kommuna | 121 | 2,3 |
| Sørvágs kommuna | 19 | 1,8 |
| Íalt | 3.037 | 6,3% av samlaða *lands*fólkatalinum |

Umboðanin í staðbundnu nevndunum er ikki bara ójøvn frá bygd til bygd, men eisini innanhýsis í kommununum. Talva 8 vísir, hvussu nógvir borgarar í teimum fýra kommununum eru umboðaðir í staðbundnari nevnd umframt í kommunustýrinum. Samanlagt eru altso góð 6 av samlaða landsfólkatalinum umboðað í einum eyka formaliseraðum organi, sum hevur beinleiðis samband við borgarstjóran. Spyrjast kann so, hví bara nakrar ávísar bygdir og ikki tær bygdir, sum leingi hava verið partar av meginkommununum, hava henda framíhjárætt. Tað ber til at ímynda sær býarpartar í Tórshavn og Klaksvík, á Skálafjørðinum og rundanum osfr., sum kundu havt eitt ráðgevandi organ í staðbundum viðurskiftum. Tí er tað er nærliggjandi at rokna staðbundnu nevndirnar sum eina kompensatión fyri tað mista nærdemokratiið í bygdunum við fyrrverandi egna kommunustýri. Eftir kommunusamanleggingarnar

hava serliga tær smáu bygdirnar jú ógvuliga avmarkaðar møguleikar at fáa valt eitt lokalt umboð inn í kommunustýrið. Tær størru bygdirnar, Skáli og Kollafjørður, eru betur fyri í so máta; Skáli hevur sum nevnt tvey umboð, men Kollafjørður fekk einki á seinasta kommunuvali í 2004.

### 5.5 Hvørji umboða staðbundu nevndirnar?

Valskeiðið 2004-08 sótu tilsamans 29 menn og 10 kvinnur í staðbundnu nevndunum, svarandi til 75% menn og 25% kvinnur. Hetta kynsbýtið líkist kynsbýtinum í kommunustýrunum[16]. Mest vanliga kombinatiónin, tveir menn og ein kvinna, er at finna í átta av teimum 13 nevndunum. Tríggjar nevndir eru mannaðar við bara monnum, ein er mannað við tveimum kvinnum og einum manni, og eingin nevnd er uttan menn.

Aldurin á nevndarumboðunum liggur millum 23 og 65 ár (2008), og aldursbólkurin 41-60 ár er best umboðaður. Samanlagdi miðalaldurin er nakað oman fyri 45 ár hjá báðum kynum. Miðalaldurin í teimum einstøku nevndunum er frá 39 til 57 ár, og í flestu nevndunum er miðalaldurin í fjørutiárunum. 72% av nevndarlimunum hava útbúgving eftir fólkaskúlan. Næstan allar nevndir hava tvey ella trý umboð við miðal ella hægri útbúgving[17]. Bara ein hevur einki nevndarumboð við útbúgving eftir fólkaskúlan. 20 nevndarumboð eru uppvaksin í bygdini, og 19 eru tilflytarar. Í øllum nevndunum eru tilflytarar, í flestu førum 1-2, og í tveimum førum eru bara tilflytarar. 10 av teimum 29 mannligu nevndarumboðunum eru tilflytarar, meðan heili níggju av teimum 10 kvinnuligu nevndarumboðunum eru tilflytarar. Hesi tølini líkjast tølunum fyri kommunustýrislimirnar.[18]

---

16 Sí eisini kap. 1.

17 Miðal útbúgving verður her definerað sum 1-3 ár eftir miðnámsútbúgving. Hægri útbúgving verður definerað sum 3 ár ella meira eftir miðnámsútbúgving.

18 Sí eisini kap. 7.

**Talva 5.9: Staðbundnu nevndirnar. Yvirlit yvir fyrverandi kommunustýrisumboð**

| | Fyrrv. kommunustýrisumb. |
|---|---|
| Árnafjørður | 0 |
| Trøllanes | 0 |
| Mikladalur | 3 |
| Elduvík/Funningsfjørður | 3 |
| Skáli/Skálafjørður | 0 |
| Oyndarfjørður | 2 |
| Kollafjørður/Signabøur/Oyrareingir | 2 |
| Nólsoy | 2 |
| Kaldbak/Kaldbaksbotnur/Sund | 0 |
| Hvítanes | 0 |
| Velbastaður/Kirkjubøur | 1 |
| Hestur/Koltur | 1 |
| Mykines | 2 |
| Íalt | 16 |

Sum sæst av talvu 9 sita íalt 16 fyrrverandi kommunustýrisumboð í nevndunum, svarandi til 41%, og 23 umboð ella 59%, hava ikki royndir sum fyrrverandi kommunustýrisumboð. Við undantak av Skála-, Trøllanes- og Árnafjarðarnevndunum eru tær nýggju nevndirnar (stovnaðar eftir aldarskiftið) mannaðar við í flestu førum tveimum ella trimum fyrrverandi kommunustýrisumboðum. Tær báðar gomlu nevndirnar, Kaldbaksnevndin og Hvítanesnevndin, hava einki fyrrverandi kommunustýrisumboð. Skáli og Árnafjørður hava harafturímóti sum fyrr nevnt ávvikavíst tvey og eitt umboð í kommunustýrinum umframt trý staðbundin nevndarumboð. Felags fyri allar tær bygdirnar, sum hava lagt saman við aðrari kommunu eftir aldarskiftið – tó undantikið Trøllanes – er, at tær *antin* eru umboðaðar av fyrrverandi kommunustýrisumboðum í staðbundnari nevnd *og/ella* av núverandi umboðum í kommunustýrinum[19]. Sostatt kunnu stað-

19 Um eitt umboð verður valt í kommunustýri, kann tað ikki samstundis sita sum eitt av teimum trimum staðbundu umboðunum í staðbundnu nevndini.

bundnu nevndirnar í ávísan mun síggjast sum framhald av teimum gomlu kommunustýrunum, tó við munandi skerdum valdi. Hetta samsvarar við omanfyrinevndu meting av staðbundnu nevndunum sum kompensatión fyri mista nærdemokratiið.

**Talva 5.10:. Uppstillað til staðbundnu nevndirnar í 2004, uppstillað til kommunustýri valið 2000 og uppstillað pr. íbúgva (januar 2005)**

| | Uppstillað til staðbundna nevnd 2004 | Uppstillað til kommunustýrið 2000 | Fólkatal (januar 2005) |
|---|---|---|---|
| Kollafjørður/Signabøur/ Oyrareingir | 4 | - | 1.022 |
| Skáli/Skálafjørður | 7 | 18 | 714 |
| Kirkjubøur/Velbastaður | 5 | 7 | 230 |
| Nólsoy | 7 | 13 | 264 |
| Oyndarfjørður | 7 | 12 | 182 |
| Hvítanes | 5 | - | 96 |
| Elduvík/Funningsfjørður | 7 | 12 | 89 |
| Árnafjørður | 6 | - | 51 |
| Hestur/Koltur | 5 | 7 | 41 |
| Mikladalur/Trøllanes | 8+4* | 5 | 45+23 |
| Kaldbak/Kaldbaksbotnur/ Sund | 8 | - | 227 |
| Mykines** | - | 5 | 21 |
| Tilsamans | 73 | 79 | 3.005 |

* Mikladalur og Trøllanes vóru í felags kommunu til 2005, tá tær løgdu saman við Klaksvíkar kommunu. Bygdirnar fingu í hesum sambandi hvør sína staðbundna nevnd.

** Í Mykinesi vórðu tey trý staðbundnu nevndarumboðini vald av fyrrverandi kommunustýrinum í Mykinesi.

Talva 10 vísir eitt nakað ójavnt uppstillingarmynstur. Kollafjørður/Signabøur/Oyrareingir, sum eru nógv tað fólkaríkasta økið, hava fægst uppstillað. Mikladalur, sum er millum smæstu bygdirnar, hevur saman við Kaldbak/Kaldbaksbotni/Sundi flest uppstillað. Talvan vísir eisini uppstillað til kommunustýrisvalið 2000. Hjá níggju av bygdunum var hetta seinasta kommunustýrisval til gamla kommunustýrið, og staðbundnu nevndirnar blivu stovnaðar í staðin. Undantikið Mikladal og Trøllanes er talið á uppstillaðum til staðbundnar nevndir í 2004 í øllum bygdunum lækkað í mun til uppstillað til kommunustýrisvalið í 2000.

Hesi tøl siga nakað um áhugan hjá borgarunum at taka lut í staðbundnum nevndararbeiði. Okkurt bendir á, at tað er minni attraktivt at sita í staðbundnari nevnd enn í kommunustýri. Sambært teimum spurdu er tað sum vera man lættari at finna kandidatar til staðbundið nevndarval á teimum størru plássunum enn á teimum smærru; men ongastaðni er beinleiðis gravgangur eftir at stilla upp. Í flestu førum verða uppstillingarlistarnir gjørdir við at ringja aftur og fram og biðja fólk seta seg á listan. Tey uppstillaðu føra einki valstríð. Á teimum smáu plássunum er kanska lítil meining í at føra beinleiðis valstríð, av tí at fólk kennast og vita, hvat hesin ella handan stendur fyri. Á teimum nakað størru plássunum kennast fólk ikki neyðugvís so væl, og tískil kann tað har vera trupult hjá veljaranum at vita, hvar krossurin skal setast, ikki minst um talan er um ein nýkomnan tilflytara.

Eisini skal havast í huga, at val til staðbundnar nevndir fer fram sama dag sum val til kommunustýrið. Hugsandi er, at kommunustýrisvalið stjelur myndina: Plakatir, valgreinir, faldarar, heimasíður, sms-boð osfr. snúgva seg um *kommunustýrisvalið* og ikki staðbundna nevndarvalið. Kommunustýrisvalið er fyri *allar* veljararnar í kommununi, meðan staðbundna nevndarvalið bara er fyri ein lítlan part av veljaraskaranum.

## 5.6 Hvussu er samskiftið skipað?

Nevndirnar hava vanliga fýra fundir um árið[20]. Um okkurt átroðk-

20 Mykinesnevndin hevur tó bara ein fund um árið.

andi er, kann eykafundur haldast. Fundirnir verða sum oftast hildnir í kommunubygninginum, men tað kemur eisini fyri, at teir verða hildnir í lokaløkjunum. Umframt nevndina er ein skrivari við á fundi, og eftir tørvi verða eisini fólk í umsitingini kallað inn at greiða frá ella svara upp á spurningar. Nevndirnar kunnu sjálvar biðja um fund og gera tað í ávísan mun, men sum heild eru tað kommunurnar, sum kalla inn. Bæði nevndarumboðini sjálvi og kommunan kunnu leggja mál fram. Samanumtikið tykist, sum báðir partar eru virknir á hesum økinum. Fyrivarni má tó takast, tí av gerðabókunum framgongur ikki altíð so týðuliga, hvør partur hevur lagt eitt mál fram. Ein nágreinilig uppteljing er tískil ikki møgulig. Málini, sum verða viðgjørd, verða beind víðari í nevnd og/ella løgd fyri á kommunustýrisfundi, og har verður endalig avgerð tikin.

Umframt fundirnar við kommununa halda tey trý staðbundnu nevndarumboðini sjáldan fund innnhýsis, men brúka í staðin telefon, teldupost osfr. Staðbundnu nevndirnar í ymisku bygdunum hava so at siga einki samstarv sínámillum. Samskiftið millum nevndirnar og borgararnar í bygdunum hongur sum vera man saman við støddini á bygdunum. Í smáu bygdunum verða borgararnir kunnaðir við túnatosi, og her hava teir eisini høvi at venda sær til nevndarumboðini við málum, spurningum o.t. Ein meira formel kunningarkanal er „svartatalvan"[21], sum tó ikki virkar allastaðni. Á størru plássunum er truplari viðv. kunning. Runavíkar kommuna hevur sum tann einasta kommunan síðan 2007 lagt fundarfrásagnirnar á heimasíðuna. Annars er smáligt við tíðindum og kunning um staðbundna nevndararbeiðið á heimasíðunum hjá øllum fýra kommununum.

Av og á verða borgarafundir hildnir; Tórshavnar kommuna er virknast á hesum økinum, men fyribrigdið sæst t.d. eisini á Skála. Tað kemur fyri, at borgarar í bygdini venda sær til nevndirnar við

21 Sambært *Lov for Færøerne nr. 59 af 01.04.1912 om Ophævelse og Kundgørelse ved Kirkestævne m.m.* er „svartatalvan" ein talva, sum skal vera sett upp á sjónligum stað í øllum kirkjubygdum undantikið í Dímun. Talvan verður brúkt til at hongja kunngerðir av málum við týdningi fyri borgararnar á. Bæði almennir myndugleikar og privat kunnu brúka talvuna. Myndugleikarnir kunnu tó velja aðrar hættir til kunngerðir enn talvuna.

málum og spurningum, bæði á størru og smáu plássunum, men tað er ikki ofta. Vanligast er tó, at borgarar venda sær beinleiðis til kommununa við málum, og ikki til staðbundnu nevndina. Kommunan leggur síðani málið fyri nevndina á fundi.

## 5.7 Hvat gera staðbundnu nevndirnar?

Sum nevnt eru uppgávurnar hjá staðbundnu nevndunum breitt orðaðar. Tær skulu hoyrast og ráðgeva í málum, sum viðvíkja bygdini. Tað er altso í stóran mun upp til nevndirnar sjálvar at innihaldsútfylla nevndararbeiðið. Yvirlitið yvir fundir og mál á talvu 1 A-E aftast í bókini, er gjørt út frá gerðabókunum.

Sum vera man, er ávíst samband millum fólkatal og tal á málum, men hetta er ikki serliga týðuligt. Elduvíkar-, Oyndarfjarðar- og Nólsoyarnevndin, sum hava ávvikavíst sætta-, fimta- fjórðastørsta fólkatal, hava størsta tal av málum. Kollafjarðarnevndin og Skálanevndin, sum umboða nógv tær størstu bygdirnar í mun til hinar, hava lutfalsliga lágt tal á málum. Tað er einki gjøgnumgangandi mynstur í talinum á málum samanborið við útbúgvingarstøði og –breidd í aldri og kyni hjá nevndarumboðunum. Harafturímóti benda tølini á talvu 2 A-B aftast í bókini á, at tað hevur ávísan týdning í so máta, at staðbundnu nevndirnar eru mannaðar við fyrrverandi kommunustýrisumboðum. Á talvu 3 A-B aftast í bókini sæst, at stórur munur er á valskeiðunum 2001-2004 og 2005-2008[22]. Tølini á málum í Kollafirði og Árnafirði eru fallin, meðan tey eru vaksin í Kaldbak og á Hvítanesi.

Tølini á talvu 2 A-B og 3 A-B geva eina ábending um, hvussu virknar nevndirnar eru. Hetta sigur kanska ikki so nógv. At vera virkin er sjálvsagt ikki tað sama sum at vera effektivur. Kanningar av slíkum spurningum liggja uttan fyri hesa kanning. Skrivararnir í teimum einstøku nevndunum hava eisini ymiskan stíl. Tí er trupult at gera samanberingar. T.d. framgongur ikki altíð, hvør upprunaliga hevur sett eitt mál á skrá. Í summum førum eru fleiri mál flættað

---

22 Her má vera havt í huga, at valskeiðið 2005-2008 í skrivandi stund ikki er runnið enn. Tískil má roknast við, at tølini her vera nakað størri, tá valskeiðið er endað.

inn í eitt høvuðsmál, og í øðrum førum er øvugt. Tað framgongur heldur ikki altíð, hvat teir ymisku partarnir hava sagt í málunum, og um nógv tíð er brúkt upp á kjak. Summi mál síggjast ganga aftur og aftur í gerðabókunum, tí tey ikki verða avgreidd. T.d. vetrarfriðing og grundstykkjaviðurskifti, sum ofta eru útreiðslukrevjandi og/ella innibera samráðingar við aðrar partar. Í øðrum førum er minni skiljandi, hví málini taka so langa tíð at loysa, t.d. uppseting av einum almennum wc ella smáumvælingar.

Talva 5.11 vísir, hvørji sløg av málum staðbundnu nevndirnar hava til viðgerðar.

**Talva 5.11: Mál til viðgerðar í staðbundnu nevndunum 2005-2007 (fyri Hvítanes, Kaldbak, Árnafjørð og Kollafjørð frá 2001-1007). Í %.**

| | Byggi-, viðlíkahalds- og teknisk mál | Felags tiltøk | Annað |
|---|---|---|---|
| Mykinesnevndin | 94 | 6 | 0 |
| Kollafjarðarnevndin | 93 | 1 | 6 |
| Árnafjarðarnevndin | 88 | 3 | 9 |
| Kaldbaksnevndin | 86 | 2 | 12 |
| Kirkjubø/ Velbastaðnevndin | 86 | 0 | 14 |
| Hest/Koltursnevndin | 80 | 0 | 20 |
| Nólsoyarnevndin | 75 | 2 | 23 |
| Hvítanesnevndin | 75 | 2 | 23 |
| Mikladalsnevndin | 73 | 3 | 24 |
| Elduvíkarnevndin | 65 | 10 | 25 |
| Oyndarfjarðarnevndin | 63 | 11 | 26 |
| Trøllanesnevndin | 58 | 3 | 39 |
| Skálanevndin | 39 | 11 | 50 |

Tey flestu málini snúgva seg um konkret og materiel viðurskifti, so sum bygging, viðlíkahald og teknisk mál. Mál av meira trivnaðar-

kendum slag eru munandi færri, og felags tiltøk eru fægst.[23]. Tó eru frávik frá hesum mynstri. Skálanevndin líkist burturúr: hon hevur fægst byggi-, viðlíkahalds- og teknisk mál, flest trivnaðarkend mál og – eins og Oyndarfjarðarnevndin – flest felags tiltøk. Ógvuliga høga talið á byggi-, viðlíkahalds- og tekniskum málum í Kollafirði kemst av serligu jarðarviðurskiftunum har, sum m.a. bera við sær nógv matrikuleringsmál. Til samanberingar eru eingi matrikuleringsmál í Skálanevndini.

Tey flestu málini kunnu ikki relaterast til nakrar ideologiskar (floks)politiskar stríðslinjur. Tað finnast neyvan politikarar ella politiskir flokkar ella listar, sum beinleiðis ella óbeinleiðis seta seg ímóti ynskjum um t.d. vetrarfriðing, betri ferðslutrygd ella viðlíkahald av vegum. Harafturímóti kunnu peningaligu prioriteringsynskini variera millum ymiskar flokkar/politikarar. Stór byggiprojekt kunnu eisini vera trupul at handfara. Politikararnir mugu hugsa um alla kommununa, meðan staðbundnu nevndarumboðini bara skulu arbeiða fyri lokaløkið. Eitt annað eyðkenni fyri málini er, at tey sum heild ikki visiónskend, hvørki í formi av t.d. eini lokalætlan fyri økið ella mobilisering av borgarunum. Onkur undantøk eru, t.d. á Skála. Har eru borgararnir við í arbeiðsbólkum, sum skulu taka sær av ymsum uppgávum í sambandi við gerð av fríøki. Markið fyri, hvussu smá mál koma fyri nevndina, tykist í summum førum flótandi: í

23 Soleiðis eru málini bólkað: Byggi-, viðlíkahalds- og teknisk mál: byggi- og býarskipanarmál, ummatrikuleringsmál, teknisk mál, umvæling, vatnveiting, kloak, renovatión, vetrarfriðing, samferðsla og samskifti.
Felags tiltøk: ruddingardagar, hugnatiltøk, bólkarbeiði, jólahald, jóansøkuhald, fyrilestrar, hátíðarhald, drotningavitjan.
Annað: fíggjarviðurskifti, skúli, barnaansing, eldrarøkt, heilsa, umhvørvi, mentan, frítíð, fornminni
Bólkingin av málunum er ikki eintýðug og kundi verið gjørd upp á nógvar aðrar mátar. Mál sum bygging av sambýli ella frítíðarøki eru ofta trupul at definera, tí bæði tað reint tekniska og tað meira trivnaðarkenda kann hava verið umrøtt, sjálvt um bara tað meira tekniska er ført í gerðabókina, t.d. at kommunan leitar eftir lendi. Hinvegin geva gerðabøkurnar og teirra bólkingar ivaleyst nøkulunda rættvísandi ábendingar, og útsagnirnar hjá teimum spurdu benda eisini á tann bógvin. Tað merkir, at bólkurin „Byggi-, viðlíkahalds- og teknisk mál“ reelt kanska er nakað minni, enn hann sær út til her, men kortini er hann í flestu førunum nógv tann størsti einkultbólkurin.

summum nevndum eru lutfalsliga nógv smámál, sum annars kundu verið loyst í vanligum samskifti við kommununa, men ásýniliga ikki verða tað.

Í gerðabókunum sæst aftur og aftur, at kommurnar kunna um nýggjar ætlanir ella um seinasta nýggja í einum máli undir viðgerð. Nevndinar taka til eftirtektar og spyrja kanska um okkurt. Nevndirnar koma eisini við uppskotum, sum kommurnar oftast lova at kanna og síðan beina í nevnd. Á næsta nevndarfundi hava kommunurnar við hvørt nýggj tíðindi um málið og við hvørt ikki, og nevndirnar spyrja eftir málunum, sum kommurnar so aftur lova at kanna. Luttøkan hjá staðbundnu nevndunum tykist sum heild at vera ein ikki-ideologiskur formur fyri politiskari luttøku. Tað snýr seg mest um heilt konkret mál við serligum aktualiteti í lokaløkinum, og borgararnir verða ikki tiknir við í serliga stóran mun.

## 5.8 Hvat halda nevndarumboðini?

Tey flestu staðbundnu nevndarumboðini úr lokaløkjunum eru hampuliga til væl nøgd við sjálva staðbundnu nevndarskipanina – ið hvussu er í teoriini – og halda, at hon eigur at halda fram, antin í núverandi ella øðrum formi. Tey nevndarumboð, sum hava royndir sum kommunustýrisumboð í gomlu kommunustýrunum, vísa á fíggjarligu fyrimunirnar við samanleggingunum: Í øllum bygdunum eru síðan samanleggingarnar gjørdar stórar íløgur, t.d. sóttreinsað vatn, asfaltering, skúlabygging, vanligar viðlíkahaldsuppgávur, barnaansing og eldrarøkt. Fleiri av hesum íløgunum høvdu bygdirnar ongan møguleika havt at gjørt sum sjálvstøðugar kommunur. Gomlu kommunustýrini, serliga á útoyggjunum, vóru eisini dýr at reka. Ein fundur kundi kosta ein heilan dag í ferðing og fundarpengum, sum ikki vigaðu upp ímóti mistari arbeiðsinntøku. Eisini var dagliga arbeiðið tíðarkrevjandi og ábyrgdin tung í mun til lønina. Pappírarbeiði, telefonsamtalur og ymisk smáting fyltu nógv í gerandisdegnum. Summar uppgávur máttu bíða leingi, tí teir, sum skuldu loysa tær, vóru til skips. Tað er munandi lættari nú, tá hesar uppgávurnar eru fluttar til meginumsitingina. Í summum førum hava kommunurnar eftir samanleggingarnar sett fólk burturav at taka sær av teimum dagligu, praktisku uppgávum í bygdunum.

Eisini úteftir eru fyrimunir nú í mun til fyrr: Tað gongur ofta lættari hjá eini størri enn hjá eini minni kommunu at fáa nakað ígjøgnum í samskiftinum við ymiskar instansir. Áheitanin frá eini stórari kommunu hevur størri tyngd, tí kommunan er ríkari og sterkari, og tí tey ymisku málini hjá bygdunum ofta eru partur av eini størri røð av málum hjá kommununi, sum hon hevur áhuga í at loysa.

Tey flestu nevndarumboðini, sum ikki eru fyrrverandi kommunustýrislimir, halda nevndararbeiðið vera spennandi og læruríkt, og at tað hevur givið teimum størri innlit í mangt, sum tey ikki vistu frammanundan. Fleiri nevna, at tey ikki vóru stórvegis áhugað fyrstu ferð, tey stillaðu upp; oftast tóku tey ikki sjálvi stigið, men vórðu biðin um at stilla upp. Men við tíðini kom áhugin at halda fram.

Fleiri vísa á fyribrigdið familju- og kenningapolitikk, sum hevur fingið verri kor, nú kommunurnar eru lagdar saman. Í smáum bygdasamfeløgum er góður møguleiki hjá sterkum persónum og familjum at fáa meiriluta í bygdaráðnum og kunna arbeiða fyrst og fremst fyri seg sjálvi og samstundis forða øðrum í at luttaka. Hesin møguleikin er, um ikki heilt burtur, so ikki longur til í sama muni. Í einum størri forum kunnu málini viðgerast av fleiri persónum og ivaleyst við størri objektiviteti. At avgerðarrætturin er fluttur úr lokaløkinum inn á meginøkið hevur í fleiri førum skapt meira harmoni í bygdunum. Sum ein av nevndarlimunum tók til: „So kunnu vit ganga her og hugna okkum saman í staðin fyri at keglast innanhýsis."

Viðvíkjandi tí praktiska samstarvinum við kommunurnar halda nevndarumboðini sum heild arbeiðið ofta ganga óneyðuga seint fyri seg. Tey, sum hava royndir sum kommunustýrisumboð, eru sum so von við, at arbeiði av slíkum slag krevur tíð og tol, men halda kortini effektivitetin vera minkaðan og bureaukratiið vaksið eftir samanleggingarnar. Í gomlu bygdaráðunum blivu avgerðirnar í størri mun førdar út í lívið, so skjótt tær vóru samtyktar. Tað, sum fyrr var *avgerðir*, er nú *tilmælir*, sum eingin noyðist at fylgja, og tey verða heldur ikki fylgd upp í sama mun nú sum í gomlu kommunustýrunum. Ofta verða tey beind í eina ella fleiri nevndir, og long tíð kann ganga, áðrenn nakað hendir, um nakað hendir yvirhøvur. Tað

kemur eisini fyri, at kommunan forsømir at kunna ella leggja mál fyri nevndina. Í summum førum verða nevndirnar kunnaðar um eina avgerð langt aftaná, at avgerðin er tikin og av og á eisini framd. Drúgvu málsviðgerðirnar og í summum førum óregluliga kunningin virka frustrerandi og demotiverandi fyri nevndarumboðini.

Tað eru eisini tey, sum ikki halda staðbundna nevndararbeiðið geva nakra meining yvirhøvur, og at skipanin átti at verið tikin av; men tey eru fá. Samanumtikið halda nógv tey flestu bæði sjálva staðbundnu nevndarskipanina og tað praktiska samstarvið vera frægari enn einki – men sjáldan meira enn tað. T.d. heldur Árnafjarðarnevndin, sum bleiv stovnað í 2001, hóast Árnafjørður hevur verið í Klaksvíkar kommunu síðan 1908, at bygdin hevur fingið størri ans frá kommununi, eftir at nevndin er stovnað. Kaldbaks- og Hvítanesnevndin, sum eru uml. 30 ára gamlar, halda seg eisini framvegis gera mun, og at skipanin eigur at halda fram.

Borgarstjórarnir úttala seg sum heild positivt um staðbundnu nevndarskipanina. Tað er ein fyrimunur at hoyra sjónarmiðini hjá staðkendum fólki, tá mál viðvíkjandi lokalumráðunum eru til viðgerðar. Teir meta seg og kommunurnar hava gott samstarv við nevndirnar og royna at fylgja tilmælunum, so vítt tað ber til. Teir eru tilvitandi um, at vandin fyri at geva sersømdir er til staðar, og royna at vera so rættvísir sum gjørligt. Men tað kann vera lættari sagt enn gjørt. T.d. veldst um, hvørji stig koma frá staðbundnu nevndunum sjálvum. Ressursusterk og ágrýtin nevndarumboð kunnu í samstarvi við kommununa fáa nógv á skaftið í einum lokaløki; men samstundis kann hetta elva til, at onnur lokaløki verða ella føla seg forsømd ella órættvíst viðfarin av kommununi.

Kortini ivast borgarstjórarnir í, um tað er rætt at halda fram við verandi skipan og seta støðugt fleiri staðbundnar nevndir á stovn. Tað seinkar málsviðgerðunum og arbeiðinum annars, at mál skulu leggjast fyri á staðbundnu nevndarfundunum, áðrenn tey kunnu fara víðari í skipanini. Fundirnir eru eisini orkukrevjandi og tyngja um fyrisitingararbeiðið í kommununum. Spurningurin um staðbundnu nevndarskipanina er ikki ofta frammi í kommunustýrunum, men hesir framtíðarmøguleikar blivu nevndir:

- ein staðbundin nevnd í kommununi við einum umboð úr hvørj-ari bygd
- staðbundnar nevndir bara fyri bygdir, sum ikki hava umboð í kommunustýri
- at avmarka staðbundnu nevndirnar til bara at umfata útoyggjarnar
- at víðka kommunustýrið við einum umboð úr hvørjari bygd við eygleiðarastatus. Eygleiðarin skal hava talu- og hoyringsrætt, men ikki atkvøðurætt.

Sum heild tykjast allir partar at leggja dent á at varðveita samstarvið millum kommunurnar og útjaðaraøkini. Í seinasta enda kemur samstarvið altíð at avhanga av teimum til eina og hvørja tíð sitandi persónunum í nevndunum og í kommunustýrunum, og hvussu virknir og samstarvsáhugaðir teir eru.

## 5.9 Staðbundnu nevndirnar og lokaldemokratiið

Omanfyri er roynt at greiða frá staðbundnu nevndunum og arbeiði teirra. Spurningurin er so, um staðbundna nevndarskipanin kann sigast at vera við til at styrkja tað lokala demokratiið, soleiðis sum lógin leggur upp til. Viðvíkjandi autonomiinum er lítil ivi um, at tá fyrrverandi kommunustýrini blivu niðurløgd í sambandi við kommunusamanleggingarnar, fór autonomiið úr bygdunum og inn í meginøkini. Staðbundnu nevndirnar, sum blivu stovnaðar, hava munandi minni vald enn gomlu kommunustýrini. Hoyrings- og ummælisrættur og avgerðarrættur eru hvør sítt: kommunurnar hava onga juridiska skyldu (men kanska eina moralska) at fylgja tilmælum og ynskjum hjá staðbundnu nevndunum.

Spurningurin um, hvussu nevndirnar virka sum demokratisk organ, sum skúlar í demokrati, er ikki einfaldur at svara uppá, tí hugtakið demokrati er komplekst. Demokrati er fólkastýri, og vit fata vanliga demokrati sum nakað positivt, og viknandi demokrati ella ikki-demokati sum nakað negativt. Men full semja er ikki um, hvat demokrati *er*, og hvat ið eyðkennir eitt gott ávvikavíst minni gott demokrati. Ymiskar demokratiteoriir peika á ymisk viðurskifti sum avgerandi fyri kvalitetin av demokratinum. Tær flestu teoriirnar kunnu tó býtast upp í nakrar høvuðsbólkar, t.d tær, sum byggja á

*óbeinleiðis* ella *umboðandi demokrati*, tvs. at borgaraluttøkan í stóran mun er avmarkað til *valini*, og tær, sum byggja á *beinleiðis demokrati*, tvs. borgaraluttøkuna *millum* valini. Í umboðandi demokratii velja borgararnir umboð og geva hesum sostatt mandat at taka avgerðir fyri borgararnar. Í beinleiðis demokratii er ikki nokk, at borgararnir fara á val; teir taka eisini aktivt lut í avgerðarprosessunum millum valini.[24]

Talva 12 vísir, at staðbundna nevndarumboðstalið síðan 2005 er vaksið úr 12 upp í 39. Men samstundis er talið á kommunustýrisumboðum úr umtalaðu útjaðaraøkjum lækkað úr 26 niður í 3. Tað er ikki bara kommunustýrisumboðstalið úr útjaðaraøkjunum, sum er fallið; talið er fallið sum heild í sambandi við kommunusamanleggingarnar[25]. Sostatt eru kommunustýrisumboðini úr útjaðaraøkjunum í stóran mun skift út við staðbundin nevndarumboð. Henda útskifting vigar tó í tali ikki heilt upp fyri broytta umboðstalinum áðrenn kommunusamanleggingarnar. Telja vit fólkavaldu umboðini saman, altso kommunustýrisumboðini og staðbundnu nevndarumboðini, er talið í umtalaðu kommunum fallið úr 48 til 42 umboð, svarandi til 12,5%.

24 Sí eisini kap. 1.
25 Sí eisini kap. 1.

**Talva 5.12: Tal á fólkavaldum umboðum valskeiðini 2000-2004 og 2004-2008**

| | Valskeiðið 2000-2004 | | Valskeiðið 2004-2008 | |
|---|---|---|---|---|
| | Kommunu-stýris-umboð | Staðbundin nevndar-umboð | Kommunu-stýris-umboð | Staðbundin nevndar-umboð |
| Kollafjørður/Signa-bøur/Oyrareingir | 0 | 3 | 0 | 3 |
| Kaldbak/Kaldbaks-botnur/Sund | 0 | 3 | 0 | 3 |
| Hvítanes | 0 | 3 | 0 | 3 |
| Nólsoy | 5 | 0 | 0 | 3 |
| Hestur/Koltur | 3 | 0 | 0 | 3 |
| Velbastaður/Kirkjubøur | 5 | 0 | 0 | 3 |
| Elduvík/Funningsfjørður | 5 | 0 | 0 | 3 |
| Skáli/Skálafjørður | 7 | 0 | 2 | 3 |
| Oyndarfjørður | 5 | 0 | 0 | 3 |
| Trøllanes-Mikladalur | 3 | 0 | 0 | 6 |
| Árnafjørður | 0 | 3 | 1 | 3 |
| Mykines | 3 | 0 | 0 | 3 |
| Íalt | 36 | 12 | 3 | 39 |
| Fólkavald umboð íalt | | 48 | | 42 |

Staðbundnu nevndirnar kunnu í fyrstu syftu skijlast sum dømir um luttøkudemokrati, tvs. beinleiðis demokrati: at roynt verður at geva borgarunum høvi at vera við í politisku prosessunum og sostatt skúla teir í demokrati. Men tølini omanfyri benda á, at tað ikki eru fleiri, men tvørturímóti færri vald umboð, sum taka lut. Undantikið Skála er tað út frá hesi kanning heldur einki, sum bendir á nakra serliga synergieffekt í formi av størri luttøku millum ikki-valdar borgarar.

Haraftrat er luttøkudemokratiið ójavnt býtt, tí bara hesi 13 øki, umboðandi 3.037 fólk ella 6,3% av landsfólkatalinum, hava høvi at velja staðbundnar nevndir. Eisini innanhýsis millum hesi 13 økini er býtið ójavnt, av tí at økini hava trý umboð, sama hvussu stór tey eru. Tískil kann diskuterast, í hvussu stóran mun talan yvirhøvur er um luttøkudemokrati. Og hvussu stórt virði hevur luttøkan, tá lokala autonomiið, sum jú er ein treyt fyri lokalum demokratii, er farið úr lokaløkjum inn í meginøkini? Tað er eisini trupult at síggja nakra meining við § 37, stk. 2, í kommunustýrislógini, sum fyriskrivar, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan í nevndini. Tí um so skuldi verið, at stríð tekur seg upp millum tey trý staðbundnu umboðini og tey bæði kommunustýrisumboðini, so nýtist kommununi kortini ikki at lurta eftir staðbundnu nevndarumboðunum. Tá ger meirilutin hvørki frá ella til. Luttakarademokratiið tykist tískil meira symbolskt enn reelt. Kanska kann tað, sum skal eitast at vera luttøkudemokrati, meira sigast at vera valdemokrati, tvs. at borgararnir (summir) í staðin fyri at luttaka sjálvir nú fara á tvey val heldur enn eitt. Nú skulu bæði kommunustýrisumboð og staðbundin nevndarumboð veljast, meðan bara kommunustýrisumboð skuldu veljast fyrr. Munurin er eisini, at valdið ella autonomiið nú er savnað á munandi færri hondum enn fyrr.

Staðbundnu nevndirnar kunnu tá skiljast sum eitt millumlið skotið inn ímillum borgararnar og kommunustýrini. Hesin status sum ráðgevandi organ kann sæð úr perspektivinum hjá staðbundnu nevndarumboðunum vera bæði ein fyrimunur og ein vansi. Ein fyrimunur er at kunna føra síni sjónarmið fram, men tó sleppa undan at taka tunga ábyrgd og truplar avgerðir. Ein vansi er, eingi valdsamboð at hava, og ikki at hava atkvøðurætt. Sæð úr perspektivinum hjá kommunustýrinum er staðbundna nevndarskipanin eitt supplement til verandi skipan, sum er við til at gera hana fjølbroyttari. Við teimum formaliseraðu fundunum millum nevndirnar og kommunurnar letur skipanin upp fyri fleiri ymiskum sjónarmiðum á málini, áðrenn tey verða avgreidd. Samstundis eru teir við til at seinka arbeiðsgongdini og kunnu harvið minka effektivitetin. Sæð úr einum effektivitetsperspektivi kann staðbundna millumliðið síggjast sum eitt seinkandi irritatiónsmoment og ein komplisering fyri allar partar.

Um borgarar í eini bygd halda kommununa forsøma bygdina, kann tað vera freistandi at skuldseta staðbundnu nevndina fyri at vera ov lítið arbeiðssama. Um ein borgari í eini bygd við staðbundnari nevnd t.d. ætlar at søkja kommununa um eitthvørt, og umsóknin skal fyri staðbundnu nevndina fyrst, kann málsviðgerðin verða nógv seinkað. Øvugt sleppur ein umsókn frá einum borgara í einum øki uttan staðbundna nevnd frá hesum millumliði, og tá kann málið avgreiðast skjótari. Tað sama er galdandi hinvegin, um kommunan hevur einhvørja ætlan í eini bygd við staðbundnari nevnd og má leggja málið fyri nevndina fyrst. Staðbundnu nevndirnar kunnu sostatt fáa tann keðiliga leiklutin sum lús ímillum tvær negl og sum eitt hvørki-ella organ.

Her er tó vert at hava í huga, at hægri effektivitetur ikki altíð merkir rættari avgerðir. Seinking í sær sjálvum minkar heldur ikki neyðugvís um effektivitetin, men kann í summum førum tvørturímóti økja um hann: sjálvt um tað kann vera ópraktisk og órógvandi, kann tað í summum førum nettupp vera ein fyrimunur, at málini fara gjøgnum fleiri eygu og oyru, áðrenn tey verða avgreidd. At sjónarmiðini og vitanin hjá teimum staðkønu sleppa framat tíðliga í avgerðarprosessini, kann minka um sannlíkindini fyri spurningum og mótmælum seinri, og at hetta og hatta kemur afturumaftur. Offerdal[26] vísir á, at politisk luttøka ikki verður týðandi, fyrr enn hon ávirkar, tvs. broytir innihaldið í politisku avgerðarprosessunum. Luttøka merkir í praksis ofta mótmælir, átalur og atfinningar. Slíkt kann vera stríggið at fáast við, men tað er neyðugt, at tað er legitimt, tí júst hetta eyðkennir eitt livandi demokrati við virknum borgarum. Tað er gaman í at royna at økja um effektivitetin og veita borgarunum enn betri tænastur, men tað má eisini havast í huga, at tað at ganga tørv borgaranna á møti nettupp skapar politisk stríðsmál. Ofta finst ikki bara ein loysn, men fleiri. Í staðin fyri at niðurtóna ella flyta stríðsmálini til okkurt annað eigur ein stýriskipan at opna upp fyri, at ymisk virði og áhugamál sleppa fram í ljósið. Viðvíkjandi staðbundnu nevndarskipanini kann eisini argumenterast fyri, at effektiviteturin nettupp er øktur, tí nýggi ánarin av autonomiinum hevur betri valds-

26 Offerdal 2007, op.cit.

og stýrirамboð, sum útjaðaraøkini jú eisini fáa ágóðan av. Spyrjast kann so, um demokratiið, autonomiið og effektiviteturin partvíst eru seld fyri betri fíggjarlig kor. Tað eru tey kanska í ávísan mun. Spurningurin er so eisini, hvussu stórt reelt autonomi og harvið eisini demokrati og effektivitet gomlu kommunustýrini við munandi trengri fíggjarligum korum høvdu.

Tískil er trupult at meta, um effektiviteturin í lokaløkjunum frá einum staðbundnum nevndarperpsektivi er øktur, fallin ella stendur í stað. Ein slík meting hevði kravt eina størri kanning. Ein sovorðin kanning er ikki gjørd í hesum umfari. Tær flestu nevndirnar hava bara sitið í nøkur fá ár, og tí er eisini ivasamt, hvussu álítandi ein slík kanning hevði verið. Bara subjektivu fataninar hjá nevndarlimunum og gerðabøkurnar eru at halda seg til í so máta.

Viðmerkjast skal her, at luttøkudemokrati kann vera so mangt, og staðbundna nevndarskipanin er bara ein formur fyri luttøku millum so nógvar aðrar. Ørindini her eru ikki at meta um luttøku og demokratiið sum heild, men um effektirnar hjá *staðbundnu nevndunum* á demokratiið. Hallbera West[27] vísir á, at demokratiska luttøkan í Føroyum í ávísan mun er størri enn í grannalondunum, t.d. tað at taka samband við politikarar ella at ganga á politiskar fundir.

Uppgávan hjá staðbundnu nevndunum er sum nevnt at ráðgeva og geva tilmæli í málum viðvíkjandi lokaløkinum. Henda breiða orðing kann bæði vera ein styrki og ein veikleiki. Styrkin er, at nevndirnar og kommunustýrini hava stórt frælsi til sjálvi at velja, hvussu tey skipa og innihaldsútfylla nevndararbeiðið. Veikleikin kann vera, at ógreiðar mannagongdir skapa óvissu um, hvørja funktión nevndirnar skulu hava, og hvønn leiklut kommunan, nevndirnar og borgararnir skulu spæla mótvegis hvør øðrum.

Um staðbundnu nevndirnar eru hugsaðar sum ein fyribilsskipan í eina skiftistíð, inntil útjaðaraøkini eru fult integrerað í meginkommunurar, er verandi skipan helst hampuliga vælvirkandi. Okkurt bendir tó á, at tað ikki bara snýr seg um eina fyribilsskipan: Kaldbaks- og Hvítanesnevndin eru uml. 30 ára gamlar, og Árnafjørður,

27 West, Hallbera (2004): Folket i det moderne demokrati – en analyse af medborgerskab på Færøerne. Institut for statskundskab, Københavns Universitet

sum hevur verið í Klaksvíkar kommunu síðan 1908, setti ikki fyrr enn um aldarskiftið ynski fram um at stovna staðbundna nevnd, og Kollafjørður og Tórshavnar kommuna hava havt 7 ár um integratiónina. Tað sær sostatt út til, at tær staðbundnu nevndirnar, sum higartil eru stovnaðar, eru komnar fyri at vera.

Um endamálið er úrslitaorienterað, so sum at fáa eyka ráðgeving frá staðkendum, er verandi skipan kanska eisini hampuliga vælvirkandi. Um endamálið er meira prosessorienterað, so sum eitt fjølbroytnari luttøkudemokrati, er skipanin, soleiðis sum hon nú verður praktiserað, meira ivingarsom. Verandi staðbundna nevndarskipan førir í sjálvum sær ikki automatiskt til størri luttøku millum borgararnar. Um nevndararbeiði var meira sjónliggjørt, hevði hetta kanska bøtt nakað um. Eitt alternativ kundi verið at givið nevndunum størri autonomi við at útdelegera ávísar uppgávur til teirra, evt. við eini árligari upphædd, sum tær sjálvar kundu rátt yvir til gagns fyri lokaløkið. Tað hevði kanska gjørt tað meira attraktivt at stilla upp og vera við í arbeiðinum yvirhøvur, eisini millum valini. Ein slík loysn kundi elvt til krøv frá øðrum lokaløkjum um sama rætt. Hetta kundi ført við sær, at meginkommunurnar skuldu fyrihildið seg til tvær ymiskar stýriskipanir ísenn, sum aftur hevði kravt eina størri umsiting. Tað er ivingarsamt, hvat kommunurnar halda um slíkan valdsmiss úr meginøkjunum út í útjaðararnar. Hetta kann seta nakað í gongd, sum í longdini kann vera ringt at yvirskoða. Spurningurin er eisini, um tað hevði ført til eina endaleysa røð av nevndum og harvið sterkari fragmentering av kommununum, sum aftur kundi havt við sær stríð um ressursir millum teir ymisku útjaðararnar. Tað kann eisini tykjast sum eitt paradoks, fyrst at sentralisera valdið fyri síðan at býta partar av tí útaftur. Hvar og hvussu skulu avmarkingarnar vera, og hvørji skulu seta tær? Ein annar møguleiki hevði verið, at staðbundnu nevndirnar samstarvaðu meira sínámillum. Royndir við slíkum felagsnevndum úr Noregi eru góðar. Felagsnevndir av hesum slag hava víst seg at gera tað lættari at loysa stríðsmál. Umboðini úr ymsu økjunum læra hvør annan betur at kenna og læra av royndum hjá hvør øðrum. Tey læra eisini, at tað at stuðla einum lokaløki í einum máli kann koma egna lokaløki til góðar í einum øðrum

máli. Umboðini úr teimum ymsu økjunum noyðast at síggja mál úr sjónarhornunum hjá hvør øðrum[28].

Eitt livandi dømi um, at demokratiið eisini kann virka væl uttan staðbundnar nevndir, er felagið „Bygdabjarging" í Kollafirði. Felagið bleiv stovnað í 2007 av íbúgvum á Signabø, á Oyrareingjum og í Kollafirði. Orsøkin var ætlanin hjá Tórshavnar kommunu um at byggja eitt ídnaðarøki innast á fjørðinum, og haraftrat larmur og roykdálking frá motorunum á útlendskum trolarum, sum javnan liggja á fjørðinum. Íbúgvarnir í økinum høvdu ampa av hesum og bóru ótta fyri skaðiligum árinum av ídnaðarøkinum á umhvørvið og trivnaðin. Teir royndu hvør í sínum lagi at taka samband við havnamyndugleikarnar og kommununa fyri at fáa loyst málið. Tá hetta einki førdi til, tóku teir stig til innsavnan av undirskriftum og stovnaðu felagið „Bygdabjarging". Felagið hevur síðan tá verið og er framvegis virkið, t.d. við fundarvirksemi, brævaskifti, umsóknum, kærum osfr. til við ymsar myndugleikar. Haraftrat hevur felagið verið nógv frammi í fjølmiðlunum. Sum úrslit av arbeiðinum hjá felagnum er arbeiðið við ídnaðarøkinum í skrivandi stund fyribils steðgað, og batar hava eisini verið viðvíkjandi trolarunum. Felagið arbeiðir óheft av staðbundnu nevndini í Kollafirði. Tað er stovnað við og arbeiðir fyri einum einasta endamáli. Tvs. at tá endamálið er rokkið, ella ikki slepst longri, hevur felagið onga meining longur og verður væntandi niðurlagt. Einki er til hindurs fyri, at fleiri slík ad hoc feløg fara at verða sett á stovn. Felagið „Bygdabjarging" er eitt dømi um ein bottom-up felagsskap, sum í summum førum kann vera effektivari og smidligari enn ein top-down felagsskapur. Ein demokratiformur útiloðkar sostatt ikki neyðugvís ein annan.

Dømið úr Kollafirði minnir okkum á spurningin, um tað yvirhøvur ber til at „bíleggja" demokrati top-down. Hvat er tað fyri eitt demokrati, sum kemur burturúr, tá tey ráðandi sjálvi skipa fyri? Hvussu heppið er tað, at tey ráðandi renna eftir „fjøldini" og biðja hana um at luttaka, í staðin fyri at fjøldin sjálv stríðir seg fram at valdin-

28 Offerdal, Audun og Espeland, Hroar (2000): Prosess eller prosjekt? Lokalsamfunnsutvikling, nærmiljø og lokal planlegging. Kommuneforlaget, Oslo, s.17-18.

um ella ímóti tí? J. Aars vísir á, at vandin við slíkum toppstýrdum demokratitiltøkum er, at lokaldemokratiið verður elskað íhel. „Når lokalpolitikere og kommuneadministrasjon skal utvikle tiltak for å øke den folkelige deltagelsen, kan man lett mistenke dem for å ønske seg en bestemt type deltakelse. Det engasjementet som støtter opp om og legitimerer den politikken som føres av kommunen, vil være velkomment, mens andre og mindre støttende deltakelsesformer kan bli undertrykt"[29].

Spyrjast kann eisini, um tað yvirhøvur er eitt problem, at meginparturin av borgarunum ikki taka lut í politiskum arbeiði alla tíðina. Kann tað ikki við hvørt vera tekin um álit á skipanina og valdu umboðini, at luttøkan er lítil? Tað er jú eisini eitt týðandi demokratiskt rættindi nettupp *ikki* at luttaka, og ið hvussu er ikki blíva trýst/ur til tað. Hibbing og Theiss-Morse vísa á, at borgararnir eru tilbúgvingarlið hjá demokratinum og ein luttøkureservi. Tað er parturin av potentiellum luttakarum, sum eru mest týðandi aktørarnir í demokratinum, ikki tey aktivu. Í tilbúgvingarliðnum liggur eisini potentiali fyri kritikki. Tað mest týðandi er, at borgararnir vita, at møguleikin fyri at luttaka – og tað merkir ofta at mótmæla – er har tann dag, tá og um motivatiónin er nóg stór. Sjálvt um teir ikki rokna við at brúka hann[30].

Samanumtikið tykist staðbundna nevndarskipanin ikki í sjálvum sær at hava serliga stóra ávirkan á lokaldemokratiið. Men hon rúmar potentiali fyri einum meira fjølbroytnum lokaldemokratii. Treytin er, at valdshavararnir og borgararnir vilja hetta. Um so er, hevði eitt greiðari endamál við staðbundnu nevndunum, og kanska eisini ávísar tillagingar, verið gagnligt. Haraftrat áttu nevndirnar at verið brúktar í dagliga arbeiðinum til at arbeiða fram ímóti hesum endamáli.

29 Aars, Jacob (2007): *Noen kjennetegn på godt lokaldemokrati.* Rokkansenteret, http:/www.ks.no/upload/93137/JacobAarsKjennetegn.pdf s. 20-21.

30 Hibbing, John R. og Theiss-Morse, Elizabeth (2002): Stealth Democracy: Americans' Beliefs About How Government Should Work. Cambridge: Cambridge University Press, s. 2.

# 6

# Val til býráð og bygdaráð[1]

*Beinta í Jákupsstovu:*

Hetta kapitlið skal lýsa hvussu val av kommunupolitikarum er skipað. Valevnini verða bólkað í listar, sum umboða ymiskar hugsanir um, hvat ið kommunupolitikarnir eiga at leggja dentin á tey komandi árini. Kanska valið er ein álitisváttan til tey sum longu sita í bygda- og býráðunum? Vit skulu hyggja at hvat slag av listum eru í ymiskum kommunum, og hvussu nógv ið verða uppafturstillað og afturvald.

Í teimum stóru kommununum er flokkspolitisk uppstilling. Hesir flokkar eru teir somu sum í landspolitikki, við einari ávísari hugsjón um búskaparligan og tjóðskaparligan politikk. Men í kommunupolitikki tykjast hesar hugsjónir ofta kámar. Tað eru vanliga aðrir mótsetningar, ið seta dám á kommunupolitiska gerandisdagin. Hugsanin um hvat ið eru kommunalar uppgávar og ikki, hevur ivaleyst týdning fyri hvørji verða uppstillað og vald. Kommunugranskarin Goldsmith[2] hevur eitt boð upp á, hvussu samfelagsskipanin kann leiða til at fólk við serligum eginleikum verða rekrutterað. Hann hevur givið ymiskum kommunuskipanum navn.

1 Hetta kapitlið hevur støði í tveimum frágreiðingum skrivaðar saman við Eli Kjersem: *Rekruttering av færøyske kommunepolitikere* (Møreforsking 2005:4) og *Politisk representasjon i et kommunepolitisk system i endring* (Møreforsking 2008:7).

2 Goldsmith, Mike (1992) *Local Government.* Urban Studies, Vol. 29 (3/4); Page, Edward C. (1991) *Localism and Centralism in Europe. The Political and Legal Bases of Local Self-Government.* Oxford University Press; Baldersheim, Harald (2005) „Norske kommuner i internasjonalt perspektiv" í *NOU 2005:6 Samspill og tillit.* KRD.

Vit fara at meta listarnar til føroysku kommunuvalini upp ímóti trimum av hansara myndlum:

1. *Klient-patrón myndilin*. Hetta er ein skipan, har politiska karrieran hevur støði í tí lokala. Skipanin eggjar til at umboða áhugamál í heimkommununi á tjóðartingi. Her eru sterkir lokalpolitikarar. Teir virka sum verjar ella talsmenn fyri sínar veljarar í lokalsamfelagnum. Uppgávan hjá politikaranum er at fáa ágóðar til sítt egna lokalsamfelag. Aftur fyri fær hann (hon) stuðul frá veljarunum.
2. *Búskaparlig menning – myndilin.* Her er fatanin at týdningarmesta uppgávan hjá kommununi er at stuðla *lokala* búskaparliga menning. Hetta kann gerast við beinleiðis at stuðla virki, ella við at laga kommunalar tænastur til teirra tørv. Ofta vaksa fram sterk óformlig netverk millum almennar og privatar aktørar í hesum modellinum.
3. *Vælferðarmyndilin.* Í hesi skipanini er týdningarmesta uppgávan hjá kommununi at syrgja fyri at allir íbúgvar hava somu góðu atgongd til almennar tænastuveitingar.

Eyðkent fyri tað gamla føroyska samfelagið er tann egalitera skipanin. Sammett við onnur lond hevur tað verið líkskapur millum fólk í teimum føroysku bygdunum – men tó við máta.[3] „Slagið" hevði týdning fyri hvørja positión fólk fingu í bygdini. Flesta staðni mundi vera onkur bóndi sum hevði meira vald enn hini. Seinni komu lærarar, vinnulívsmenn og aðrir inn í leiðsluna á politiska vøllinum. Eftir okkara meting hevur føroyski kommunupolitiski myndilin havt mangt til felags við klient-patrónmyndilin, og í nøkrum førum eisini við búskaparliga menningarmodellin (við teimum vansum, sum hann kann føra við sær, sí kap. 4 í hesi bók). Men nú tykist leiðin at

3 Føroyar eru ikki eindømi í so máta: „Det kan synes som om selve ideen om sosial representativitet har fått større gjennomslag. Tidligere var det gjerne bygdens beste menn som skulle styre kommunen" skrivar Hans Erik Ringkjøb í greinini „Tar partiene representativitet på alvor?" í Offerdal, A. og J. Aars (ritstj.) *Lokaldemokratiet. Status og utfordringer.* Kommunenes Sentralforbund 2000.

ganga móti vælferðarmodellinum. Hetta er ein gongd frá eini skipan við sjálvstýrandi (autonomum) kommunum, sum í lítlan mun hava verið knýttar til landið, og til eina skipan har kommunurnar meira og meira eru tær, ið seta í verk vælferðaruppgávur, sum landið setir reglur um (sí kap. 3 í hesi bók). Jú meira vælferðarmodellurin inniber, at kommunurnar skulu syrgja fyri, at íbúgvararnir fáa tænastur ásettar av landinum, jú meira kann tað hugsast, at leikluturin hjá kommunupolitikarunum fer at broytast. Frá at vera umboð fyri bólkar innan kommununa fer leikluturin at verða at umboða *alla* kommununa mótvegis landinum.[4] (Kommunustýrini mugu kortini framvegis virka sum ein lokalpolitiskur felagsskapur til at loysa lokalar ósemjur, og hesin spurningur er umrøddur í kap. 1, 2 og 5).

Vit fara í hesum kapitli at lýsa skipanaðarligar karmar fyri kommunuvalini: Hvat er støddin á bygda- og býráðum í mun til hvussu nógv skulu veljast; hvat slag av uppstilling hava tey í teimum ymisku kommununum; og hvussu ávirkar uppstillingarmátin representativitetin hjá teimum valdu.

## 6.1 Fjølbroyttar kommunur, smá bygda- og býráð

Í 2004 vóru tilsaman 34 kommunur við 34.371 fólkum við atkvøðurætti til kommunuvalið. Í miðal vóru umleið 1000 fólk fyri hvørja kommunu, men kommunurnar eru sera ymiskar til støddar, í Havn høvdu 13.517 atkvøðurætt, í Húsa kommunu bert 37 (sí talvu 4 aftast í bókini). Bý- og bygdaráðini eru kortini ikki so ymisk til støddar. Tað er tí sera ymiskt lutfall millum talið á veljarum, talið á uppstillaðum og talið á valdum, sí talvu 6.1:

4 Kjellberg, Francesco (1965) „Politisk lederskap i en utkantkommune“, í *Tidsskrift for samfunnsforskning.*

**Talva 6.1 Lutfallið millum veljarar, uppstillaði og vald í bý- og bygdaráðum**

| Talið á umboðum í bygdaráðnum / býráðnum | Fólk við atkvøðu-rætti í 2004 | Talið á atkvøðum 2004 | Talið á uppstillaðum | | Talið á valdum | | Miðaltal av atkvøðum í mun til vald umboð |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | 2000 | 2004 | 2000 | 2004 | 2004 |
| **13** (*Tórshavn*) | 13517 | 10562 | 86 | 76 | 13 | 13 | **813** |
| **11** (*3 kommunur*) | 7213 | 6105 | 57 | 112 | 11 | 33 | 185 |
| **9** (*2 kommunur*) | 2203 | 1906 | 119 | 95 | 27 | 18 | 106 |
| **7** (*13 kommunur*) | 9173 | 7838 | 347 | 337 | 98 | 91 | 86 |
| **5** (*10 kommunur*) | 1711 | 1516 | 255 | 133 | 90 | 50 | 30 |
| **3** (*5 kommunur*) | 554 | 478 | 87 | 30 | 33 | 15 | 32 |
| Til saman | 34.371 | 28.405 | 951 | 783 | 272 | 220 | **129** |

Kelda: Dátubasa yvir uppstillað og vald.

Í miðal vóru 36 veljarar fyri hvørt valevni og 129 veljarar fyri hvønn bý- og bygdaráðslim. Sum vit síggja á talvu 6.1 er Tórshavnar kommunu í eini serstøðu í mun til hinar kommunurnar. Har eru 139 veljarar fyri hvørt valevni, og 813 veljarar fyri hvørt valt umboð. Talið á býráðslimum í Havn er ikki hækkað so hvørt sum Havnin er vaksin og fleiri kommunur eru komnar uppí Tórshavnar kommunu. Hesar bygdir hava (nærum) ikki umboð í býráðnum, men nøkur øki í Tórshavnar kommunu hava staðbundna nevnd (sí kap. 5).

Enn eru nógvar smáar kommunur. Tað kann hugsast at vera trupult at finna valevni til listarnar í teimum smáu kommununum; ein stórur partur av bygdafólkinum má á listan.[5] Støðan er sjálvsagt øðrvísi í teimum stóru kommununum. Tað er tí merkisvert at nógvir býráðslimir verða afturvaldir í teimum stóru kommununum.

5 Lógin krevur, at tað skulu vera tvey fleiri enn talið á bygdaráðslimum, sum stilla upp.

**Mynd 6.1 Uppafturstilling og afturval í smáum, miðalstórum og stórum bygda- og býráðum 2004.**
Prosent (Uppstillaði: N=30, 133, 337, 95,112, 76 / Vald: N=15, 50, 91, 18, 33, 13)




Kelda: Dátubasa yvir uppstillað og vald

Talva 6.1 vísti at minstu kommunurnar hava fá valevni í mun til vald. Mynd 6.1 vísir at har verða eisini nógv uppafturstillað. Munurin er kortini ikki so stórur millum kommunurnar. Eisini í teimum stóru eru tað ofta tey somu nøvnini, sum ganga aftur á listunum. Tað er tó merkisvert at útskiftingin er minst í Tórshavnar kommunu, sum hevur flest fólk. Hetta kann týða upp á at býráðslimirnir í Havn og í øðrum fólkaríkum kommunum fegnir vilja afturveljast, og royna alt tað tey kunna fyri at verða vald. (Valstríðið koma vit aftur til í kap. 7).

At vera býráðslimur gevur ivaleyst bæði heiður og ágóðar. Stórur munur er kortini at vera limur í einum lítlum bygdaráði og at sita í einum býráði. Í teimum minstu kommununum munnu ivaleyst nógv taka á seg kommunupolitiska arbeiðið sum eina skyldu ið ikki

kemst undan.[6] Tað er ikki visst, at tey vórðu eftirspurd áðrenn tey vórðu sett á listan og vald. Í teimum stóru kommununum har aftur ímóti er stór kapping um at verða vald í býráðið. Býráðsessirnir eru fáir, og um nýggj fólk skulu inn, má onkur út. Ein kanning[7] sum var gjørd av valum til býráðið í Havn 1972-1992, vísti at aftan á hesi seks valini høvdu tilsaman bert 32 fólk fingið sæti í býráðnum. Hóast nógv vóru uppstillað, og tað síðan 1972 hava verið veljararnir einsamallir, ið avgera, hvørji á listunum ið verða vald, vórðu teir somu menninir valdir val eftir val. Ikki fyrr enn í 1984 varð fyrsta kvinna vald í býráðið í Havn; eisini kvinnurnar vórðu oftast afturvaldar, tá tær fyrst vóru komnar inn.

Hví fáa menn fleiri atkvøður enn kvinnur? Er tað so at kvinnur atkvøða fyri kvinnum, og menn fyri monnum? Hendan spurning settu vit til valið í 2000, tá vit gjørdu eina *exit-poll* kanning í Tórshavnar kommunu.[8] Talva 6.2 vísir hvussu menn og kvinnur svaraðu, tá tey komu úr valhølinum:

6 Lógin sigur, at tey, ið eru fyllt 60 ár kunnu bera seg undan vali. Tey, ið hava verið limur av bygda(r)ráðnum/býráðnum í 8 ár ella meiri, hava ikki skyldu at taka við endurvali, fyrr enn 2 fylgjandi valskeið eru liðin. Bygdaráðið/býráðið kann eisini játta umsókn frá persónum, sum vegna ringa heilsu, starv ella virki teirra ella tílíkt hava góða grund til at biðja um at sleppa undan vali.

7 Beinta í Jákupsstovu „Kvinner ingen adgang? Rekruttering av kvinner til bystyret i Tórshavn 1972-1992“, *Norsk Statsvitenskapelig Tidsskrift 1996 (12).*

8 Saman við Holger Arnbjerg og einum studentaskúlaflokki í Hoydølum.

**Talva 6.2 Kyn og val av uppstillaðum monnum ella kvinnum. Prosent.**

| | Veljarin ein maður | Veljarin ein kvinna | Allir veljarar |
|---|---|---|---|
| Veljarin gav sína atkvøðu til ein mann | 80,3 | 56,3 | 67,9 |
| Veljarin gav sína atkvøðu til eina kvinnu | 16,0 | 41,2 | 29,0 |
| Veljarin gav flokkinum sína atkvøðu | 3,7 | 2,5 | 3,1 |
| Til saman | 100 | 100 | 100 |
| N* = | 2402 | 2560 | 4962 |

*N vísir talið á teimum, ið hava svarað. Hetta vóru 52,8 % av øllum, ið greiddu atkvøðu. Í 2000 høvdu 12.571 atkvøðurætt í Tórshavnar kommunu, 9.398 greiddu atkvøðu, v.ø.o. var vallutøkan 74,8 %.

Vit síggja at ein meiriluti bæði millum kvinnur og menn velja ein mann. Fyri kvinnur tykist kyn at hava minni týdning enn fyri menn. Hjá kvinnuligum veljarum fara 56 % av atkvøðunum til menn og 41 % til kvinnur. Ikki minni enn 80 % av monnunum valdu ein mann, og bert 16 % av monnunum valdu eina kvinnu. Úrslitið varð eisini at 10 menn og 3 kvinnur sótu í býráðnum í valskeiðinum 2000-2004. Eftir valið í 2004 varð býtið 7 menn og 6 kvinnur í Tórshavnar býráði. Tíverri varð eingin tilsvarandi kanning gjørd tá. Vit vita tí ikki um tað tá vóru lutfalsliga fleiri kvinnur ella fleiri menn, sum atkvøddu fyri kvinnum.

Seinastu árini hevur útskiftingin í Havn verið eitt sindur størri enn hon var. Men í Føroyum sum heild er gongdin nú at fleiri verða uppafturstillað og afturvald. Talið á kommunupolitikarum minkar, tá talið á kommunum minkar (sí kap. 1). Talva 6.3 vísir hvussu stórur partur av teimum uppstillaðu í 2000 og 2004 høvdu verið uppstillað fyrr, og hvussu stórur partur av teimum uppafturstillaðu vórðu vald í mun til tey fyrstu ferð uppstillaðu.

**Talva 6.3 Uppafturstilling (í prosentum)**

| | Kvinnur uppst. 2004 | Kvinnur uppst. 2000 | Kvinnur valdar 2004 | Kvinnur valdar 2000 | Menn uppst. 2004 | Menn uppst. 2000 | Menn valdir 2004 | Menn valdir 2000 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Uppstillað 1. ferð | 57 | 67 | 36 | 48 | 45 | 45 | 27 | 27 |
| Uppaftur-stillað | 43 | 33 | 64 | 52 | 55 | 55 | 73 | 73 |
| Í alt (N) | 100 (248) | 100 (284) | 100 (50) | 100 (63) | 100 (535) | 100 (667) | 100 (170) | 100 (209) |

Kelda: Dátubasa yvir uppstillað og vald til bý- og bygdaráð

Talva 6.3 gevur fleiri áhugaverdar ábendingar. Fyri tað fyrsta: Tey uppafturstillaðu, bæði tá talan er um kvinnur og menn, hava munandi størri kjans at verða vald enn tey sum stilla upp fyrstu ferð. Í 2004 var talan um uppafturstilling hjá 73 % av teimum valdu monnunum og 64 % av teimum valdu kvinnunum. Fyri tað næsta: Meira enn helvtin av monnunum eru uppafturstillaðir, meðan ein munandi størri partur av kvinnunum stilla upp fyrstu ferð. Hetta er kanska sjálvsagt; kvinnur vóru í nógv ár illa umboðaðar á flokkslistunum. At fleiri kvinnur eru uppstillaðar fyrstu ferð merkir ofta, at fleiri kvinnur koma upp á ein lista, har ikki nógvar kvinnur vóru framman undan. Eisini hava kvinnulistar sítt at siga; tað eru ofta nýggj nøvn á hesum listunum. Enduruppstilling av fleiri kvinnum á listunum í 2004 kann vera eitt tekin um, at kvinnur sum bólkur er í ferð við at styrkja sína støðu í kommunupolitikki.

Ein fyrimunur við afturvali er at royndir politikarar koma at sita við ábyrgdini. Ein vansi við afturvali er, at undirumboðaðir bólkar ikki sleppa fram at við sínum sjónarmiðum. Kvinnur hava verið ein slíkur undirumboðaður bólkur. Talva 6.4 gevur eina ábending um representativitetin í politisku umboðanini, tá tað snýr seg um kyn:

**Talva 6.4 Kynsbýtið í smáum, miðalstórum og stórum kommunum[9] 2004-2008**

| | | Smáar kommunur 3-5 limir í bygda-ráðnum | | Miðalstórar kommunur 7-9 limir í bygda-/býráðnum | | Stórar kommunur 11-13 limir í býráðnum | | Til samans | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Uppstillað | Kvinnur | 57 | 35 % | 135 | 31 % | 56 | 30 % | 248 | 32 % |
| | Menn | 106 | 65 % | 297 | 69 % | 132 | 70 % | 535 | 68 % |
| Vald | Kvinnur | 17 | 26 % | 22 | 20 % | 11 | 24 % | 50 | 23 % |
| | Menn | 48 | 74 % | 87 | 80 % | 35 | 76 % | 170 | 77 % |
| Afturvald | Kvinnur | 8 | | 7 | | 5 | | 20 | |
| | Menn | 30 | | 45 | | 24 | | 99 | |

Kelda: Dátubasa yvir uppstillað og vald

Talva 6.4 vísir at kvinnuumboðanin er frægast í teimum minstu kommununum. Hetta er merkisvert tí kvinnuundirskot er í nógvum smáum bygdum. Talva 6.4 vísir eisini at aftan á valið í 2004 høvdu bert 20 av teimum 50 valdu kvinnunum royndir frá kommunupolitikki.

Ábendingar eru um at bólkurin við royndum í politiskum arbeiði nú tódnar. Færri nývald vera at finna í bý- og bygdaráðum í komandi árum. Við fleiri tøkum umboðssessum høvdu fleiri sloppið at roynt seg sum kommunupolitikari – og kanska eisini seinni sum løgtingspolitikari. Allarflestu løgtingslimir hava roynt seg sum kommunupolitikarar áðrenn tey komu í løgtingið. Um færri í samfelagnum sleppa at royna seg sum fólkavald umboð, fer kommunupolitikkur í minni mun at vera ein skúli í fólkaræði.[10]

Fá av teimum uppstillaðu til valini í 2000 og 2004 munnu fara at

9 Tað er ikki altíð samsvar millum støðd á kommunustýrunum og fólkatal; t.d. hevur Tvøroyrar kommuna bert 7 umboð.

10 Sí J.S.Mill *Considerations on Representative Government,* her frá Sharpe, L.J.

arbeiða fyri at fleiri sleppa fram at í bygda- og býráð. Vit spurdu tey uppstillaðu til valini í 2000 og 2004 um hóskandi tal av bygda- ella býráðslimum. Tey allar flestu hildu at núverandi talið er hóskandi. Bert í bygdaráðum við trimum limum var ein meiriluti ið ynskti fleiri limir (fimm í staðin fyri tríggjar, sum kann vera eitt trupult tal, sí kap. 4).[11] Í Havnini vildu 9 av 38 hækka talið til 15 ella 17, sum er evsta mark eftir lógini. Eingin fór hægri.

Talva 6.5 vísir eitt greitt samband millum listaslag og kommunustødd: Jú fleiri limir í bygda- og býráðum, jú størri er sum oftast kommunan; og jú størri kommunan, tess oftari eru tað flokkslistar til kommunuvalið:

**Talva 6.5 Uppstillað á listum, býtt eftir stødd á bygda- og býráðum.** 2004. Prosent. (N=780)

| | **3 umboð** | **5 umboð** | **7 umboð** | **9 umboð** | **11 umboð** | **13 umboð** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Politiskir flokkar** | **0%** | **0%** | **8%** | **91%** | **36%** | **100%** |
| Fólkafl. | 0% | 0% | 3% | 20% | 11% | 22% |
| Sambandsfl. | 0% | 0% | 2% | 19% | 6% | 17% |
| Javnaðarfl. | 0% | 0% | 3% | 24% | 6% | 17% |
| Sjálvstýrisfl. | 0% | 0% | 0% | 6% | 7% | 11% |
| Tjóðveldi | 0% | 0% | 0% | 22% | 6% | 20% |
| Miðfl. | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% | 13% |
| **Kvinnulisti** | **0%** | **5%** | **9%** | **8%** | **0%** | **0%** |
| **Tvørpolitiskir listar** | **100%** | **95%** | **83%** | **1%** | **64%** | **0%** |
| N | 30 | 133 | 337 | 95 | 112 | 73 |

(1970) „Theories and Values of Local Government“ í *Political Studies,* og Held, David (2006) *Models of Democracy*, Polity Press.

11 Í bygdaráðum við sjey limum eru tað nokkso nógv (41 av 169), ið heldur vildu havt *færri*, also tríggjar ella fimm limir. Hetta svar er óivað samantvinnað við at bygdaráð við trimum og fimm limum eftir lógini sleppa undan at skipa ymsar tvungnar nevndir, sí kap. 4.

Til valið í 2005 vóru eingir flokspolitiskir listar í kommunum við bara 3-5 bygdaráðslimum, men onkur kvinnulisti var. Í kommunum við 7 umboðum var onkur flokkspolitiskur listi; tað er tí at Tvøroyri er í bólki við teimum við bara 7 býráðslimum. Í kommunum við 11 býráðslimum vóru nógv uppstillað á tvørpolitiskum listum. Av teimum trimum kommununum við 11 fólkavaldum er tað bert Klaksvík, sum hevur flokkspolitiska uppstilling. Sunda og Runavíkar kommuna hava tvørpolitiskar listar.

Kvinnulistar eru at finna í teimum miðalstóru kommununum, men ikki í teimum minstu, og heldur ikki í teimum fýra størstu. Sumba og Runavíkar kommuna vóru einastu kommunur har eingin kvinna var vald í 2004. Ein orsøk til úrslitið í Runavík kann vera samanlegging. Í 2004 vórðu fýra áður sjálvstøðugar kommunur við tilsaman 26 fólkavaldum samanlagdar til Runavíkar kommunu við bara 11 umboðum. Bygdir sum hava mist sítt bygdaráð, hava kanska roynt at tryggja sær eitt umboð í nýggja býráðnum. Hugsandi er at tað var lættari at savna seg um ein mann heldur enn um eina kvinnu.

Vit vita lítið ítøkiligt um hvussu uppstillingararbeiðið fer fram í Føroyum.[12] Tó ber til at vísa á nøkur mynstur í uppstillingini – um hon fer fram í ávikavist flokkspolitiskari uppstilling, á tvørpolitiskum listum og við kvinnulistum. Vit skulu nú hyggja neyvari at hesum trimum listasløgum.

## 6.2 Skipan av uppstilling og vali

Kommunuval er fjórða hvørt ár, og vallutøkan er høg (sí talva 4 aftast í bókini). Fram til 1972 var *listaval* í tí merking at flokkurin ella tann bólkurin sum stillaði lista, raðfesti síni valevni framman undan valið. Tann ovasti á listanum varð fyrst vald(ur).[13] Uppgávan hjá veljaranum var

12 Sí tó kanning hjá Bjørg Jacobsen um uppstillingararbeiðið í Vestmanna og Tvøroyri í greinini „Kvinnerollen på Færøyene i endring“ í Berglund, Anna-Karin v.fl. (ritstj.)(2005): *Med periferien i sentrum: En studie av lokal velferd, arbeidsmarked og kjønnsrelasjoner i den nordiske periferien.* Rapport/Norut NIBR Finnmark 2005:14.

13 Tá var sera sjáldsamt at ein kvinna varð vald, tí oftast stóðu menn ovast á listanum.

at velja ein lista. Eisini í dag ber tað til at velja listan, men flestu veljarar nýta nú tann møguleikan, sum verið hevur síðan 1972, nevniliga at seta kross við eitt valevni (sí sum dømi talvu 6.2). Sessirnir í bygdaráðnum ella býráðnum verða so býttir til listarnar við flest atkvøðum til valið (d'Hondt skipan). Tey valdu verða funnin sum tey við flest atkvøðum á hesum listum.

*Flokkslistar*

Í teimum stóru kommunum eru tað oftast politisku flokkarnir, sum skipa fyri uppstilling. Teir seks flokkarnir við umboði í løgtinginum eru (eftir stødd) *Tjóðveldisflokkurin* (frá 1948), *Sambandsflokkurin* (frá 1906), *Fólkaflokkurin* (frá 1936/39), *Javnaðarflokkurin* (frá 1925), *Miðflokkurin* (frá 1991) og *Sjálvstýrisflokkurin* (frá 1906).

Í Tórshavnar kommunu (19.300 íbúgvar til valið í 2004) stillaðu allir hesir flokkar lista til seinasta val. Allir flokkar uttan *Miðflokkurin* fingu umboðan í býráðnum eftir valið í 2004. Eisini í teimum fýra kommununum, sum hava verið tær størstu: Klaksvík (4.900 íbúgvar), Tvøroyri (1.800 íbúgvar), Fuglafjørður (1.600 íbúgvar) og Vág (1.400 íbúgvar), er floksuppstilling vanlig. Tvær kommunur eru aftan á samanleggingar seinastu árini vorðnar millum tær størstu í landinum: Runavík (3.600 íbúgvar) og Sunda kommuna (1.600 íbúgvar). Í hesum báðum kommununum er tvørpolitisk uppstilling (sí talvu 6 aftast í bókini).

Ein veljari kann bara geva *einum* valevni sína atkvøðu.[14] Valskipanin setur fokus á uppstillaðu fólkini heldur enn á politisku skránna hjá flokkinum ella hjá stillarunum. Valskipanin biður ikki veljaran taka støðu til eina politiska „pakkaloysn" við hugsjónum og yvirlýsingum um hvat ið eigur at verða sett í verk í næsta valskeiðið. Í smáum kommunum, har 'øll kenna øll', var persónfokuseringin óivað eisini stór áðrenn valskipanina frá 1972. Vit vita óivað, hvat eitt valevni fer at leggja dent á, um tað er onkur sum vit kenna væl. Roknast kann

14 Til ber sjálvandi at hava eina valskipan, har hvør veljari hevur fleiri atkvøður. Slík skipan hevði kunnað tikið broddin av vandamálum við at veljarar atkvøða fyri tí 'næstbesta' valevninum heldur enn tí 'besta', við tað at tey ikki halda, at tann 'besti' hevur so stóran kjans, og við tað at tey ikki vilja risikera at tann, eftir teirra tykki, 'ringasti' verður valdur. Sí Downs, Anthony (1957) *An Economic Theory of Democracy.* Harper & Row, s. 47 ff.

við at samsvar er millum arbeiðssetningin hjá valevnunum og ta politisku skránna hjá flokkinum / bólkinum aftan fyri listan – um ein slík skrá er. Hinvegin er Tórshavnar kommuna nú vorðin so stór, at ógjørligt er at kenna øll valevnini. Tað sama verður ivaleyst gongdin í øðrum kommunum aftan á samanleggingar. Kortini tykjast valstríð til kommunuval at snúgva seg um at hjálpa veljarunum at finna rætta persón, heldur enn at vísa á ymiskar flokksskráir sum so valevnini hjá flokkinum átaka sær at arbeiða fyri.

Skipanin við persónvali flytir vald frá flokkinum til veljaran. Leikluturin hjá flokkunum er m.a. at finna fram til tey fólk ið skulu á listan. Síðan 1972 hava flokkarnir ikki havt vald at tryggja sær, at tey valevni sum flokkurin helst vil hava at umboða seg, verða vald fyrst.[15]

Sum nevnt eru tað nógv ið hava hug at verða vald, serliga til býráðini í teimum stóru kommununum. Kommunurnar eru stórar og býráðini hava bert 13 ella 11 limir. Kappingin um at sleppa upp á listan hjá flokkinum er tí hørð. Men tá uppstillingin til kommunuvalið er liðug, 'abdisera' flokkarnir. Teir blanda seg ikki beinleiðis upp í valstríðið við geva greið boð um, hvørji valevni á listunum teir serliga vilja hava at umboða seg. Oftast er uppstillingin *alfabetisk*. Tað ber til at seta valevnini upp við tí raðfesting sum flokkarnir meta vera best, sum eina kunning til veljararnar, men kanska hetta verður hildið at vera ov trupult. Flokksleiðslurnar mugu eisini hugsa um at halda innanhýsis semju í flokkinum. Meira løgið er kanska at *aftan á* valið eru flokkarnir næstan ósjónligir í føroyskum kommunupolitikki.

Lutfallið millum veljarar og løgtingslimir og millum veljarar og býráðslimir í Tórshavnar kommunu er umleið tað sama: 1000:1. Býráðið í Havn hevur týðandi málsøki at røkja og eina stóra fíggjarætlan at umsita. Kortini vísa politisku flokkarnir lítlan áhuga í at stýra tí politikki sum verður førdur í kommununi, t.v.s. at stýra í mun til hugsjónarligu stevnuna hjá flokkinum. Hetta verður latið býráðs-

15 Í ein vissan mun ber til at verja móti 'óhepnari' umboðan á uppstillingarfundunum. Ein orsøk til at ein flokkur í Havn í 1972 valdi bert at uppstilla menn sigst vera, at teir vóru bangnir fyri at kvinnurørslan kundi fara at mæla til at ein kvinna varð vald, og tá hevði onkur maður ikki sloppið inn. Sí Jákupsstovu 1996, op.cit.

limunum at meta um. Ein valskipan við persónfokusering heldur enn fokusering á flokkspolitiska skrá fær við øðrum orðum ávirkan á sambandið millum veljarar og vald. Politiski flokkurin verður ósjónligur, hann er sjáldan ella ongantíð ein stovnur sum stendur alment fram og vísir ábyrgd fyri at tey flokkspolitisku umboðini í kommununi halda seg til flokksskránna og at tey verja áhugamál hjá veljarabólkum hjá flokkinum.

Tað er lítið skrivað um virksemi í føroyskum flokkum, t.d. um skipan og arbeiðslag. Hetta evnið kundi verið granskað meira. Samanumtikið tykist tað í føroyskum kommunupolitikki vera lítil munur millum flokkspolitiska virksemið og tað meira óskipaða virksemið, sum liggur til grund fyri tvørpolitiskum uppstillingum í kommununum.

*Tvørpolitiskir listar*

Í flestu kommunum fer uppstillingin fram á tann hátt, at fólk framman undan valið finna saman at gera ein lista. Onkrir av hesum listunum hava óivað ein partapolitiskan profil, sum tey í bygdini vita um tá tey kenna valevnini. Tað eru nógvir flokkar og nógvar smáar kommunur. Tí høvdu listarnir mangan verið stuttir, um uppstillingin skuldi verið flokkspolitisk. Har afturat kemur at avbjóðingar og stríðsmál í kommununum ofta ikki eru tey somu sum í landspolitikki. Úrslitini frá spurnakanningunum benda á trý sløg av tvørpolitiskum listum: 1) listar at tryggja umboðan hjá einum landafrøðiligum øki (bygd ella býlingi), 2) listar at arbeiða fyri einum serligum máli, og 3) listar sum skulu tryggja „góðum fólki“ sæti í bygdaráði ella býráði.

Felags fyri tvørpolitisku listarnar er at teir mobilisera lokalt fyri lokal mál. Tað hevði verið áhugavert at kanna, hvussu grundfestir og støðugir hesir listar eru í kommunum. Óivað er tað ymiskt í ymiskum kommunum.

Løgtingsvalini eru sum kunnugt skipað við støði í teimum landspolitisku flokkunum.[16] Løgtingspolitikkurin er kortini merktur av, at løgtingsumboðini hava tilknýti til eina heimkommunu. Løgtings-

16 Onkuntíð er ein nýggjur listi ella flokkur sum hvørvur eftir stuttari tíð.

umboðini hava ofta sínar fyrstu politisku royndir í kommunupolitikki. Til ber at hava sæti í bý- ella bygdaráði samstundis sum á løgtingi. Ofta er tað júst tí at tú skalt verja lokal áhugamál, at tú hevur fingið ta álitisváttan at vera vald(ur) inn á ting. Fyri kommununa kann tað vera av týdningi, at fólk í bygdaráðnum ella býráðnum eisini eru virknir limir í einum landspolitiskum flokki, og at hesi hava gott samband við fólk í løgtingi, í landsstýri og í landsumsiting.[17] Tørvandi serkunnleiki hjá teimum smáu kommununum kann oftani kompenserast við at tær hava gott samskifti við landið. Samstundis er lokalkunnleiki hentur, tá landsmyndugleikarnir skulu taka avgerðir t.d. um vinnumenningarmál. Samanborið við onnur lond hava Føroyar ikki stórar stovnar ið kunnu veita servitan og tøkniliga hjálp, t.d. í samband við økismenning. Tær flestu loysnirnar koma fram í samráðingum í løgtinginum. Tí verður sæti í bý- ella bygdaráði ofta eitt týdningarmikið stig til sæti í løgtinginum. Av teimum luttakandi í okkara spurnakanningum sum eru kommunustýrislimir, hava umleið 10 % verið ella eru løgtingslimir ella varalimir til løgtingið.

Í innganginum var nevnt at føroyskur kommunupolitikkur tykist at hava nøkur eyðkenni hjá teimum báðum modellunum hjá Goldsmith *klient-patrón* og *búskaparligur menningarpolitikkur.* Hugtøkini *clientelism* og *patronage* vísa til samspælið millum veljara og politikara. Goldsmith vísir á at sammett við politikarar í Skandinavia og Stórabretlandi eru kommunupolitikarar í Suðureuropa ofta minni heftir av einum hierarkiskt stýrdum flokki, við flokksfundum sum gera viðtøkur um politiskar flokksskráir sum øll flokksumboð skulu fylgja, o.s.fr. Suðureuropeiska kommunupolitiska skipanin og mentanin kann virka minni stirvin og óliðilig enn tann Skandinaviska. Hinvegin er fólkaræðið minni tryggt. Fyri at mótvirka *klientelismu* royna tey nú í Frankaríki og Italiu at avmarka møguleikarnar fyri at sita í fleiri ymiskum álitisstørvum samstundis. Fyri at mótvirka tað sterka fokusið á einstaklingar valdi Grikkaland at avtaka skipanina við preferansuvali (tað at seta kross fyri valevni) í 1982.[18] Finnland

17 Sbr. kap. 2, mynd 2.2; sí eisini kanningina hjá Kjellberg 1965, op.cit.
18 Heidar, Knut og Einar Berntzen (1998) *Vesteuropeisk politikk.* Universitetsforlaget.

við eini valskipan lík tí føroysku samtykti í 2000 eina lóg, „Lagen om anmälan av kandidaters valfinansiering (414/2000)“[19] sum krevur almannakunngerðing av hvussu nógv valstríðið hjá hvørjum valevni hevur kostað, og hvør ið hevur fíggjað. Grundgevingin er at mótvirka sterkar bindingar millum tann einstaka politikaran og fólk ella bólkar, sum hava hjálpt valevninum í valstríðnum.

Galdandi samfelagsskipan í Føroyum (og Íslandi) gevur gróðrarlíkindi fyri korruptión og nepotismu, skrivar Sundström[20]:

> Eftersom ekonomin på framförallt Island och Färöarna domineras av familjföretag finns endast förhållandevis små ekonomiska resurser och tekniska kunskaper för långsiktig planering. I stället utgör de en grobund för starka inslag av korruption och nepotism i den ekonomiska, politiska och sociala livet.[21]

Henda niðurstøða líkist tí sum Goldsmith nevnir *búskaparliga menningarmodellin.* Her er sjónarmiðið at týdningarmesta uppgávan hjá kommununi er at stuðla lokala búskaparligari menning. Men við hvørt verður samstarvið millum almennar og privatar aktørar óformligt og dult, og í andsøgn við fólkaræðislig og formlig krøv um m.a. opinleika. Bæði í *klient-patrón modellinum* og í *búskaparliga menningarmodellinum* er vandi fyri at privatbúskaparlig áhugamál verða tengd at politiskum framsøkni. Tað kann geva teimum, ið eru búskaparliga væl fyri, stóra ávirkan á politiskar avgerðir, bæði í kommununum og fyri alt landið. Henda ávirkan verður ikki minni, um politikarnir verða rekrutteraðir úr búskaparligu elituni, og ikki umboða „meiniga mannin“, sbr. kap. 7.

---

19 http://www.vaalit.fi/tulostus/18779.htm

20 Sundström, Eva (2006): Välfardspolitiska förhållanden i Västnorden. TemaNord 2006:250. Sundström vísir her til Jónsson, Ivar (1995) *West-Nordic Countries in Crisis. Neo-structuralism, Collective Entrepreneurship and Microsocieties Facing Global Systems of Innovation.* København: Nyt fra Samfundsvidenskaberne. Institut for Organisation og Arbejdssociologi. Handelshøjskolen i København.

21 Sundström, Eva (2006), s. 65.

*Kvinnulistar*

Í 1902 fingu ógiftar kvinnur við minst 4 kr. í skattgjaldi, atkvøðurætt.[22] Fyrstu ferð allar kvinnur høvdu atkvøðurætt var til fólkaatkvøðuna um brennivínssølu í 1907.[23] Árið eftir, 27. mai 1908, varð nýggj kommunulóg fyri Tórshavn viðtikin. Nýggja lógin ásetti at bert fólkavald skulu sita í býráðnum, at val av býráðslimum skuldi vera loynilig og skrivlig – og at bæði kvinnur og menn høvdu atkvøðurætt og valbæri. Í 1909 varð eisini kommunulógin fyri kommunurnar broytt samsvarandi.

Kortini var eingin kvinna vald inn í býráðið í Havn fyrr enn í 1956.[24] Ein forðing var valskipanin við listavali, og at flokkarnir ella listarnir bara settu menn ovast á listan. Um kvinnurnar skuldu fáa sæti í býráðnum, máttu tær standa ovarlaga á einum flokkslista – ella gera sín egna lista. Hetta seinasta valdi Kvinnufelagið í Havn at gera í 1956. „Orsøkin til at kvinnurnar stillaðu upp var tann, at tær hildu tíðin var komin, at eisini konufólk fingu størri ávirkan á samfelagið og vóru við, har avgerðirnar vóru tiknar".[25] Úrslitið var, at Malla Samuelsen varð vald inn á tí tvørpolitiska kvinnulistanum. Hon var limur í býráðnum eitt valskeið, fram til 1960.[26] Tann næsta kvinnan sum varð vald í Havn, var Jona Henriksen. Hon sat í býráðnum frá 1968 til 1972 fyri javnaðarflokkin, men stóð ikki á lista til valið í 1972.[27] Tá veljararnir í 1972 fingu størru ávirkan á persónvalið, varð

22 Sí Malan Simonsen: *Kvinnurøddir. Kvinnur í almenna kjakinum 1890-1902.* Mentunnargrunnur Studentafelagsins 1985, fótnota 64. Her verður víst á, at løgtingið eisini hevði viðgjørt eitt uppskot um at geva giftum konum, har menninir betaltu 8 kr í skatti, atkvøðurætt. Uppskotið fall við 9 atkvøðum móti 7. Sí Tingakrossur aug-sept 1902 og løgtingstíðindi 1902.

23 Sí Elin Súsanna Jacobsen (1995): *Rúsdrekka – siðir og ósiðir.* Rúsdrekka- og Narkotikaráðið

24 Tíverri er bara søgan um kvinnuumboðan í Tórshavn kannað her. Vit vita um onkra kvinnu sum hevur verið vald til okkurt bygdaráð áðrenn 1956, men hvussu kvinnuumboðanin í kommunustýrum kring landið var fyrr, er ikki kannað.

25 Samrøða við Mallu Samuelsen, Sosialurin nr. 45, 6. mars 1993.

26 Malla Samuelsen var eisini fyrsta kvinna, ið tók sæti í løgtinginum. Í 1964 umboðaði hon sjálvstýrisflokkin sum varalimur.

27 Karin Kjølbro (Joensen) og Jona Henriksen vóru fyrstu kvinnur, ið vórðu valdar í løgtingið. Hetta hendi í 1978. So við og við komu kvinnur í fleiri

eingin kvinna vald. Tólv ár gingu og fýra val vórðu hildin uttan at nøkur kvinna varð vald. Í 1984 kom Lisbeth Petersen[28] inn fyri sambandsflokkin. Í 1988 komu tvær afturat, Kristianna Rein fyri tjóðveldisflokkin og Katrin Dahl fyri fólkaflokkin. Síðan hava sitið minst tríggjar kvinnur (23 %), men gongdin móti javnari kynsbýti hevur verið tung. Til seinasta val í 2004 vórðu seks kvinnur valdar (46 %). Spennandi verður um kynsbýtið eisini verður so javnt í Havn aftan á valið í 2008.

Eisini verður spennandi um kvinnuumboðanin í kommununum sum heild verður betri í samsvari við kynsbýtinum í landinum sum heild. Frá 1992 og fram til 2000 var býtið millum kvinnur og menn í bygda- og býráðum 15-16 % kvinnur og 84-85 % menn. Frá 2000 og til 2008 hevur lutfallið verið 23 % kvinnur og 77 % menn (sí talvu 5 aftast í bókini um kynsbýtið í teimum einstøku kommununum). Arbeiðið hjá kvinnurørsluni fyri betri kvinnuumboðan fer kanska at bera ávøkst. Hóast kvinnuumboðanin minkaði í nøkrum kommunum til valið í 2004, vóru bert tvær kommunur (Runavík og Sumba) uttan valda kvinnu. Síðan 1994 hava Føroyar havt eina javnstøðulóg[29]. Undirtøkan fyri arbeiðinum hjá Demokratia vísir at allir politiskir flokkar nú hava sum mál at fáa betri kvinnuumboðan í løgtingið og í bý- og bygdaráðum.

Kvinnurørslan hevur í góða hálva øld roynt at fáa betri kvinnuumboðan í kommunustýrum. Grunngevingin hevur oftast verið at hetta má til um kommunan skal fáa barnagarðar, røktarheim og aðrar almennar vælferðarstovnar. Kvinnurnar hava v.ø.o. hildið tað vera neyðugt at fáa politiska umboðan, um uppgávur, sum hava verið teirra ábyrgd, skulu *deprivatiserast* og verða almennar uppgávur. Kvinnurørslan ynskir at kommunan fær ein vælferðarprofil (sbr. vælferðarmyndilin hjá Goldsmith).

álitisstørv: Í 1985 varð Jóngerð Purkhús landsstýriskvinna í fíggjarmálum, og í 1993-94 var Marita Petersen løgmaður.

28 Lisbeth Petersen var borgarstjóri í Tórshavnar kommunu frá 1992 til 1996. Hon sat í býráðnum frá 1984 til 2000.

29 Ísland fekk sína javnstøðulóg í 1976, Danmark sínar í 1976 og 1978, Noreg sína í 1978, og Svøríki í 1979 (Haavio-Mannila, Elina (ritsj.) (1983) *Det uferdige demokratiet: Kvinner i nordisk politikk.* Oslo:Nord, s. 218).

Ein strategi hjá kvinnunum hevur verið at gera kvinnulistar til valið. Sum nevnt var hetta fyrstu ferð roynt í 1956, tá Malla Samuelsen varð vald í Havn. Broytingarnar í vallógini í 1972 bóru kanska við sær at tað bleiv torførari hjá kvinnum at sleppa upp á listarnar hjá flokkunum. Flokkarnir høvdu eina, tvær ella í mesta lagi tríggjar kvinnur á listanum. Tilsaman vóru bert 13 kvinnur uppstillaðar í 1972, t.v.s. at 90 % av teimum uppstillaðu vóru menn,[30] og til kommunuvalið í 1976 var onkur flokkur við ongari kvinnu á listanum. Ein avleiðing varð at Havnar Kvinnufelag í 1980 gjørdi av at gera ein kvinnulista, soleiðis sum tær høvdu gjørt í 1956. Hetta trýsti hinar flokkarnar til at seta kvinnur á sínar listar. Listarnir vóru nógvir og atkvøðurnar spjaddar, og úrslitið varð at eingin kvinna varð vald í 1980, hvørki á kvinnulistanum ella á flokslistunum. Aftur í 1984 var kvinnulisti í Havn, men eingin varð vald á hesum lista. Kvinnurnar fingu kortini eitt umboð í 1984, Lisbeth Petersen varð vald fyri sambandsflokkin hetta árið. „Parties act to maximize votes".[31] Flokkarnir skiltu boðskapin. Um flokkarnir skuldu vinna í kappingini um veljarar, máttu teir hava kvinnur á listanum, sum veljararnir vildu atkvøða fyri – hóast hetta kundi bera við sær, at ein maður í flokkinum mátti víkja sæti.

Síðan 1984 hevur eingin kvinnulisti verið í Havn, men til valið í 2004 vóru aftur royndir gjørdar at fáa ein kvinnulista í Havn. Kvinnur vóru vónsviknar um at kvinnuumboðanin var minkað úr 31 % í 1996 til 23 % í 2000 (frá fýra til tríggjar kvinnur av til saman trettan umboðum). Eingin kvinnulisti varð tó gjørdur, men tað kann hugsast, at henda mobilisering gjørdi at fleiri kvinnur á teimum flokkspolitisku listunum vórðu valdar. Í 2004 vórðu sum nevnt seks kvinnur valdar.

Tað er týðiligt at kvinnulistar hava størst møguleika at fáa síni valevni vald í kommunum uttan flokksuppstilling.[32] Í kommunum

30 Jákupsstovu 1996 op.cit.
31 Downs 1957 op.cit., s. 300.
32 Jacobsen, Bjørg og Beinta í Jákupsstovu (2006) „Erfaringer fra kvindelisterne i færøsk politik" í NIKKmagasin 1-2006 (www.nikk.uio.no); Jákupsstovu og Kjersem (2005).

við flokksuppstilling fara tey, ið er trúføst við flokkin, heldur at geva onkrum á flokkslistanum sína atkvøðu enn onkrari, ið stillar upp á kvinnulista. Tá tað snýr seg um at velja millum valevni á flokkslistanum, hugsa summir veljarar helst strategiskt og velja soleiðis at atkvøðan ikki „fer fyri skeyti". Tað kann merkja at valið fellur á tann (mannin), ið verður hildin at vera *næstbestur*. Valið av tí *næstbesta* kann forða at tann ið hildin er at vera *ringastur*, verður valdur. Eitt (kvinnuligt) valevni ið verður hildið at vera *best*, fær tí ikki atkvøðuna.[33]

Í kommunum uttan flokksuppstilling eru tað ofta færri listar og valstríðið er ikki so hart. Í hesum kommunum hava kvinnulistar borið við sær at tað eru færri og færri kommunur uttan kvinnuumboð (sí talvu 5 og 7 aftast í bókini).

Kvinnulistar hava verið brúktir í fleiri kommunum kring landið, og givið úrslit (sí talvu 6 og 7 aftast í bókini). Bestu úrslitini hevur kvinnulistin í Vestmanna havt: Í 1988 vóru tríggjar kvinnur valdar og í 1992-2004 var meirilutin av bygdaráðnum kvinnur. Til valið í 2004 fingu tær kapping av einum manslista. Reinir manslistar hava verið kring landið til øll val, í 2004 vóru 9 slíkir manslistar. Eingin tykist at geva hesum gætur, uppmerksemi er um teir reinu kvinnulistarnar, sum í 2004 vóru seks.

Kvinnulistar hava trýst flokkslistar til at bjóða kvinnum pláss á sínum listum. Men skulu munandi fleiri kvinnur inn, eru onkrir menn sum ikki verða afturvaldir. Um øll sæti eru upptikin í bygdaella býráðnum, nyttar lítið at mobilisera kvinnur til at lata seg stilla upp – á kvinnulista, flokkslista ella bygdalista.

## 6.3 Nýggj kommunuskipan – frá tvørpolitiskari til flokkspolitiska uppstilling?

Føroyskur kommunupolitikkur hevur verið myndaður av fólki, har meginparturin hevur sitið í bygda- og býráðunum í fleiri valskeið. Í flestum kommunum hevur uppstillingin verið tvørpolitisk. Stríðsmálini hava ikki fylgt teimum flokkspolitisku, sum serliga snúgva seg um hugsjónir viðvíkjandi búskaparligum, tjóðskaparligum og nú

33 Sí Downs 1957, op.cit.

eisini trúðarligum politikki. Kvinnulistarnir hava víst á mótsetningar millum áhugamál hjá kvinnum og monnum í kommununi, serliga við atliti til almennar vælferðartænastur. Valgransking í øðrum londum vísir at lutfalsliga eru fleiri og fleiri kvinnur at finna í vinstraveinginum í politikki, og alt fleiri menn á høgraveinginum.[34] Áhugamálini hjá nógvum kvinnum er knýtt at teirra leikluti sum mammur og døtur, sum brúkarar av vælferðartænastum, og sum løntakarar á vælferðarstovnum. Menninir eru oftari í privatari vinnu, og bólkurin av barnleysum monnum veksur meira enn bólkurin av barnleysum kvinnum.[35] Kortini kann tað hugsast at *kyn* sum frá líður ikki fer vera ein avgerandi stríðslinja í føroyskum kommunupolitikki. Heldur fara listarnir at umboða ymiskar hugsjónir um hvussu stóra ábyrgd felagsskapurin skal taka av tí einstaka. Flokkarnir fara tá at gerast meira sjónligir og geva greiðari boð um, hvat teir meina er eitt gott samfelag.

---

34 Hellevik, Ottar (2008) *Jakten på den norske lykken : Norsk monitor 1985-2007.* Oslo, Universitetsforlaget.

35 Skrede, Kari og Marit Rønsen „Likestilling og fruktbarhet" í NIKKmagasin 1-2006.

# 7

# Politisk umboðan[1]

*Beinta í Jákupsstovu:*

Grundin undir føroyskum kommunupolitikki er val av fólkavaldum umboðum. Veljararnir geva teimum valdu álitið at taka avgerðir sína vegna; men hvussu væl umboða kommunupolitikarnir borgararnar? Samansetingin av bý- og bygdaráðum kann siga nakað um hvussu væl tann politiska skipanin virkar. Um tað tykist vera truplari hjá summum bólkum at fáa umboðan enn hjá øðrum, verður tað vanliga mett sum órættvíst. Um hetta er støðan aftan á hvørt val, kann tað skaða trúðvirðið hjá kommunustýrunum, og kommunuskipanin kann missa sína legimitet.

Evnið fyri hesum kapitli er rekruttering av kommunupolitikarum. Fyrst hyggja vit at tí sum sýnist eyðkenna tey uppstillaðu og valdu, og hvat teirra hugsan er um politiska virksemið. Síðan verður hugt at hvussu skipanin av valstríðnum hevur ávirkan á hvør ið verður vald(ur). Grundarlagið fyri lýsingini er úrslit frá kanningum, vit hava gjørt í samband við hesa verkætlan.[2] Vit hava savnað úrslitini frá uppstillingum og valum til bý- og bygdaráð í eina dátubásu. Har finna vit upplýsingar um kynsbýti og um hvussu drúgvar royndir hesi fólk hava í kommunupolitikki. Harafturat hava vit úrslitini frá tveimum spurna-

1 Hetta kapitlið hevur støði í tveimum frágreiðingum skrivaðar saman við Eli Kjersem: *Rekruttering av færøyske kommunepolitikere* (Møreforsking 2005:4) og *Politisk representasjon i et kommunepolitisk system i endring* (Møreforsking 2008:7).

2 Tíverri er lítið til av almennum tølum um føroyskar politikarar. Tað ber ikki til at kanna aldursamanseting, útbúgvingarstøðið, inntøkubýtið, bústaðar- og familjuviðurskifti v.m. uttan at gera egnar spurnakanningar; og úrslit frá spurnakanningum kunnu ikki metast móti støðuni í landinum ella kommununi sum heild, tí slík tøl eru ikki savnaði síðan fólkateljingina í 1977.

kanningum fyri uppstillað í 2000 og 2004.[3] Øll tey uppstillaðu vórðu spurd. Ikki øll svaraðu, men hjálagda talva 8 aftast í bókini bendir á at tey ið svaraðu, umboða allan hópin rættuliga væl.

## 7.1 Hvørji eru kommunupolitikarar?

Hvørji eru tey uppstillaðu og valdu, og hvørjum eru tey upptikin av? Politisk umboðan kann metast út frá hesum báðum metingarstøðunum. Tað fyrra nevnist ofta *spegilsumboðan*; tá verður hildið, at fyri at umboðanin kann metast sum góð, skal samfelagsbygnaðurin endurspeglast í umboðanini. Tey valdu skulu við øðrum orðum umboða allar sosialar bólkar í samfelagnum. Tað seinna verður nevnt *meiningsumboðan*; tá verður dentur lagdur á, at politikarnir skulu umboða hugsanina hjá borgarum í kommununi.[4] Tað nýtist ikki at vera nakar mótsetningur millum hesi bæði sløgini av umboðan – at vera ein spegilsmynd av samfelagnum og at umboða hugsanina hjá fólki. Tá dentur verður lagdur á sosiala umboðan, er tað út frá tí fatan, at lívsroyndir hava ávirkan á hvussu fólk hugsa. Fólkastýri er ein máti at loysa ósemjur, so at tað slepst undan harðskapi og kúgan. Politiskar avgerðir verða tiknar út í frá, hvussu politisk umboð bera fram málið, og hvussu tey í felag meta støðuna. Politiska kjakið litast av luttakarunum. Jú breiðari lívsroyndargrundarlag, jú størri er ivaleyst møguleikin fyri at borgarar flest góðtaka politisku loysnina og halda hana vera beina.[5]

Tað ber sjálvandi ikki til at fáa umboðan fyri allar meiningar, áhugamál og lívsroyndir í eitt kommunustýri. Ætlanin við hesum kapitli er at vísa, hvørji ið nú sita í føroyskum bý- og bygdaráðum. So ber til at umhugsa, um onkrir bólkar kunnu vera undirumboðaðir.

3 Fleiri talvur eru at finna í frágreiðingunum frá spurnakanningunum, sum eru at finna á www.javnratt.fo.

4 Sí Norderval, Ingunn (1993) *Rekruttering og representasjon.* Rapport 9315, Møreforsking Molde; Ringkjøb, Hans-Erik (2000) „Tar partiene representativitet på alvor?“ í Offerdal, A. og J. Aars (ritstj.) *Lokaldemokratiet. Status og utfordringer.* Kommunenes Sentralforbund.

5 Offerdal, Audun (1992) *Den politiske kommunen.*Det Norske Samlaget; Phillips, Anne (1995) *The Politics of Presence.* Oxford, Clarendon Press.

Sum Anna G. Jónasdóttir[6] vísir á, týðir orðið *interesse* „at vera ímillum". Kanska áhugamál hjá nøkrum bólkum ikki verða nóg væl vard, tí eingin er at hugsa um tey?

Ein ábending um skeiva umboðan er at fleiri menn verða valdir enn kvinnur. Talva 7.1 vísir høvuðstølini um uppstillað og vald til kommunuval síðan 1992:

**Talva 7.1 Uppstilling og val í 2004 – 1992**

| | **Valið í 2004** | | **Valið 2000** | | **Valið 1996** | | **Valið 1992** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Uppstillað** | 783 | % | 951 | % | 917 | % | 1048 | % |
| Kvinnur uppstillaðar | 248 | 32 | 284 | 30 | 213 | 23 | 212 | 20 |
| Menn uppstillaðir | 535 | 68 | 667 | 70 | 704 | 77 | 836 | 80 |
| **Vald** | 220 | | 272 | | 280 | | 281 | |
| Kvinnur valdar | 50 | 23 | 63 | 23 | 44 | 16 | 43 | 15 |
| Menn valdir | 170 | 77 | 209 | 77 | 236 | 84 | 238 | 85 |

Kelda: Dátubasa yvir uppstillað og vald

Í 1. kapitli vístu vit á hvussu talið á kommunupolitikarum er minkað seinastu árini. Talva 7.1 vísir, at eisini talið á uppstillaðum er minkað. Tað minkaði frá 951 í 2000 og til 783 í 2004, also 18 % bara hetta skeiðið. Kanningar aðra staðni frá[7] vísa at áheitan á fólk at stilla upp ofta virkar politiskt mobiliserandi, eisini hjá teimum ið ikki verða vald. At verða víst tann sóma at verða spurd, eggjar til at fara upp í annað politiskt virksemi hetta valskeiðið, og kanska verða vald næstu ferð. Ein ótilætlað avleiðing av kommunuskipanarbroytingum kann verða at færri í Føroyum fara at verða mobiliserað til politiskt virksemi.

6 Jónasdóttir, Anna G. (1985): „On the Concept of Interest, Women's Interests and the Limitations of Interest Theory", í Jones, Kathleen and Anna G. Jónasdóttir (1985): *The Political Interests of Gender.* Sage.

7 Offerdal, Audun og Jacob Aars (2000) „Deltakelse og aktivisering i lokalpolitikken" í Offerdal, A. og J. Aars (ritstj.) *Lokaldemokratiet. Status og utfordringer.* Kommunenes Sentralforbund

Talva 7.1 vísir eisini kynsbýtið. Lutfallið millum uppstillaðar kvinnur og menn er umleið tað sama í 2000 og 2004. Fyri hvørjar sjey uppstillaðar menn eru tað tríggjar uppstillaðar kvinnur. So kemur valið. Tá verða kvinnur aftur skildar frá, tí menn fingu sum heild fleiri atkvøður enn kvinnur. Soleiðis verður lutfalsliga kvinnuumboðanin uppaftur skeivari millum tey valdu, bert 23% eru kvinnur.[8] Sum víst í talvu 7.1 minkaði talið á kvinnum, sum vórðu valdar til bý- og bygdaráð til seinasta val: Í árunum 2000-2004 vóru tær 63, í valskeiðinum 2004-2008 vóru tær 50.

Skeiva kynsbýtið í bæði løgtingi og kommunustýrum er væl kent, og ymiskar royndir verða nú gjørdar fyri at fáa fleiri kvinnur valdar. Men hvussu er politiska umboðanin í aðrar mátar? Vit hava sum nevnt gjørt spurnakanningar ið kunnu geva nøkur svør. Sum eina fyrstu lýsing kunnu vit hyggja at eyðkennum hjá teimum uppstillaðu: Hvat er miðalaldurin, hvussu nógv eru í vinnu, og hvussu nógv eru fødd í kommununi, sí talva 7.2:

**Talva 7.2 Eyðkenni hjá uppstillaðum til valið í 2004**

| | Kvinnur | Menn | Øll |
|---|---|---|---|
| Miðalaldur | 45 ár | 47 ár | 46 ár |
| Fulltíðararbeiðandi | 57 % | 88 % | 76 % |
| Parttíðar arbeiðandi | 33 % | 6 % | 16 % |
| Undir útbúgving | 9 % | 3 % | 5 % |
| Fødd í kommununi | 55 % | 77 % | 69 % |
| Tilflytarar | 45 % | 23 % | 31 % |
| N* | 144-147 | 240-243 | 387-392 |

Kelda: Spurnakanning millum øll uppstillað í 2004

*Ikki øll svara øllum spurningum.

---

8 Sama mynstrið síggja vit í øðrum londum, har valskipanin loyvir veljarunum at raðfesta menn hægri enn kvinnur, sí Hellevik, Ottar og Tor Bjørklund (1995) „Velgerne og kvinnerepresentasjon“, í Nina C. Raaum (ritstj.) *Kjønn og politikk.* Oslo, Tano.

Miðalaldurin á teimum uppstillaðu er also umleið 46 ár, men hvat man hetta miðaltal krógva í aldursspreiðing? Talva 7.3 vísir aldursbýtið á teimum uppstillaðu:

**Talva 7.3 Aldursbýti á uppstillaðum til valið í 2004. Prosent**

| Aldursbólkur | Kvinnur | Menn | Øll |
|---|---|---|---|
| 20-29 ár | 5 | 5 | 5 |
| 30-39 ár | 24 | 20 | 22 |
| 40-49 ár | 42 | 34 | 37 |
| 50-59 ár | 24 | 31 | 28 |
| 60-69 ár | 5 | 9 | 7 |
| 70-79 ár | 1 | 1 | 1 |
| N | 147 | 242 | 389 |

Kelda: Spurnakanning millum øll uppstillað í 2004

Hvussu samsvara hesi tøl við aldursbýtið í øllum landinum? Bert 13 % av fólkinum, og 18 % av teimum við atkvøðurætti, eru millum 40 og 49 ár, men 37 % av teimum uppstillaðu og 42 % av teimum valdu eru í hesum aldursbólki.[9] Millum tær *valdu*[10] *kvinnurnar* í 2004 eru 51 % í hesum aldursbólki, men nú verða fleiri ungar kvinnur og eisini fleiri eldri valdar í mun til valskeiðið 2000-2004. Tá vóru ikki færri enn 64 % av kvinnunum millum 40 og 49 ár. Hjá monnunum eru ikki so stórar broytingar hendar frá 2000 til 2004. Veljararnir velja teir eldru fram um teir ungu. Hetta hevur sjálvandi samband við, at uppafturstillað verða lættari vald enn nýuppstillað.

At fá ung stilla upp og verða vald kann eisini vera tí tey eru barna-

9 Hetta velst sjálvandi um okkara spurnakanning er eftirfarandi, t.v.s. at ikki hesin aldursbólkurin er betri umboðaður enn aðrir millum tey, sum hava svarað spurnabløðunum. Tíverri eru ikki føroysk hagtøl um politiska luttøku, sbr. t.d. www.SSB.no Statistikkbanken, underemne 00.01 Valg.

10 Av tí at talið á teimum valdu er so lítið, og at serliga talið á valdum kvinnum framman undan er lítið, hava vit valt at viðgera bæði bý- og bygdaráðslimir og tey, sum eru vald til annað álitisstarv, sum *vald*.

bundin. Tey flestu[11] eiga børn, eini trý í miðal. Men færri kvinnur enn menn eiga nógv børn[12], og færri kvinnur enn menn eiga smá børn[13], so mammurnar tykjast at vera meira barnabundnar enn páparnir.

**7.2 Hvørjir bólkar í samfelagnum eru best umboðaðir?**

Okkara spurnakanningar millum uppstillað í 2000 og 2004 vísa at í Føroyum eru tað nógv, sum hava hug at verða vald inn á bý- og bygdaráð. 57 prosent av teimum uppstillaðu og 64 prosent av teimum valdu siga seg at hava hug til at stilla uppaftur til næsta val.[14] Sjálvandi eru tað summi sum siga hetta einki vera fyri seg: Sum politikari verður tú noydd at gera úrskurð, og ikki ber altíð til at gera øllum til vildar. Men í teimum flestu føroysku kommununum er tað ein kapping um at fáa sess í bygda- ella býráðnum. Í so máta er støðan í Føroyum (og Danmark og Íslandi) frægari enn í øðrum londum í Europa, har tey uppliva politiska líkasælu, at valluttøkan fellur, og at tað er ringt at fáa fólk at stilla upp.[15] Ein orsøk til at føroyingar hava hug til kommunupolitikk kann vera, at hetta er arbeiði við skjótum sjónligum úrslitum – meðan t.d. nógvir norskir kommunupolitikarar kenna máttloysi, tí kommunukassin er so tómur í mun til alt ið kommununi er álagt at gera, og tí eingi útlit eru til at nakað yvirskot verður til at seta ymiskt í verk sum lokalpolitikarnir sjálvir taka stig til.

Kommunusamanlegging merkir at færri fólkavald umboð skulu veljast. Til valið í 2000 skuldu 272 bygda- og býráðslimir veljast, til

11 95 % av kvinnunum og umleið 90 % av monnunum sum hava svarað spurnakanningunum.

12 Í 2004 áttu 16 % av teimum valdu kvinnunum, og 23 % av teimum valdu monnunum 4 børn ella meira.

13 Í 2004 áttu 23 % av teimum valdu kvinnunum, og 38 % av teimum valdu monnunum, børn undir 10 ár.

14 Hetta eru tey, sum hava svarað antin „Ja eg havi hug at stilla upp“ ella „Ja, kanska”; svar millum uppstillað í 2000: 27%+30%, svar millum uppstillað í 2004: 28 %+29%; svar millum vald í 2000: 31%+33%, svar millum vald í 2004: 32%+32%.

15 Sí Beetham, David *Democracy.* Oneworld Oxford, talva 3.1: „Electoral turnout in selected European democracies, 1980 to 2000“.

valið í 2004 bara 220. Hetta ber við sær herda kapping. Hvørji verða tá vald, hvat vísa kanningarnar?

Harðari kapping tykist at bera við sær, at tey ið hava útbúgving og eru væl fyri fíggjarliga nú fáa enn betri umboðan. Millum tey uppstillaðu og tey valdu er tað ein størri partur í 2004 enn í 2000 við langari útbúgving, sí talvu 7.4:

**Talva 7.4: Útbúgving (í prosentum). Broytingar frá 2000-2004.**

| | Kvinnur uppst. 2004 | Kvinnur uppst. 2000 | Kvinnur valdar 2004 | Kvinnur valdar 2000 | Menn uppst. 2004 | Menn uppst. 2000 | Menn valdir 2004 | Menn valdir 2000 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 0-3 ár eftir 7. flokk | 33 (-9) | 42 | 29 | 31 | 28 | 29 | 24 (-8) | 32 |
| 4- 6 ár | 27 | 25 | 23 (-7) | 30 | 32 | 36 | 33 | 32 |
| 7 ár ella meira | 40 (+7) | 33 | 48 (+9) | 39 | 40 | 36 | 43 (+6) | 37 |
| Í alt (N) | 100 (144) | 100 (112) | 100 (52) | 100 (54) | 100 (241) | 100 (241) | 100 (114) | 100 (130) |

Kelda: Spurnakanning millum øll uppstillað í 2000 og 2004

Sum talva 7.4 vísir hevur næstan onnur hvør kvinna vald í 2004 langa útbúgving. Millum valdu menninar í 2004 eru munandi færri sum bert hava gingið í fólkaskúla í mun til teir, sum vórðu valdir í 2000. Talva 7.5 vísir hvar tey við longst útbúgving sita, tað er í teimum størstu kommununum:

**Talva 7.5 Kommunupolitikarar valdir í 2004 við langari útbúgving í smáum, miðalstórum og stórum kommunum.**

| | **Smáar kommunur** 3-5 limir í bygdaráðnum | **Miðalstórar kommunur** 7-9 limir í bygda-/ býráðnum | **Stórar kommunur** 11-13 limir í býráðnum |
|---|---|---|---|
| Meira enn 7 ára útbúgving aftan á 7. flokk (n=385) | 24 % | 47 % | 61 % |

Keldur: Spurnakanning millum uppstillað í 2004.

Vanliga er ein samanhangur millum langa útbúgving og góða inntøku. Ein samanbering millum tøl hjá Hallberu West og okkara spurnakanning vísir eisini, at uppstillaði og vald hava hægri inntøku enn fólkið sum heild, sí talvu 7.6:

**Talva 7.6: Húsarhaldsinntøka (í prosentum)**

| Ársinntøka hjá húsarhaldinum | Fólkið sum heild | Uppstillað 2004 | Vald 2004 |
|---|---|---|---|
| Minni enn 250 000 kr | 29 | 12 | 9 |
| 250 000 – 600 000 kr | 59 | 67 | 67 |
| Meira enn 600 000 kr | 12 | 21 | 24 |
| Í alt (N) | 100 (458) | 100 (393) | 100 (170) |

Keldur: Spurnakanning millum uppstillað í 2004; Hallbera West, medborgarakanning 2004.

Samanumtikið kann sigast, at tað serliga eru fólk um tey fjøruti, ið luttaka í kommunupolitikki. Hetta eru ofta menn 'í besta aldri' við góðari útbúgving, og sum eru væl fyri peningaliga. Sum vit sóu í kap. 6, mynd 6.1 verða tey, ið framman undan hava royndir

í politikki, ofta afturvald. Kvinnur eru sum kunnugt ikki líka væl umboðaðar í bý- og bygdaráðunum. Tær kvinnur sum eiga smábørn, luttaka minni enn pápar at smábørnum. Hetta avmyndar galdandi kynsleiklutir í heimunum. Kanska virksemið hjá politikarunum í størri mun átti at verið tillagað gerandisdagin hjá kvinnum.

## 7.3 Hvat hugsa kommunupolitikarar um kommunupolitikk?

Hvat siga tey fólkavaldu um tað at vera politikari? Talva 9 aftast í bókini vísir svarini frá spurnakanningunum. Tey flestu sum hava svarað spurnabløðunum tykjast at vera fegin um at vera vald. Tað er hugaligt at halda seg vera til nyttu í bygdaráðnum ella í býráðnum.[16] Bæði kvinnur og menn, men serliga kvinnurnar, halda tað kommunupolitiska arbeiðið vera læruríkt og at tað økir um áhugan fyri politikki.[17] Men ikki øllum hóvar arbeiðslagið. Serliga kvinnur hava upplivað, at „Tað eru nøkur fá, ið dominera á fundunum".[18] Summar av kvinnunum halda eisini at „Málburðurin er ofta óhøviskur á fundunum". Tað eru fá ið halda at málini eru ov trupul at taka støðu til. Tað eru heldur ikki nógv ið siga at tað er „ov nógv sum skal lesast fyri fundirnar", ella at „fundirnir eru ov nógvir og drúgvir" (sí talvu 9 aftast í bókini). Óivað hevur tað ikki verið meira enn tað tey væntaðu, og samsýningarnar fyri at taka lut í arbeiðinum eru hampuliga góðar (sí talva 12 aftast í bókini). Talva 10 aftast í bókini vísir tó at tað er annað enn løn og ágóðar sum ávirkar hugin at standa á lista til kommunuval. Hetta verður raðfest niðast. Fremsta drívmegin er hugurin at ávirka, hvussu kommunan verður stýrd.

16 Av teimum, ið vóru vald í 2004, svaraðu 69 % av kvinnunum og 52 % av monnunum á einum skala frá 1 til 5 „5: ja, heilt avgjørt" upp á pástandin: „Eg haldi meg hava verið til nyttu í bygdaráðnum/býráðnum".

17 Av teimum, ið vóru vald í 2004, svaraðu 62 % av kvinnunum á einum skala frá 1 til 5 „5: ja, heilt avgjørt" upp á pástandin: „Arbeiðið í bygdaráðnum/býráðnum hevur økt mín áhuga fyri politikki", og pástandin: „Eg havi lært nógv um ymisk samfelagsmál." Av monnunum svaraðu ávikavist 36 % og 43 % „ja, heilt avgjørt" til hesar spurningar.

18 Av teimum, ið vóru vald í 2004, svaraðu 29 % av kvinnunum og 13 % av monnunum á einum skala frá 1 til 5 „5: ja, heilt avgjørt" upp á hendan pástandin.

Síðan kemur at tað er læruríkt og áhugavert, og at tey uppstillaðu halda tað vera eina samfelagsskyldu at stilla upp, tá tey verða biðin.

Tað letur ikki til at vera so stórur munur á, hvørjum málum ið kvinnur og menn eru upptikin av (sí talvu 11 A-B aftast í bókini). Hægst raðfesta málið er *skúlin*. Hjá kvinnum kemur so *barnaansing* og *umhvørvispolitikkur*, og hjá monnum *byggi- og býarætlan*, men øll hesi mál verða raðfest høgt bæði av kvinnum og monnum. Somuleiðis er *eldraøkið* høgt á listanum hjá bæði kvinnum og monnum. Sum nevnt høvdu vit fyrst eina spurnakanning millum tey, ið vórðu uppstillað í 2000, og so millum tey uppstillaðu í 2004. Bæði barnaansing og eldraøkið vóru hægri raðfest millum tey uppstillaðu í 2000 enn millum tey uppstillaðu í 2004. Summi vísa á at nógv varð gjørt í kommununi á hesum økjunum valskeiðið 2000-2004, og tí koma onnur mál ovari. *Vinnulívspolitikkur*, *heilsu- og almannamál* og *samferðslupolitikkur* eru lægri raðfest. Niðast seta tey uppstillaðu sum heild *mentan*. Vit síggja eina lítla ábending um at kvinnur sum heild eru meira upptiknar enn menn av at menna tær kommunalu vælferðatænasturnar. Menn sum heild sýnast meira upptiknir av at menna tann kommunala infrastrukturin. Tað kann framvegis hugsast at kynsumboðan hevur týdning fyri hvørji mál, ið koma á politisku dagsskránna.

Politisk umboðan hevur verið eitt aðalmál hjá kvinnufylkingum júst við hesi grundgeving. Í hesum sambandi er áhugavert, at stórur munur er á hvussu kvinnur og menn svara spurninginum um representatión, sí talvu 7.7:

**Talva 7.7 Hugsan um hvussu bygdaráðið / býráðið eigur at vera samansett. Prosent**

| | *Lítlan/nokkso lítlan týdning (1 og 2)* | | *Nokkso stóran / stóran týdning (4 og 5)* | |
|---|---|---|---|---|
| | Kvinnur | Menn | Kvinnur | Menn |
| Umleið sama tal av monnum og kvinnum | 7 | 43 | 80 | 27 |
| Fólk í øllum aldri | 6 | 15 | 73 | 49 |
| Umboð fyri ymiskar bygdir / býarpartar í kommununi | 20 | 30 | 51 | 41 |

Keldur: Spurnakanning millum uppstillað í 2004.

Kvinnur leggja sum heild meira týdning í at kommunustýrini eru breitt samansett í mun til kynsbýti, aldurbýti og umboðan av bygdum og býlingum. Kortini er tað mest hugvekjandi í talvu 7.7 at 80 % av kvinnunum eru upptiknar av at fáa betri kvinnuumboðan, meðan bert 27 % av monnunum halda at kynsjavnvág hevur týdning, og at 43 % av monnunum halda hetta hava lítlan týdning.

Nógvar uppstillaðar kvinnur siga eisini, at ein orsøk til at tær eru komnar á listan, er at tær eru kvinnur.[19] Hetta er tann grundgevingin sum flestar vísa á. Menn aftur ímóti seta týdningin av at teir eru menn, niðast. Annars líkjast svarini hjá monnum og kvinnum: Tey halda, at tað, at tey hava kunnleika um lokal viðurskifti, fáa ymiskt í lag og kenna nógv fólk, hevur havt týdning fyri, at tey komu á listan. Aðrar orsøkir, sum t.d at tey hava stóra familju ella umboða ein kristnan felagsskap, seta fá kross við.

Eisini aðrar spurnakanningar[20] um rekruttering av politikarum

19 Sí Jákupsstovu og Kjersem 2008, op.cit., tabell 3.17.
20 Sí Aars, Jacob (2001) *Rekrutteringsveier i norske kommuner.* SEFOS-notat 6-2001, Bergen.

benda á tað sama. Tey uppstillaðu og valdu leggja størri dent á teirra persónligu eginleikar sum orsøk til uppstilling og val – ikki at tey umboða ein ávísan bólk. Flokkar taka eisini onnur atlit, tá teir gera listan til valið. Teir mugu ansa eftir at valevnini tilsaman breitt umboða teir bólkar sum kunnu hugsast at velja flokkin. Uttan atkvøður gerst einki. Sum vit síggja eru tær føroysku kvinnurnar ofta medvitnar um sín partvísa leiklut sum kvinnuumboð, og kanska viðhvørt sum alibi ella ífylla á listanum, sum summar skriva.[21]

### 7.4 Valstríðið

Sum omanfyri víst eru tey, sum eru hampuliga væl fyri peningaliga og útbúgvingarliga, v.ø.o. *elitan* í samfelagnum, betri umboðað enn fjøldin. Ein orsøk til hetta er valskipanin. Kommunuvalini eru skipaði sum persónval. Tað er ein valskipan har atkvøðurnar fara til tann einstaka, og sjáldan til listan. Fram til 1972 var valskipanin øðrvísi. Tá var tað so, at fekk ein listi nóg nógvar atkvøður til at fáa umboð, var tann valdur sum stóð ovast á listanum. Í 1972 var hetta broytt: Nú setir veljarin kross við tann persónin, sum hann ella hon helst vilja hava inn. Aftan á valið verður fyrst talt upp, hvussu nógvar atkvøður hvør listi hevur fingið. Roknað verður út, hvussu nógv valevni hvør listi hevur fingið. Síðan verður funnið fram til hvørji tey eru á hesum listum, sum hava fingið flestar krossar.

Ein so persónfokuserað valskipan ger, at tað verður ein kapping millum valevnini heldur enn millum flokkarnar. Tað verður „En mod alle, alle mod én“.

Í staðin fyri at tosa um hugmyndir og skrá hjá flokkinum ella listanum, verður tað ofta tosað um at fáa rætta persónin í bygda- ella býráðið. Tað eru dømi um harða kapping millum valevni í sama flokki. Hvussu stóran týdning effektiv marknaðarføring hevur fingið sum partur av valstríðnum, skiltu vit tá vit sóu úrslitini frá tí fyrru spurnakanningini. Millum svørini sum komu inn í 2004 frá 2000-uppstillingini vóru tvær viðmerkingar sum loyptu hvøkk á okkum. Spurningurin var:

21 Onkrar hava fortalt at tær beinleiðis eru spurdar um at standa á lista „tí okkum mangla eina kvinnu“ – og tá hava svarað nei.

*Spurningur 25: Um tygum verða biðin um at standa á lista til kommunuvalið 2004, hvat er svarið?*

Respondentur nr. 69 svaraði
*Ja, eg havi hug at stilla upp*
*Ja, kanska*
X *Nei, eg haldi ikki*
*Nei, eg havi ongan hug*

Og kom við hesi viðmerking:

*„Hetta kemst av, at hetta at stilla upp er vorðið so ovurhonds dýrt. Hetta er einasta grund!"*

Hin skrivaði at til næsta val var teirra kommuna løgd saman við Havnini, og at tá fór hann ikki at hava ráð at stilla upp.

Vit settu tí nýggjan spurning í tí kanningini, sum varð gjørd í 2006 millum teirra sum vóru uppstillað í 2004. Vit spurdu hvussu nógv tey høvdu brúkt av pengum í valstríðnum. Úrslitini síggja vit í talvu 7.9. Talvan vísir m.a. hvussu nógv tey uppstillaðu í miðal hava brúkt av egnum peningi í valstríðnum í smáum, miðalstórum og stórum kommunum. (Aftast í bókini er talva sum vísir meira nágreiniliga pengabrúkið hjá valevnum í teimum ymisku kommununum, sí talvu 13).

**Talva 7.9 Egnar útreiðslur til valstríð í smáum, miðalstórum og stórum kommunum**

